| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. oktober 2019 | Blað nr.: 975 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 30. oktober 2019 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 234/19-260/19

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Marius Muller
Barbara Vang
Sigurð Vang
Eyðfríð Jacobsen
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 234/19 | 19/00098-1 | Mál beind í nevndir 2019 | 978 |
| 235/19 | 14/05399-11 | Viðv. matr.nr. 135qf, Hoyvík. | 980 |
| 236/19 | 17/03601-12 | Grundstykkið matr.nr. 91m. Eigari vil lata grundstykkið aftur til kommununa. | 982 |
| 237/19 | 18/02215-2 | Søla av grundstykki á Kerjagøtu | 984 |
| 238/19 | 18/01973-1 | Íbúðarbygging undir Kongavarða | 988 |
| 239/19 | 19/01792-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Kirkjubøur Argir | 998 |
| 240/19 | 14/02038-19 | Leigusáttmálar. Neystini undir Bakka. Umsókn frá leiðarum um ættarliðskifti. | 1001 |
| 241/19 | 19/02482-1 | Útstykking til sethús í Kaldbak | 1008 |
| 242/19 | 18/00908-5 | Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum biogassanleggi | 1011 |
| 243/19 | 17/03195-1 | Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil | 1018 |
| 244/19 | 18/04076-1 | Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting | 1031 |
| 245/19 | 19/02605-1 | Bygnaðarviðurskifti á dagstovnaøkinum | 1034 |
| 246/19 | 19/03929-1 | Prísregulering av brúkaragjøldum á brandstøðini | 1046 |
| 247/19 | 19/04201-1 | Umsókn um stuðul til Listasavn Føroya | 1048 |
| 248/19 | 14/00417-16 | Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak | 1050 |
| 249/19 | 15/03842-7 | Fjallasúkklufelagið : Umsókn um lendi til fjallasúkklurás | 1056 |
| 250/19 | 17/02247-1 | Gøtan kring Havnina og fiskastykkið | 1058 |
| 251/19 | 19/02587-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt á Lambatrøðni, matr. nr. 157a, Argir | 1067 |
| 252/19 | 19/03960-2 | Tillaga umsókn um broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki við matr. nr. 1oe og 139a, Hoyvík. Frá 4. Grundumráði til B7. | 1069 |
| 253/19 | 18/03782-1 | Broyting av serstøku byggisamtyktini undir Gráasteini, matr. nr. 1116a, Tórshavn | 1072 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 254/19 | 18/04229-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini, Dalurin Langi, matr. nr. 138a, Hoyvík frá A3 til D1 | 1079 |
| 255/19 | 19/02860-8 | Lýsingarskelti á Neistahúsinum, matr. nr. 457c, R.C.Effersøesgøtu 16, Tórshavn | 1086 |
| 256/19 | 19/04200-1 | Lýsing eftir tekniskum stjóra til tekniska økið, freist | 1092 |
| 257/19 | 19/02369-1 | Fíggjarætlan 2020 | 1094 |
| 258/19 | 19/00096-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019 | 1104 |
| 259/19 | 18/03468-1 | Skipan av Stórutjørn | 1107 |
| 260/19 | 17/03215-19 | Umsókn um byggiloyvi til bilskýli á matr. nr. 4dg, Rygsgøta 29, Argir | 1112 |

## ***234/19 Mál beind í nevndir 2019***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 4/19 | 19/00098-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 31/19 | 19/00098-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 56/19 | 19/00098-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 80/19 | 19/00098-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 103/19 | 19/00098-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 132/19 | 19/00098-1 |
| 7 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 191/19 | 19/00098-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 234/19 | 19/00098-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt**.**

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

# 235/19 Viðv. matr.nr. 135qf, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 264/19 | 14/05399-11 |
| 2 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 235/19 | 14/05399-11 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá eigarum.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Viðv. matr.nr. 135qf, Hoyvík.

Skeytið er tinglýst 03-10-2016.

Grein 6 í skeytinum: *Keyparin hevur ikki loyvi til at selja stykkið víðari, fyrr enn egin sethús til privatan bústað eru bygd á stykkinum; og keyparin hevur búð í privatu húsunum í 3 ár. Tórshavnar Býráð kann loyva frávik frá hesum, um haldgóð grundgeving fyriliggur.*

Eigarar greiða frá, at húsini eru vorðin ov smá nú húskið skjótt telur 7 fólk, og ætla tey tí at selja húsini og at keypa onnur størri hús. Tey hava búð í húsunum í uml. 2 ár.

**Lógir, ásetingar o.a.** Servituttur.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Frávik frá tinglýstum servitutti. Grein 6 í skeytinum.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Tinglýst skeyti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. oktober 2019 | Blað nr.: 981 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at loyva víðarisølu av ognini matr. nr. 135qf, við ástandandi sethúsum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>30. oktober 2019 | Blað nr.: 982<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 236/19 Grundstykkið matr.nr. 91m. Eigari vil lata grundstykkið aftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 261/19 | 17/03601-12 |
| 2 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 236/19 | 17/03601-12 |

**Upprunin til málið: Keypari av óbygdum grundstykki matr.nr. 91m, Kollafjørður, heitir á kommununa um taka grundstykkið innaftur.**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Óbygt grundstykki í Kollafirði. Útstykking Hamrabøur.
Matr.nr. 91m, Kollafjørður. Vídd562m. Keypsprísur kr. 264.145,62
Skeytið er tinglýst 13.12.2018
Tinglýstur servituttur er um 3 ára byggifreist.

Keyparin greiðir frá, at hann hevur slept ætlanunum um at byggja sethús, og ynskir at lata grundstykkið innaftur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Skeyti.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. oktober 2019 | Blað nr.: 983 |
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at keypa stykkið aftur, og at luta tað út aftur sambært reglugerð.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

# 237/19 Søla av grundstykki á Kerjagøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 167/18 | 18/02215-2 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 141/18 | 18/02215-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 29.08.2018 | 244/18 | 18/02215-2 |
| 4 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 185/18 | 18/02215-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 208/19 | 18/02215-2 |
| 6 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 179/19 | 18/02215-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 226/19 | 18/02215-2 |
| 8 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 197/19 | 18/02215-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 287/19 | 18/02215-2 |
| 10 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 237/19 | 18/02215-2 |

**Upprunin til málið:** Kommunan hevur 4 grundstykkir í eini útstykking á Dánjalstrøð á sølulista hjá ognarmeklara. Grundstykkini verða latin við vegatkomu og tekniskum innleggingum, men óutgrivin.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Grundstykkini hava staðið á sølulista hjá ognarmeklara. Prísuppskot kr. 1,1 mill. kr. Tað hevur verið ein avbjóðing í sølutilgongdini, at kommunan hevði ætlanir um at fíggja vegin við sølu av hesum 4 grundstykkjunum, áðrenn møguligur sáttmálið uppá útstykkingarveg var undirskrivaður.

Seinni hevur býráðið so samtykt, at fara undir vegagerðina. Mett tíðarætlan uml. 7. mðr. Harumframt ganga so nakrir mánaðar, eftir hetta at fáa grundstykkini og vegin við parkeringsøkjum og felagsøkjum frámatrikulerað. Leystliga mett ganga helst eini 10 mánaðar til endaliga skeytið kann skrivast og tinglýsast.

Meklarin upplýsir, at síðstu tíðina, hava verið fleiri fyrispurningar, og at ein keypari er komin við boðskjali og bankaváttan á kr. 1.1 mill. kr. fyri stykkið nr. 1.

Meklarin hevur fyribils skrivað viðkomandi keypara stykkið upp til stykkið nr. 1 og verður hetta stykkið tí tikið av sølulista.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**Ongar.

**Skjøl**. Sølutilfarð sum liggur hjá meklara.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávísøkir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at skriva undir eina treytaða keypsavtalu áljóðandi kr. 1.1 mill. kr. við viðkomandi keypara, sum verður tíðaravmarkað til 1 ár.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Meklarin hevur boðað frá, at keyparar eru til øll grundstykkini. Søluprísur pr. Stykkið kr. 1,1 mill. kr.

Meklarin hevur fyribils tikið stykkini aftur av sølulista.

Býráðið hevur samtykt at skriva skriva undir treytaða keypsavtalu áljóðandi 1,1 mill. kr. fyri stykkið nr. 1. Treytaða keypsavtalan verður avmarkað til 1 ár.

**Tilmæli:**

Nú keyparar eisini eru til hini 3. stykkini í útstykkingini, t.v.s. stykkið nr. 3 – 5 og 7, mælir kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni til at skriva undir treytaðar keypsavtalur við hesar keypararnar áljóðandi 1,1 mill. kr. pr. stykkið. Treytaðu keypsavtalurnar verða galdandi í 1 ár.

**Fíggjarnevndin 29. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Kommunan fekk í januar 2019, boð frá meklara um at ongin av keyparunum ynsktu at gera eina endaliga avtalu.

Kommunan hevur síðani biðið Meklaran um at lýsa stykkini til sølu av nýggjum, og út frá kendum fortreytum. Íbúðarbygningarnir frammanfyri eru liðugt bygdir, og sæst nú betur hvussu grundstykkini liggja í lendinum, og hvussu útsýnið verður.

Boð eru komin uppá grundstykkini Kerjagøta 1 og Kerjagøta 7, áljóðandi kr. 1.150.000,00 uppá hvørt grundstykkið.

Boðini vóru galdandi í 48 tímar og kom onki mótboð innan freist.

Meklarin hevur tikið bæði grundstykkini av sølulista, og bíðar eftir býráðsins avgerð. Søluskeytini kunnu avgreiðast so skjótt sum matrikuleringin er avgreidd.

Matrikuleringin verður væntandi avgeidd beint eftir summarferiuna, og verða søluskeytini avgreidd, tá í stykkini hava fingið egi matrikul nr.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at selja grundstykkini Kerjagøta 1 og Kerjagøta 7, fyri innkomin boð kr. 1.150.000,00 fyri hvørt stykkið.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Boð kr. 1.050.000 er innkomið uppá grundstykkið Kerjagøta 5.
Boðið er galdandi til mikudagin 11.09.2019 kl. 16.

Um onki mótboð kemur innan freist, verður grundstykkið tikið av sølulista til býráðið hevur tikið avgerð.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at selja grundstykkið Kerjagøta 5 fyri innkomið boð kr. 1.050.000,-

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Boð kr. 1.050.000 er innkomið uppá grundstykkið Kerjagøta 3.
Boðið er galdandi til mikudagin 23.10.2019 kl. 10.30

**Tilmæli:**

Um onki mótboð kemur innan freist, mæla kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni til at selja grundstykkið Kerjagøta 3 fyri innkomið boð kr. 1.050.000,-

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

# 238/19 Íbúðarbygging undir Kongavarða

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 139/18 | 18/01973-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 184/18 | 18/01973-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 155/18 | 18/01973-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 191/18 | 18/01973-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 261/18 | 18/01973-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 221/18 | 18/01973-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.09.2018 | 192/18 | 18/01973-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 26.09.2018 | 273/18 | 18/01973-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 44/19 | 18/01973-1 |
| 10 Eldranevndin | 13.03.2019 | 1/19 | 18/01973-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 13.03.2019 | 63/19 | 18/01973-1 |
| 12 Býráðsfundur | 14.03.2019 | 49/19 | 18/01973-1 |
| 13 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 20/19 | 18/01973-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 195/19 | 18/01973-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 174/19 | 18/01973-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 279/19 | 18/01973-1 |
| 17 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 238/19 | 18/01973-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í miðbýnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tað eru bygd 5 íbúðarhús Undir Kongavarða og sambært uppruna ætlanini fyri økið, so er pláss fyri trimum íbúðarhúsum afturat sunnanfyri verandi hús.

Tórshavnar kommuna eigur matr. nr. 255a, Argir, og tað ber væl til at halda áfram við byggingini av íbúðarhúsum.

Verandi íbúðarhús eru bygd av einum privatum byggiharra. Húsini eru í 6 hæddum við íalt 10 íbúðum í hvørjum húsi.

Tað er umráðandi at tey 3 punkthúsini, sum verða bygt afturat, verða gjørd samsvarandi heildarætlanini fyri alt økið. Tað vil siga at húsini í støðd koma at svara til tey húsini sum eru har og í útsjónd fella væl inn í økið.

Slag av íbúðum:

Dømi 1:
Allar ella minst helvtin av íbúðunum verða leiguíbúðir sum eru rørsluvinarligar og at hetta verður gjørt eftir sama leisti sum við verkætlanini 'Íbúðarbygging á Frúutrøð', í sambandi við bygging, fígging og umsiting.

Hetta merkir, at tey sum bjóða uppá verkætlanina helst eru toymi samansett við ráðgevum, umboð frá byggivinnuni, íleggjarum og møguliga eisini persónum/fyritøkum, ið kunnu umsita leiguíbúðirnar.

Verkætlanin verður boðin út alment í undangóðkenning (prækvalifikatión) og kunnu øll, sum lúka ávísar treytir, koma við eini áhugafráboðan, soleiðis at fleiri fáa møguleikan at bjóða uppá verkætlanina.
Vinnandi tilboðsgevi fær optión uppá lendið, og ein søla verður ikki framd, fyrr enn kommunan hevur góðkent eitt liðugt verkætlanaruppskot. Verður ongin verkætlan innan eitt ásett tíðarskeið t.d. 2 ár, ella um kommunan ikki kann góðkenna verkætlanina, fellur optiónin burtur og ongin søla fer fram.

Dømi 2:
At grundstykkið verður boðið út alment til at byggja 3 íbúðarhús á, sum verða í 6 hæddum, við uml. 10 íbúðum í hvørjum húsi.

Kommunan skal gera eitt útbjóðingartilfar, við ymiskum treytum, ynskjum og ásetingum um m.a.:
- Slag av bygging, stødd, útsjónd o.a.
- Vegatkoma, parkering, fríøkir, leiðingar o.a.
- Ávirkan á økið, eigarafelag o.líkn.
- Tíðarætlan fyri bygningina
- Kostnaður
- Útlutan av íbúðum
- V.m.

Á hendan hátt kann verkætlanin skjótt bjóðast út og ein byggiharri kann skjótt fara í gongd við bygningina.

Bæði dømini omanfyri stuðla væl undir visjónunum hjá kommununi um at fáa til vega fleiri bústaðir, við støði í fjølbroyttum bústaðarmøguleikum og við einum breiðum borgaraskara. Møguleiki fyri at eldri ella rørslutarnað kunnu búgva á økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Sambært ásetingunum ber ikki til at gera útstykkingar í A3 uttan við serstakari byggisamtykt og neyðugt er eisini við serstakari byggisamtykt fyri at byggja í 6 hæddum.

**Umhvørvisárin**
Flokkur 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ikki verið hjá øðrum enn.

**Skjøl**
Tekning av øki at frámatrikulera (kemur til fundin).

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

| | **Býráðsfundur**<br>30. oktober 2019 | Blað nr.: 990 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at eitt passandi øki verður frámatrikulerað til at byggja 3 íbúðarblokkar á, at umsitingin ger uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið at leggja fyri nevndina aftur, at umsitingin ger uppskot til útbjóðingartilfar eftir dømi 2 omanfyri, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskippanarnevndini og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við at gera útbjóðingartilfar til íbúðarbygging undir Kongavarða.

Tað er eitt kommunalpolitiskt ynski at raðfesta leiguíbúðir og harvið ein høvuðsstað, sum rúmar ymsum fólki við ymsum tørvi. Tí er tað sera týdningarmikið at kunna bjóða ein fjølbroyttan bústaðarmarknað við bæði grundstykkjum, eigara- og leigubústøðum. Bústaðarpolitikkurin fyri Tórshavnar kommunu vísir tó á, at tað er stórur tørvur á fleiri leigubústøðum í kommununi. Fjórði hvør vil búgva til leigu, men torført er at fáa hetta at ganga upp, tí leigumarknaðurin í kommununi er sera avmarkaður.

Fyrsta verkætlan við bygging av leiguíbúðum Íbúðarbygging á Frúutrøð varð bjóðað út í vár sí Útbjóðingartilfar, j. nr. 18/00950-44. Stórur áhugi var fyri verkætlanini, men tá samanum kom, bjóðaði eingin inn. Afturmeldingar frá áhugaðum feløgum vísa á, at ov nógvar treytir vóru settar til útbjóðingina, og at hetta saman við tí yvirupphitaða marknaðinum og fullu ordrabókunum hjá byggifyritøkunum gjørdi, at vinnan lat verkætlanina fara aftur við borðinum. Tó siga feløgini, ið hava víst áhugað fyri verkætlanini, at tey framvegis eru áhugað í at byggja leigubústaðir, tó eftir tillagaðum treytum.

Kommunan sleppir tí ikki ætlanini við at fáa bygt fleiri leigubústaðir, men arbeiðir víðari við at tillaga tær ymsu útbjóðingarnar í mun til innkomnu viðmerkingar. Mælt verður tí til at bjóða verkætlanina Undir Kongavarða út til bygging av bert leiguíbúðum, og ikki sum á Frúutrøð sum ein samanseting av eigara- og leiguíbúðum, tí tað ger, at fleiri treytir mugu setast.

Ætlanin er at bjóða lendi Undir Kongavarða út við hesum yvirskipaðu treytum:
- at tað bert verða gjørdar leiguíbúðir
- at byggingin verður tillagað nærumhvørvinum eisini í mun til útsýni hjá útstykkingum omanfyri
- at keyparin letur inn eitt uppskot við treytum so sum stødd, staðseting og útsjónd á bygningum, tali og stødd á íbúðum saman við eini tíðarætlan fyri byggingini.

Umsitingin hevur gjørt eitt ávegis uppskot til útbjóðingartilfar, sí j.nr. 18/01973-13. Ætlanin er at bjóða økið út sambært treytunum í útbjóðingartilfarinum.

Privata vinnan hevur gjørt vart við, at tey ikki hava somu treytir sum Bústaðir, tá tað kemur til at keypa lendið frá kommununi. Umsitingin hevur kannað ymsu møguleikarnar í samband við útbjóðing av lendi, soleiðis at vinnan kann fáa fyritreytir, sum líkjast teimum, sum Bústaðir fáa, ella á annan hátt ger tað meira lønandi fyri vinnuna at byggja leigubústaðir. Kostnaðurin fyri lendið verður nærri lýst til fíggjarnevndarfundin.

**Skjøl**
Útbjóðingartilfar fyri Frúutrøð, j nr. 18/00950-44
Ávegis uppskot til útbjóðingartilfar_20180912, j.nr. 18/01973-13
Kort av byggiøki, j.nr. 18/01973-7
Kongavarði_Uppmátingarplanur, j.nr. 18/01973-8
Kongavarði_Tvørskurður A-A, j.nr. 18/01973-9
Kongavarði_Tvørskurður B-B, j.nr. 18/01973-10
Kongavarði_Tvørskurður C-C, j.nr. 18/01973-11
Kongavarði_Tvørskurður D-D, j.nr. 18/01973-12

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | **x** | | | **x** |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | **x** | **x** | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **X** | | | **x** |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**
Fíggjarligu avleiðingarnar verða nærri lýstar til fíggjarnevndarfundin.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin ger útbjóðingartilfarið endaligt liðugt, fyri síðani at bjóða verkætlanina út, tá málið er samtykt í fíggjanevndini og býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur endurskoðað fyriliggjandi útbjóðingartilfar, sí j.nr. 18/01973-18.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla fíggjarnevndini til at taka undir við endurskoðaða útbjóðingartilfarinum, j.nr. 18/01973-18.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við endurskoðaðum útbjóðingartilfari j.nr. 18/01973-18 og at beina málið í býráðið við atliti til at bjóða verkætlanina út í alment útboð.

**Ískoyti:**
Hesar broytingar eru gjørdar í mun til útbjóðingartilfarið sum fíggjarnevndin hevur samtykt 19.09.2019:

- Tíðarætlan fyri tilgongdina er løgd afturat.

- Undir "Myndugleikatreytir og byggisamtykt" er hetta lagt afturat: "Kommunan skilar sær rætt til at seta treytir til byggingina viðvíkjandi, staðseting, arkitektur og annað".
- Fylgiskjølini byggiøki, uppmátingarplanur og skurðir yvir økið eru løgd við

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tikið verður undir við endurskoðaðu útbjóðingartreytunum j.nr. 18/01973-21 Útbjóðingartilfar undir Kongavarða endaligt, at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. september 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2018:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam og Odd Færø.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
2. oktober 2018 var útbjóðingarfundur viðv. Útboð av lendinum undir Kongavarða til bygging av leigubústøðum.

29. oktober 2018 sendi eigarafelagið undir Kongavarða kommununi skriv, har víst varð á, at eigarafelagið er natúrligur hoyringspartur í sambandi við ætlaðu íbúðarbyggingina undir Kongavarða. Somuleiðis verður serliga víst á, at eigarafelagið er stúrin um parkeringsviðurskiftini, nú fleiri bústaðir verða í økinum. Kommunan ynskir sjálvandi at kunna grannarnar viðv. Íbúðarbyggingini, og vilja tí bjóða grannunum inn til ein kunnandi fund.

Freistin at lata inn tilboð var longd, tá eingi tilboð komu inn í fyrstu rundu. 5. november 2018 móttók kommunan eittans tilboð upp á lendi, sí journal. nr. 18/01973-29, har bjóðað var 1.648.500 kr. fyri áleið 10.500 fermetrar av matr. nr. 255a.

Síðani fór umsitingin undir samráðingar við tilboðsgevararnar fyri at tryggja at ymisku treytirnar til byggingina vóru umrøddar og tiknar við í teirra uppskot, og 22. februar 2019 fekk kommunan handað tillagað skipanaruppskot, sum lýsir byggingina soleiðis:

Talan er um bygging skipað sum ein samanhangandi lon í 3 pørtum við tiltakandi frástøðu oman til vegin Undir Kongavarða.

Skilvísið 'logikkurin' í økis- og bygningsskipanini byggir í stóran mun á brunatrygdarligu ásetingarnar um íbúðaratkomu og rýmingarleiðir umvegis svalagongir við tvívegis tenging til trappurúm. Bygningsbaksíðan er sostatt eyðmerkt av svalagongunum og trappurúmum, meðan forsíðan er eyðmerkt av svalum. Hetta gevur bygninginum lættan og vinarligan

bústaðardám út til aðra bygging í økinum – ein dámur, sum verður undirstrikaður av fjálgum tilfars- og litvali.

Lendið omanfyri og niðanfyri bygningarnar er sniðgivið við atliti til skynsamliga lítla fráståðu til atkomuvegirnar og parkeringsumstøðurnar, samstundis sum nærumhvørvið við bygningarnar ikki skal vera eyðmerkt av bilferðslu, men harafturímóti vera meiri urtagarðs- og uppihaldsvinarligt.

**Íbúðatal og víddir:**

| | |
|---|---|
| Bústaðatal | 94 stk. |
| herav | |
| A á 45m$^2$ (2 rúms-íbúð) | 22 stk. |
| B á 60m$^2$ (2 rúms-íbúð) | 51 stk. |
| C á 90m$^2$ (3 rúms-íbúð) | 10 stk. |
| D á 90m$^2$ (3 rúms-íbúð) | 11 stk. |
| | |
| Bruttuvídd | 7053 m$^2$ |
| Ábygt | 2705 m$^2$ |
| Grundøkjavídd | 10.555 m$^2$ |
| Byggistig | 0,26 |
| Nýtslustig | 0,7 |

Sí skjal Tillaga skipanaruppskot_08-03-2019, journal nr. 18/1973-50.

Skipanaruppskotið er ein yvirornað skipan av økinum, umframt av sjálvari byggingini. Í tilgongdini hevur verið víst á, at byggiharrin skal tryggja, at útboðstreytirnar verða hildnar, sí Útbjóðingartilfar undir Kongavarða endaligt, journal nr. 18/01973-21, umframt at allar ásetingarnar fyri byggingina verða fylgdar, hetta íroknað parkeringsviðurskiftir og nøktandi uttanumsøki.

Av tí tillagingar í mun til skipan av økinum hava verið gjørdar í innlatna skipanaruppskotinum, so hevur kommunan móttikið eina nýggja støðumynd av skipanini, sum sæst í skjalinum Støðumynd_08.03.2019, journal nr. 18/01973-50.

Í framhaldandi projekteringini kemur Byggideildin at tryggja, at útbjóðingartreytirnar og aðrar ásetingar fyri tílíka bygging verða hildnar sambært galdandi ásetingum.

Í tilgongdini fram til í dag hevur serliga verið hugt eftir, at skipan av byggingini á økinum, umframt at innrættingin av íbúðunum er nøktandi í mun til yvirskipaðu treytirnar, og metir umsitingin, at hesi viðurskiftir eru væl lýst og intentiónirnar eru góðar í innlatna skipanaruppskotinum.

Sambært útbjóðingartilfarinum, kann Tórshavnar kommuna leiga 8 íbúðir til eldri yvir 67 ár, og er hetta somuleiðis ynski hjá tilboðsgevara. Og vísir tilboðsgevari somuleiðis á, at um Tórshavnar kommuna ynskir at leiga fleiri íbúðir, so er tað eisini ein møguleiki.

Heilsu- og umsorganartænastan fær ræðisrættin yvir tær 8 íbúðirnar sum kunnu leigast út til fólkapensionistar sum hava tørv á búplássi, men ikki eru mettir egnaðir til røktarheim/ellisheim.

**Skjøl**

*Ùtbjóðingartilfar undir Kongavarða endaligt*, journal nr. 18/01973-21.

*Innkomin tilboð til lendið til íbúðarbygging undir Kongavarða*, journal. nr. 18/01973-29.
*Tillaga skipanaruppskot_08-03-2019*, journal nr. 18/1973-50.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at samtykkja tillagaða skipanaruppskotið, at sundurbýta og selja NN Holding økið á áleið 10500 $m^2$, at gera nýggja serstaka byggisamtykt fyri økið og ætlaðu bygging og at beina málið í teknisku nevnd til kunningar og býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í Heilsu- og umsorgartænastuni mæla eldranevndini til at samtykkja, at kommunan fer í samstarv við NN Holding um at leiga 8 íbúðir til eldri yvir 67 ár, at beina málið í fíggjarnevndina at gera leiguavtalu við NN Holding um leigumálini og at beina málið í býráðið.

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at selja NN Holding á leið 10500 $m^2$ av matr. nr. 255a samsvarandi innkomna tilboði, at heimila umsitingini at gera leiguavtalu við NN Holding um leigu av 8 íbúðum til eldri yvir 67 ár og at beina málið í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, atkvøða blankt.

**Eldranevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá heilsu- og umsorganarstjóranum og fulltrúanum í heilsu- og umsorganartænastuni.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og eldranevndini og mælir býráðnum til at samtykkja málið og selja lendið fyri 157 kr./$m^2$ samsvarandi innkomnum tilboði.

Leiguavtalur viðv. Leigu av 8 íbúðum til eldri verða at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 14. mars 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum i fíggjarnevndini, sum varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 3 ímóti og 2 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blank atkvøddu: Bjørghild Djurhuus og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**

Umsitingin og Sp/f NN Holding hava samráðst um skeytið til ognina, part av matr. nr. 255a, sum ætlanin er at byggja leiguíbúðir á. Skeytið verður lagt fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at góðkenna fyriliggjandi treytaða skeyti upp á ognina Undir Kongavarða, part. av matr. nr. 255a.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælninum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við málinum vísandi til áður gjørdar samtyktir hjá minnilutanum í málinum.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið, ið heimilar byggiharranum at byggja 96 íbúðir í økinum, hevur verið til almenna hoyring sambært ásetingunum í býarskipanarlógini. Tá freistin at gera viðmerkingar var úti, komu fleiri viðmerkingar til ætlanina, har mótmælt verður ætlanunum um at byggja 96 íbúðir í økinum. Harumframt hava Eigarafeløgini undir Kongavarða og einstakir borgarar undir Kongavarða mótmælt ætlanini, meðan hoyringin fór fram.

Vísandi til nevndu mótmæli hava fundir verið millum byggiharran og Tórshavnar kommunu um at tillaga verkætlanina og minka um talið á íbúðum, so samlaða byggingin ikki verður so stór í vavi og kemur at hava eina minni ávirkan á økið bæði í mun til ferðslu og í mun til hvussu nógv byggingin «fyllir» í økinum.

Tillagaða verkætlanin leggur upp til at byggja í tveimum heldur enn trimum hæddum, og talið av íbúðum minkar úr 96 niður í 48 íbúðir.
Sí skjal 18/01973-80 Samla (Nýtt tilfar frá *Sp/f* NN Holding)

Henda broytingin hevur við sær, at serstøk byggisamtykt ikki verður neyðug.
Økið er partur av umráðispartinum A3, og onnur íbúðarbygging er bygd eftir somu byggisamtyktarligu ásetingum, m.a. Blómubrekka og Hoyvíkshædd. Sostatt verður mett, at verkætlanin heldur seg innanfyri ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri økið.

Býarskipanarliga verður mett, at broytta verkætlanin hóskar betur til økið enn upprunaliga, og við minkaðu verkætlanini ber til at nýta ein størri part enn annars burturav teimum 10.500 m² til fríøki til íbúgvarnar undir Kongavarða. Hetta merkir tó samstundis, at byggiharrin ikki byggir eins nógvar íbúðir í økinum sum upprunaliga ætlað, og vísir keyparin á, at hetta hevur ávirkan á møguleikarnar at fáa lønandi rakstur burtur úr verkætlanini.

Vísandi til omanfyristandandi – og vísandi til, at tørvur ikki er á øllum teimum umleið 10.500 m² til at byggja 48 íbúðir á – hevur byggiharrin sett fram ynski um, at kommunan makaskiftir part av teimum 10.500 m² undir Kongavarða við lendi aðrastaðni, har til ber at byggja 48 aðrar íbúðir á. Hetta til tess at minka um samlaða byggikostnaðin og til tess at bøta um møguleikarnar fyri lønandi rakstri.

Ítøkiliga skjýtur byggiharrin upp, at Tórshavnar kommuna samtykkir eina tilsøgn um, at makaskiftir verða 3.800 m² undir Kongavarða við umleið 6.700 m² Millum Horna, sum Tórshavnar kommuna eigur, og sum ætlanir eru um at gera nýggja útstykking á. Á hesum 6.700 m² skulu so eftir ætlan byggjast aðrar 48 leiguíbúðir, soleiðis at samlaða talið á leiguíbúðum verður 96 eins og byggiharrin upprunaliga ætlaði.

Skal slíkt makaskifti gerast, krevst loyvi frá Heilsu- og Innlendismálaráðnum. Sambært kunngerð um útboð av kommunalari fastogn skal fastogn hjá kommununi bjóðast út alment áðrenn selt verður, men við góðkenning frá myndugleikunum kann verða vikið frá kravinum um útboð í sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð.

Viðmerkjast skal, at til ber at gera makaskifti, hóast víddirnar á makaskiftu økjunum ikki eru eins stórar, men er munur á virðunum á økjunum, skal rindast fyri hendan mun. Óheft meting má tískil gerast av virðinum á teimum báðum økjunum.

Atlit skulu harumframt takast til møgulig onnur loyvi frá almennum myndugleikum, t.d. Landsverk í mun til atkomu til makaskiftu ognina v.m.

Av tí at Tórshavnar býráð hevur samtykt eitt skipanaruppskot fyri byggingina undir Kongavarða, ið loyvir 96 íbúðir í økinum, krevst nýggj samtykt til tess at góðkenna broyttu og minkaðu verkætlanina við 48 íbúðum. Hetta sambært útbjóðingartilfarinum fyri økið undir Kongavarða, ið ásetir, at býráðið skal góðkenna skipanaruppskotið fyri økið.

Politiskt skal býráðið eisini taka støðu til, um ynski er um geva byggiharra tilsøgn um at makaskifta part av ognini undir Kongavarða við lendi aðrastaðni, soleiðis sum byggiharrin hevur ynski um.

Spurningurin um makaskifti og at flyta ein part av byggiverkætlanini til annað stað víkir frá upprunaliga útboðnum av lendi undir Kongavarða. Í treytaða skeytinum viðv. sølu av lendinum undir Kongavarða er ásett, at endaligt tal av íbúðum og áseting av mest loyvdu bygging verður ásett í serstakari byggisamtykt. Úr einum fyrisitingarligum sjónarhorni verður tískil mett, at byggiharrin má tola, at verkætlanin minkar í vavi, uttan at hetta áleggur kommununi eina skyldu við makaskifti at útvega byggiharranum annað lendi at byggja á sum eitt slag av endurgjaldi fyri lendi, ið hann ikki byggir á undir Kongavarða. Spurningurin um makaskifti er tískil ein politiskur spurningur, og tað krevur, sum omanfyri nevnt, góðkenning frá Heilsu- og Innlendismálaráðnum, um eitt makaskifti skal gerast.

**Skjøl:**
18/01973-80 *Samla* (*Nýtt tilfar frá Sp/f  NN Holding)*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og leiðararnir á býarskipanardeildini og Stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna broyttu ætlanina við 48 íbúðum undir Kongavarða. Harumframt verður mælt til, at politisk støða verður tikin til áheitanina frá byggiharra um at fáa eina tilsøgn um at makaskifta umleið 3.800 m² av lendi undir Kongavarða við umleið 6.700 m² av lendi aðrastaðni at byggja 48 aðrar leigubústaðir á. Tilsøgnin er treytað av góðkenning frá øllum viðkomandi myndugleikum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at makaskifta,

treytað av góðkenning frá øllum viðkomandi myndugleikum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti tilmælinum og heldur ikki at framferðin í hesum málinum er rætt, og at kommunalt lendi/makaskifti eigur at verða selt eftir marknaðartreytum.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, taka ikki undir við málinum og vísa til støðutakanina hjá minnilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt varð um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

## 239/19 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Kirkjubøur Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 115/19 | 19/01792-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 162/19 | 19/01792-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 175/19 | 19/01792-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 239/19 | 19/01792-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur samtykt at selja part av matr. nr. 255a undir Kongavarða, Argir til privat felag, ið skal byggja leiguíbúðir á økinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið, sum er samtykt at selja til leiguíbúðir, liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sambært ásetingunum fyri A3 øki kann, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið, byggjast íbúðir.

Sambært skipanaruppskotinum, er talan um 94 íbúðir í ymsum støddum við tilhoyrandi felags parkeringsøki og fríøki. Bygt verður í trimum og fýra hæddum, og ein skurður í serstøku byggisamtyktini ásetur mest loyvdu hæddina fyri bygginigini, sí skjal *Serstøk byggisamtykt undir kongavarða,* fylgiskjal 3. Hendan hæddin er ásett fyri at tryggja, at sethúsaútstykkingin við Klingurstjørn varðveitir útsýnið. Annars eru aðrar ásetingar um bygging, so sum byggi- og nýtslustig, frástøða frá marki og nøgd av parkeringsplássi, sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:

§7, stk. 1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

Stk. 2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Stk. 4. Byggistig 0,3.

Stk. 5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 $m^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt náttúrliga avmarkað øki.

Stk. 6. Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Stk. 7. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5.

Stk. 8. Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.

Stk. 9. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/01973 – Íbúðarbygging undir Kongavarða.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt undir Kongavarða* – journal nr. 19/01792-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt undir Kongavarða sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt undir Kongavarða,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**

Í sambandi við at uppskotið til nýggja serstaka byggisamtykt hevur ligið til almenna hoyring, hevur kommunan móttikið 31 mótmæli, samandráttur av hesum er í skjali *Samandráttur av mótmælum*.

Nógv ymisk viðurskifti verða umrødd í mótmælunum, bæði viðurskifti, sum eru beinleiðis tengd at serstøku byggisamtyktini, men eisini fleiri, ið hava við onnur viðurskifti at gera, so sum søluna av lendinum, endurgjaldskrøv, manglandi heimild o.a.

Tó eru fleiri afturvendandi viðurskifti nevnd í mótmælunum móti serstøku byggisamtyktini, so sum:

- Belastningurin í økinum verður ov stórur, um 94 bústaðareindir koma afturat.
- Ferðslutrygdin verður ikki nóg góð.
- Byggingin hóskar ikki inn í dámin í økinum.

M.a. grundað á mótmælini, innanhýsis samskifti og samskifti við byggiharra, er vavið av verkætlanini minkað, sí mál *Íbúðarbygging undir Kongavarða (matr. nr. 255a),* journal nr. 18/01973, og við uppskotinum sum fyriliggur, krevst ikki ein serstøk byggisamtykt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at uppskotið til serstaka byggisamtykt verður tikið aftur og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

# 240/19 Leigusáttmálar. Neystini undir Bakka. Umsókn frá leiðarum um ættarliðskifti.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.03.2014 | 64/14 | 14/02038-19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 263/19 | 14/02038-19 |
| 3 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 240/19 | 14/02038-19 |

**Málslýsing:**

**Talan er um til samans 8 neyst.**

Kommunan eigur grundøkini við ástandandi neystum, sum verða leigaði út til niðanfyri nevndu leigarar.

**<u>5 sambygd neyst undir húsunum hjá Jóhan MacDonald. ( Mynd 2010-2041/4 )</u>**

*Leigararnir eru:*

2010-1914 Jens Dam (akkurát deyður)

2010-1904 Petra Arge (brúkari Ólavur Arge)

2010-1913 Jóannes Skaale ( hevur yvirtikið sáttmálan eftir Sigfried Skaale )

2010-1905 SSB skótarnir, hava ongantíð havt sáttmála

2010-0571 Hans og Tummas Sørensen, sum hava sáttmála galdandi til 30. nov. 2014 (Hans er deyður, Tummas er sonur Hans)

2010-2408 Hans Jákup Michelsen. Hans Jákup Michelsen keypti í 1993, neystið frá Jens av Reyni. Upplýst verður, at Axel Mortensen bygdi neystið síst í 60árunum.

**<u>Neyst bygt uppímóti húsagrundini hjá Jóhan MacDonald. ( Mynd 2010-2041/4 )</u>**

2010-2408 Hans Jákup Michelsen. Sambært skjali, keypti Hans Jákup Michelsen í 1993, neystið frá Jens av Reyni.
Axel Mortensen bygdi neystið síst í 60árunum. Síðani hevur neystið havt ymiskar eigarar. ri Klæmint Ludvíg, Jens av Reyni og nú Hans J. Michelsen. Vit finna ongan sáttmála í málinum.

**Harumframt er talan um tvey leys rimaneyst longur inni móti Vágsbotni. ( Mynd 2010-2041/5)**

2009-2939 Annað neystið verður leigað út til Inga Mohr sála. Sonur Inga, Gunnar Mohr, søkir nú um at yvirtaka sáttmálan

Hitt neystið er í tveimum leigumálum:

2010-1895 Helena Poulsen (fyrrv. Símun Poulsen, deyður)

2010-1896 Jørleif Kúrberg (fyrrv. Bjarni Djurhuus flutti til DK í 1997)

Brúkarar av neystinum hjá Bjarna Djurhuus eru: Bátafelagið, Jørleif Kúrberg, og Ríkisumboðið.

Neystið er ikki skilt at, og er bert tann eina inngongdin.

**Lýsing av málinum:**
Miðfyrisitingin hevur umrøtt málini viðvíkjandi neystunum.

- Sáttmálarnir eru ikki tíðarhóskandi.
- Mannagongdir vænta. ( reglur um ættarliðskifti )
- Eingin bíðilisti er til neystini.
- Kommunan hevur viðlíkahaldsskyldu av neystunum.
- Einki krav er til nýtslu av neystunum.

Eingin bíðilisti er til neystini og eru heldur ongar niðurskrivaðar mannagongdir viðvíkjandi umsitingini av leigumálunum.

Vanligi borgarin hevur lítlan og ongan møguleika til at fáa atgongd til neystini, sum hava gingið í arv í fleiri ættarlið. Ættarliðskifti hevur verið fyrilagt fíggjarnevndini so hvørt.

Neystaleigan hevur higartil verið kr. 60,00 pr. ár. Fyri hesa upphædd fær leigarin eitt grundøki við ástandandi neysti til leigu, samstundis sum kommunan hevur viðlíkahaldskylduna av neystunum.

Neystini liggja í einum serstøkum umhvørvi, og eru neystini so mikið smá, at tey bert kunnu brúkast til smærri og lættari bátar. Tey innaru neystini kunnu illa brúkast til bát, tí umstøðurnar kring neystini ikki eru til tað. Høgur bryggjukantur + koyrivegur.

Løgdeildin hevur hugt eftir neystunum.

Neystini undir húsunum hjá Jóhan Macdonald sýnast at vera í nýtslu og eru væl hildin. Bátur stendur inni í 4 av neystunum. Eitt stendur tómt. Eitt av neystunum er blendað og sæst ikki inn.

Neystið hjá Hans J. Michelsen, er í vánaligum standi, og treingir til ábøtur. Hans J. greiðir frá, at hann hevur umvælt framsíðuna av neystinum, og hevur hann nú ætlanir um at umvæla takið og síðuna. Hann greiðir frá, at Kiwanis er brúkari av neystinum, og hevur hann ætlanir um at lata Kiwanis neystið til nýtslu, men ynskir hann í fyrsta umfari at gera ábøturnar á neystið og at undirskriva nýggjan leigusáttmála við kommununa.

Í tí eina neystinum longur inni, er rættuliga órudduligt, og sýnist neystið ikki væl hildið. Tvær kajakkir liggja inni hesum neystinum.

Hitt neystið er væl hildið, og hevur Bátafelagið tilfar liggjandi inni, sum verður brúkt til bryggjudansin. Harumframt goymir Ríkisumboðið ymiskt sum hoyrir til bátin Torshavn, inni í sama neysti. Ein gamal bátur hongur undir loftinum.

Verandi leigarar sum eru í neystinum, hava trupult við at semjast um neystið.

Helena Poulsen, sum leigar helvtina av neystinum, hevur okkum kunnugt ikki brúkt neystið, men eru døturnar  nú áhugaðar í neystinum.

Ósemjan snýr seg millum annað um eitt lás og um atgongdina til neystið. Um hvør skal hava lykil til neystið, og um at Bátafelagið hevur lagt ymiskt tilfarð inn á helmingin hjá Helenu Poulsen.
Tað skal viðmerkjast at kommunan ikki hevur tosað við Helenu um málið. Samskiftið hevur verið við einu dóttur hennara sum er búsitandi í Danmark.
Kommunan ynskir ikki at vera partur av málinum, og mugu brúkararnir finna eina loysn sínámillum.

Umsitingin  hevur umhugsað 3. møguleikar til framhaldandi nýtslu av neystunum.

Verandi sáttmálar verða uppsagdir, og fáa verandi leigarar bjóðaðan nýggjan sáttmála. Sí hjálagda sáttmála sum er journaliseraður undir mál 2010-2041/3 Samstundis verður sum higartil møguligt at søkja um ættarliðskifti.

Verandi sáttmálar verða uppsagdir, og verða neystini framyvir bjóðaði kappróðrar/- og øðrum áhugafelagskapum til leigu. Skúlar/frítíðarskúlar og líknandi, kundu tá  eisini fingið møguleikan at brúkt neystini í samstarvi við omanfyri nevndu feløg. Um so var kundu kannska fleiri hundrað brúkarar verið knýttir at neystunum, og kundu neystini tá í nógv størri mun enn nú verið nógv fleiri borgarum at gagni.

Verandi sáttmálar verða uppsagdir, og verða neystini lýst til sølu til hægstbjóðandi. Undirlendið undir neystunum verður leigað keyparunum. 30 ára langtíðarsáttmálar.

Umsitingin hevur eisini gjørt uppskot til nýggjan leigusáttmála.

Ætlanin er at leigan verður hækkað,  men verður leigan ymisk alt eftir um talan er um privatleigumál, ella um talan er um leigu til ítróttar/áhugafeløg.

Harumframt er eisini talan um í tí eina førinum, um at leiga undirlendið til neystið tí neystið er privatogn.

Sáttmálarnir verða yvir 3 ár, og kunnu tá endurnýggjast eftir umbøn.

Fyri tey neyst sum eru ogn, og har ið kommunan eigur undirlendið, verður leigumálið yvir 10 ár, og kann endurnýggjast, um báðir partar ynskja tað.

Sambært grein 3. í sáttmálanum, kemur leigarin eisini at hava innan- og uttanveggja viðlíkahald av neystinum, herundir at síggja til, at neystið við jøvnum millumbilum, verður málað við svartari máling. Her verður hugsað um rimaneystini undir Bakka og neystið hjá Hans Jákup Michelsen

Neystini ( húsagrundin ) sum er undir húsunum hjá Jóhan Mc.Donald, skulu málast hvít og neystahurðarnar svartar.

Sambært grein 4. í sáttmálanum skal neystið einans verða brúkt til bát, í javnan verður brúktur, og neyðug  amboð í hesum sambandi. Tá ið talan er um almannagagnligt virksemi, kann kommunan í ávísum førum gera undantak frá hesi áseting, men er tað tá ein treyt, at virksemið er tengt at sjónum.

**Tilmæli:**
Leiðarin av løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, mæla til at kommunan:

- Uppsigur verandi leigusáttmálar.

- Bjóðar verandi leigarum nýggjan sáttmála sum er skrásettur undir mál 2010-2041/3 og Hans J. Michelsen sáttmála sum er skrásettur undir mál 2010-2408/2

- Bjóðar tey neystini út til róðrarfeløg, ítróttarfeløg og møgulig áhugafeløg, har møguligir verandi leigarar ikki ynskja at skriva undir nýggjan sáttmála.

- Prísásetur leiguna til kr. 500,00 pr. ár. um neystini verða leigað út til ítróttarfelag/áhugafelag og til kr. 5.000,00 pr. ár. um talan er um privatleigumál.

- Prísásetur leiguna til ávikavist kr. 500,00 og kr. 2.000,00 pr. ár. fyri teir sáttmálar sum umfata undirlendið undir neystunum, tí neystini eru privatogn.

**Fíggjarnevndin 17. november 2010:** Samtykt at siga upp allar leigusáttmálar við stytst møguligari freist og gera nýggjan leigusáttmála við teir leigarar, sum vilja ganga undir hesar treytir: Leigarin hevur viðlíkahaldsskyldu innan og uttan, leigan verður hækkað til 2.500 kr. um árið, og leigumálið skal brúkast til endamálið, ið er at goyma bát og reiðskap og virksemið, ið er knýtt at sjónum.

Tey leigumál, ið ikki verða endurnýggjað, verða eftir umsókn latin áhugafelagsskapum, kappróðrarfeløgum, skúlum, frítíðarskúlum og øðrum almannagagnligum endamálnum, og verða hesi at ganga undir somu viðlíkahalds- og aðrar treytir sum ásett omanfyri, tó so at leigan hjá hesum verður ásett til 1.000 kr. um árið.

**Ìskoytið:**
Neystini úti í Bakka eru partur av eini størri heild, frá Vágsbotni út í Skinnaraskjer/Rasmusarbrúgv. Tað er eitt økið, sum um summari er væl vitja av fólki. Her er útilív og sera hugnaligt at ganga. Tað eru tí ynskir um at skapa eina størri heild á økinum við útatvendum virksemi.

Tórshavnar havn arbeiðir eisini við ætlanum um at fríðka um økið og leggja fleiri bátabrúgvar út. Hetta arbeiðið er komið væl áleiðis.

Kommunan hevur eisini í fleiri ár arbeitt við at skapa lív í Vágsbotnið við útivirksemið av ymiskum slag.

Í Tórshavnar Býaratlas'ið verður skrivað: "*Goymsluhúsini undir Bryggjubakka standa við sínum takskjøldrum sum ein virðismikil framsíða móti havnarlagnum. Bryggjan verður í dag mest brúkt til parkeringar, men har verður eisini fiskur seldur, og ein kaffistovan borðreiðir úti, tá ið veðrið er til vildar. Kanska er hetta ein varislig byrjan til eina "havnapromenadu" við lívd og sól, sum kundi ført til fleiri uttanduratiltøk framman fyri teimum niðastu húsahæddunum, umframt færri parkeringar og nýggja útgerð av ymiskum slag á bryggjuni"(s. 23).*

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin fyri løgdeildina mæla tí fíggjarnevndini til at heita á Byggi- og býarskipanarnevndina um at gera eina heildarætlan fyri økið frá Vágsbotni til

Skinnaskjer/Rasmusarbrúgv við tí endamálið at skapa eina “havnapromenadu” við útivirksemið av ymiskum slag.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars. 2011:** Nevndin samtykti at umsitingin í samráð við Tórshavnar Havn ger eina ætlan fyri økið.

Bogi Andreasen hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Vísandi til samtyktina í fíggjarnevndini 16. februar 2011 verður rykt eftir uppskotinum til eina heildarætlan fyri økið frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv at taka støðu til sum skjótast.

**Ìskoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til heildarætlan fyri økið við Vágsbotn og undir Bryggjubakka.

Heildarætlanin inniheldur broytingar av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og Reyn og eitt uppskot til skipan av økinum frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla fíggjarnevndini til at taka undir við heildarætlanini og senda málið til býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

Bogi Andreasen hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Býararkitekturin greiddi frá uppskotinum til heildarætlan. Samtykt at taka undir við uppskotinum til heildarætlan og beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina við áheitan um at broyta serstøku byggisamtyktina samsvarandi uppskotinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2012:** Nevndin samtykti at málið um broytingar í serstøku byggisamtyktini skal verða eitt mál fyri seg, sum verður lagt fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Býráðið 31. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini hin 31. mai 2012, verður málið um broytingar í serstøku byggisamtyktini viðgjørt sum eitt mál fyri seg. Sí j. nr. 2012-1374.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
2 eigarar hava søkt um ættarliðsskifti.

Ein trupuleiki við at loyva ættarliðsskifti er at kommunan missir ræðisrættin til neystini langa tíð framyvir, men vísandi til at sáttmálarnir einans hava gildið í 3 ár frá

undirskrivingardegnum, verður mett at váðin hjá kommununi verður óbroyttur, hóast nýggjur leiðari kemur inn.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at bíða við at viðgera, um møguleiki skal vera at ættarliðsskifta, til samtyktin í fíggjarnevndini 16/2-2011: "heildarætlanin fyri økið frá Vágsbotni til Skinnasker/Rasmusarbrúgv við tí endamáli at skapa eina "havnapromenadu" við útivirksemið av ymiskum slag" er avgreidd.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Innlendismálaráðið góðkendi 11. november 2011 eftir áheitan frá Tórshavnar býráð broytingar í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og Reyn. Broytingarnar merkja, at niðasta hædd í bygningunum undir Bryggjubakka skal nýtast til útvent virksemi, og at nýggjur umráðispartur, F-neystaøki, ið fevnir um økið, har neystini úti á Bakka eru staðsett, skal nýtast til frítíðar- og ítróttarvirksemi, ið hava við sjógvin at gera.

Samstundis verður víst til heildarætlanina fyri økið frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv, ið varð samtykt í býráðnum tann 28. juni 2012 saman við broytingunum í byggisamtyktini fyri Tinganes og Reyn.

Endamálið við at broyta byggisamtyktina og við heildarætlanini fyri økið var at menna ferðafólka- og býarlívið. Tí varð samtykt at leggja økið úti á Bakka sum eitt neystaøki við ásetingum um nýtslu av neystunum til frítíðar- og ítróttarvirksemi, sum hevur við sjógvin at gera, t.d. kappróður og kajakk, og til onnur ting sum kunnu menna ferðafólka- og býarlívið her, t.d. felagsskapir av ymiskum slag.

Við atliti til at fremja endamálið við broyttu byggisamtyktini og heildarætlanini fyri økið, hevur umsitingin havt fundir og samskift við teir privatpersónar, sum hava leigusáttmála við Tórshavnar kommunu um neyst undir Bakka, sí fundarfrágreiðingar í málinum.

Upplýst er fyri leigarunum, at byggisamtyktin fyri økið er broytt, og at ein heildarætlan fyri økið leggur upp til, at neystini skulu nýtast til frítíðar- og ítróttarvirksemi hjá áhugafeløgum.

Talan er um fimm leigarar, sum allir hava havt leigumál við Tórshavnar kommunu í nógv ár. Allir fimm leigarar hava ynski um at sleppa at halda fram við leigumálunum, og teir vísa m.a. á, at neystini verða javnan brúkt til virksemið, sum hevur við sjógvin at gera, eitt nú eru bátar í fleiri av neystunum, sum verða brúktir til útróður og til veiðu av fugli umframt frítíðarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera.

Tórshavnar kommuna hevur leigusáttmálar við Kajakkfelagið og Tórshavnar Froskmannafelag um tvey av neystunum. Annað av teimum er neyst, ið privatur leigari og Kajakkfelagið hava verið felags um, men trupult hevur verið at samantvinna áhugamálini hjá hesum báðum pørtum. Ætlanin er tí at siga leigumálið við privata leigaran upp og geva teimum báðum áhugafeløgunum fullan ræðisrætt á neystunum.

Hini fýra neystini, ið privat leiga, er ætlanin at nýta til at røkka endamálinum við broyttu byggisamtyktini, ið er at nýta økið til frítíðar- og ítróttarvirksemi, sum hevur við sjógvin at gera

og annað, sum kann menna ferðafólka og býarlívð í býunum. Í skrivi, sum er viðfest málinum, er nærri frágreiðing um ætlanirnar hjá viðkomandi feløgum.

Skulu teir fimm privatu leigararnir av neystum undir Bakka sigast upp, verður mett at ein hóskandi uppsagnarfreist er seks mánaðir, so leigararnir fáa rímiligt skotbrá at rudda neystini og avgreiða tað virksemið, ið er í neystunum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at uppsiga tey fimm leigumálini við privatu leigararnar av neystum undir Bakka til at fara úr gildi um seks mánaðir.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson krevja avgerðina fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson biðja um at fáa avgerðina frá fíggjarnevndini fyri býráðið.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Tikið av skrá.

## 241/19 Útstykking til sethús í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.06.2019 | 128/19 | 19/02482-1 |
| 2 Kaldbaksnevndin | 24.06.2019 | 4/19 | 19/02482-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 213/19 | 19/02482-1 |
| 4 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 184/19 | 19/02482-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 221/19 | 19/02482-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 196/19 | 19/02482-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 266/19 | 19/02482-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 241/19 | 19/02482-1 |

**Upprunin til málið:**
Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 4. september 2018 varð samtykt, at umsitingin skuldi arbeiða víðari við at kanna møguleikarnir fyri útstykking í Kaldbak, sí mál *Sethúsaútstykking í Kaldbak. Kanna møguleikar fyri at stykkja út til sethúsagrundstykkir í Kaldbak.*

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tekniska umsitingin hevur gjørt eina yvirskipaða kostnaðarmeting av, hvør kostnaðurin er fyri at gera útstykkingina, og verður tað mett, at samlaði kostnaðurin verður umleið 2,5 mió. Tá er vegur, leiðingar, keyp av lendi, ráðgeving og umsiting við í metingini.

Fyri at halda útreiðslunum niðri, soleiðis at grundstykkjaprísurin ikki verður alt ov høgur, verður mælt til, at grundøkini verða seld óplaneraði.

Ítøkiligi kostnaðurin fyri útstykkingina og harvið ítøkiligi kostnaðurin av grundstykkjunum verður at lýsa nærri, tá verkætlanin er boðin út og tilboð frá arbeiðstakarum fyriliggja.

Váttan frá Búnaðarstovuni um keyp av lendi fyriliggur, sí skjal *Váttan um keyp av lendi.*

Byggisamtyktarliga liggur økið, sum ætlanin er at útstykkja á, í A-øki í byggisamtyktini fyri Kaldbak. Sambært ásetingunum fyri A-øki í Kaldbak, skulu grundøki vera í minsta lagi 500 $m^2$ til støddar, meðan býráðið kann loyva grundøkjum, sum eru niður til 300 $m^2$ til støddar inni í bygdini. Grundstykkini, sum eru teknað í útstykkingarætlanini, eru uml. 400 $m^2$ til støddar.

Um samtykt verður, at verkætlanin skal setast í verk, so verður verkætlanin flutt á Verkætlanardeildina at útinna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Sethúsaútstykking í Kaldbak. Kanna møguleikar fyri at stykkja út til sethúsagrundstykkir í Kaldbak,* journal nr. 18/000161

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Útstykking 22.05,* journal nr. 19/02482-2.
*Kortskjal. Byggisamtykt í Kaldbak,* journal nr. 19/02482-2.
*Váttan um keyp av lendi,* journal nr. 19/02482-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at seta verkætlanina í gongd,
- at játta 300.000 kr. av konto 6475, Byggibúning bústaðir, L00001 Løgukarmur fyri árið, til kommunala umsiting og møguliga ráðgeving, til gerð av nøktandi arbeiðstekningum og at bjóða arbeiðið út til arbeiðstakara at útinna.
- at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2019:** Nevndin mælir býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at bjóða økið til almenna sølu til sethúsabygging sambært ætlanini og við treytum sum umsetingin setir.

**Kaldbaksnevndin 24. juni 2019:** Staðbundna nevndin tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini 18. juni 2019.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Búnaðarstovan hevur givið kommununi tilsøgn um at kunna keypa lendið til útstykkingina. Talan er um uml. 3.200m2 og er mettur kostnaður til samans kr. 400.000,00

Festarin er ikki ímóti ætlanini, men ynskir at fáa avtalu í lag við kommununa sum umfatar, at avgrevsturin frá útstykking verður fluttur yvir á lendið við grótbrotið, har moldin kann breiðast út. Kommunan eigur lendið niðanfyri grótbrotið, men hevur brúkar festarin lendið til seyðahald. Fyri útstykkjaran verður talan um ein fyrimun. Styttri teinur og tí bíligari koyring.

Festarin leggur eisini upp at hann fær eitt endurgjald fyri mist dyrkingarlendi, sum hann kann brúka til at velta annað lendið.

Ítøkiliga vísir festarin til matr.nr. 104, Kaldbak. Talan er um eina trø, sum hoyrir til festið.

Búnaðarstovan hevur gjørt eina veltiætlan fyri økið. Mettur kostnaður uml. kr. 105.000

Samlaður kostnaður fyri keyp og endurgjald verður tá uml. kr. 505.000,00

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa lendið fyri kr. 400.000,00 og at samsýna festara við eini upphædd áljóðandi kr. 105.000,00 sum skal brúkast til velting av matr.nr. 109, sí uppskot til veltisætlan frá Búnaðarstovuni. Upphæddin skal játtast av konto 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Marin Katrina Frýdal fór av fundinum og Jógvan Arge tók sæti fyri hana.

Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Kommunan lýsir nú økið alment til sølu, við treytum, sí uppskot til lýsing og alment úboð. Ásettur minstiprísur verður kr. 510.000,-

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at lýsa økið til sølu, við teimum treytum sum kommunan setur. Sí lýsing og útbjóðingartilfar, skjal. 19/02482-12.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá Marin Katrinu Frýdal um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og ein blonk**.**

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 242/19 Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum biogassanleggi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 73/18 | 18/00908-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 94/18 | 18/00908-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 110/18 | 18/00908-5 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 93/18 | 18/00908-5 |
| 5 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 194/18 | 18/00908-5 |
| 6 Fíggjarnevndin | 24.10.2018 | 302/18 | 18/00908-5 |
| 7 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 243/18 | 18/00908-5 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 334/18 | 18/00908-5 |
| 9 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 260/18 | 18/00908-5 |
| 10 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 344/18 | 18/00908-5 |
| 11 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 300/18 | 18/00908-5 |
| 12 Fíggjarnevndin | 15.01.2019 | 1/19 | 18/00908-5 |
| 13 Býráðsfundur | 16.01.2019 | 2/19 | 18/00908-5 |
| 14 Tekniska nevnd | 08.10.2019 | 60/19 | 18/00908-5 |
| 15 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 268/19 | 18/00908-5 |
| 16 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 242/19 | 18/00908-5 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Við skrivi 22.03.2017 søkir Christian Andreasen, advokatur, vegna P/f Salmon Protein um, at felagið fær til keyps umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr.nr. 139b, Hoyvík.

Ætlanin er at nýta stykkið til bygging av einum biogass anleggi, sum skal taka ímóti úrdráttum frá alivinnuni, sambært teimum reglum, sum eru galdandi fyri alivinnuna viðvíkjandi burturbeining av lívrunnum tilfari, og tøðum frá føroyskum bóndum.

Burtur úr tilfarinum, sum verður viðgjørt/avgassað, verður útvunnin hiti, sum skal latast til Fjarhitafelagið, umframt at veita streym til SEV.

Samstundis er ætlanin, at bøndur skulu fáa latna tilfarið aftur sum avgassað tøð. Hetta gevur bóndum møguleika fyri at taða oftari, og uttan at taðingin hevur við sær keðilig umhvørvisárin, sum annars er galdandi fyri taðing við vanligum tøðum.

Við at byggja nevnda biogassanlegg fáa alarar tann fyrimun, at teir sleppa av við lívrunnið burturkast, samstundis sum bøndur sleppa av við sítt avfall.

Bygging av einum slíkum anleggi er fult í tráð við ætlanina hjá landi og kommunum at útvinna mest møguligt av grønari orku, samstundis sum hetta tiltak vil verða til stóran frama fyri umhvørvið sum heild.

Umsøkjarin ynskir at fáa grundøkið til keyps fyri ein keypspening sum svarar til kostprísin.

Um neyðugt er at broyta byggisamtyktina, fyri at byggja nevnda anlegg á økinum, verður samstundis biðið um, at byggisamtyktin fyri økið verður broytt.

**Lógir, ásetingar o.a.:**

Matr. nr. 139b á Skarðshjalla liggur í umráðispartinum B8 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar sambært kap. 4, §15 eru:

- Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirkir, her undir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.
- Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4 til 6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Umhvørvisflokkur 6: Umfatar virkir, ið hava størri ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi. Kunnu staðsetast í størri ídnaðarøki, har fráleiki til grannar kann haldast. Eisini kann staðsetingin verða í vinnuøkjum, har bert virkir við serligum fráleikatørvi liggja. Virkir í hesum flokkinum eru størri maskin- og betongvirkir, sláturvirkir og asfaltvirkir. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 300 metrar.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 139b, sum umsøkjarin biður um at fáa til keyps, er innasta økið á Skarðshjalla.
Biðið verður um at fáa 20.000 m² og er tað alt økið sum er eftir innanfyri tað síðstu útstykkingina á Skarðshjalla.

Skal kommunan selja økið til P/f Salmon Protein, so krevur tað loyvi frá Landsstýrinum, tí talan er um eitt øki sum er størri enn 300 m², sum verður selt uttan útboð.

Í staðin fyri at selja, so kann kommunan geva felagnum optión uppá økið í eitt tíðarskeið. Soleiðis tryggjar kommunan sær, at um biogass anleggið ikki verður bygt, so kemur kommunan framhaldandi at ráða yvir økinum, sum kann latast til bygging av nýggjari brennistøð ella annað.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Eitt øki skal eisini finnast til at byggja eina nýggja framtíðar brennistøð, møguliga fyri alla Føroyar, sum eisini kann lata hita til Fjarhitafelagið og møguliga streym til SEV.

Um økið á Skarðshjalla verður latið til biogass anlegg, so skal eitt annað øki finnast til nýggja brennistøð, tað kundi verið á Ovara Hjalla.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:**
Av tí at onki projekt fyriliggur, so ber ikki til at siga um ætlanin krevur frávik/lættar frá ásetingunum.

Umsóknin er helst í tráð við ásetingarnar fyri økið, men tað skal kannast nærri, tá fleiri upplýsingar fyriliggja.

Skal biogass anlegg byggjast á staðnum, so er talan um eitt kap. 5 virki, sum krevur umhvørvisgóðkenning.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 6

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Tórshavnar kommuna eigur lendið sum søkt verður um.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**

**Tekniska deild:**
Býarverkfrøðingurin hevur verið við til at lýsa málið.

**Býarskipanardeildin:**
Í sambandi við ídnaðarvirksemið á Skarðshjalla, so er skilagott at staðseta eitt nýtt biogass anlegg innast á økinum, hetta eisini í sambandi við eina møguliga útbygging/flyting av brennistøðini, ið somuleiðis er eyðsædd at verða staðsett tætt við biogass anleggið. Eftir ætlan verður ídnaðarøkið á Hjalla víðkað omanfyri verandi virksemið, ið leggur upp til fleiri grundøki og møguleikar til vinnu og ídnað.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Tá myndugleikaprojekt fyriliggur, skal málið sendast til:
- Umhvørvisstovuna í sambandi við umhvørvisgóðkenning
- Arbeiðs- og brunaeftirlitið

**Skjøl:**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:
- Umsókn frá Christian Andreasen, j.nr. 18/00908-2

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til:
<u>at</u> kommunan gevur P/f Salmon Protein optión í 2 ár uppá at keypa umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr.nr. 139b, Hoyvík, til staðseting av nýggjum biogass verki.
<u>at</u> optiónin verður treytað av, at áðrenn endaligt keyp ferð fram, skal tilsøgn um byggiloyvi fyriliggja, umframt avtala um veiting av framleiddari orku, m.a. til fjarhitafelagið.
<u>at</u> beina málið í fíggjarnevndina, til at áseta aðrar treytir, m.a. um kostnað og tíðarætlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og geva P/F Salmon Protein optión í 2 ár uppá at keypa umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík við omanfyristandandi treytum og til kostnað, ið verður at áseta við støði í kostnaðinum av teirri byggibúning, sum er gjørd á lendinum. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti.** Kommunan søkti Heilsu- og innlendismálaráðið um frávik frá kravinum um alment útboð.

Í svarskrivi frá Heilsu- og Innlendismálaráðnum, eru millum aðrar, hesar viðmerkingar og grundgevingar.

Høvuðsreglan viðvíkjandi sølu av kommunalari fastogn er, at føst ogn hjá kommununi ikki má seljast, uttan so, at ognin hevur verið boðin út alment, sbrt. § 44, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 2000 um kommunustýri, hereftir kommunustýrislógin.

Eitt endamál við kravinum um alment útboð av kommunalari fastogn er at tryggja, at almenningurin hevur kunnleika um at kommunalar fastognir eru til sølu, og at øll hava líka stóran rætt til at bjóða upp á ognina. Við at bjóða ognina út alment tryggjar kommunan seg harafturat ímóti atfinningum um, at einstaklingar ella einstakt virskemi fær ein ósakligan framíhjárætt til ognina.

Í kunngerð nr. 122 frá 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, hereftir kunngerð um alment úboð, eru undantøk til høvuðsregluna. Sambært § 2, stk. 2 í kunngerðini kann verða vikið frá kravinum um alment útboð, tá tað eru serlig viðurskifti, ið tala fyri at fastognin kann verða seld uttan alment útboð. Eftir umstøðunum kann søla til ídnaðarendamál verða undantikin útboði, tá kommunan hevur fingið tilboð um keyp av ávísari ogn, sum orsakað av plasering, nýtslumøguleikum ella øðrum viðurskiftum, sum hevur avgerandi týdning fyri viðkomandi tilboðsgevara. Undantakið í § 2, stk 2 er tó einans ætlað at vera nýtt í serligum føri, har tað má metast, at kravið um alment útboð vil forða søluni óneyðugt og at alment útboð ikki hevur við sær tilboð um hægri keypsprís.

Soleiðis sum málið er lýst, metir Heilsu- og innlendismálaráðið ikki, at alment útboð vil forða søluni óneyðugt.

Vísandi til grundgevingarnar omanfyri, er Heilsu- og innlendismálaráðið komið fram til, at vikið verður ikki frá kravinum um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í Stjórnarskrivstovuni, mæla fíggjarnevndini til, at umrøða málið, herundir, um kommunan skal lýsa umtalaða økið leyst til hægstbjóðandi, og til ein minstaprís, ið verður at áseta við støði í kostnaðinum av teirri byggibúning, sum er gjørd á lendinum.

Í sølulýsingini skal takast tað fyrivarni, at kommunan tilskilar sær ræt ttil at havna øllum boðum.

Víst verður til § 6, í kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn sum ásetur at Bý- ella bygdaráðið kann havna øllum innkomnum tilboðum.
Víst verður eisini til § 6. stk. 2. sum ásetur, at tað í føri, har ogn er boðin út til frammanundan ásettan prís, verður boðin hægri prísur, skulu tey, ið hava boðið ásetta prísin, hava møguleika til at koma við nýggjum boði.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting at lýsa uml. 12.000 fermetrar av nevnda øki til sølu til hægst bjóðandi og áseta minstaprísin til kr. 675,- pr. fermetur og beina malið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og ongari blankari.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini.

**Ískoyti**

Kommunan bjóðaði grundstykkið út í fríðari sølu við hálvsíðulýsing í bløðunum. Sí skjal nr. 18/00908-20.

Lýsingin var eisini á heimasíðuni hjá kommununi.

Í lýsingini framgekk, at grundstykkið er umleið 12.000m2, og verður selt sum tað er og liggur.

At grundstykkið verður selt til hægstbjóðandi, og at ásettur er ein minstiprísur áljóðandi kr. 675 fyri fermetur.

Innan freist sum var týsdagin 13. november 2018 kl. 12:00 kom eitt boð, sí skjal nr. 18/00908-22

Tilboð um keyp av uml. 12.000m2 burtur av ognini matr.nr. 139b, Hoyvík. Keypari P/F Føroysk Náttúruorka, skrás. nr. 6797, Bakkavegur 8, 625 Glyvrar.

Boðið er 675 kr. fyri hvønn fermetur, sum svarar til ein keypspening uppá uml. 8,1 mio. kr., alt í mun til endaligu støddina.

Keypspeningurin kr. 8,1 mio. er deponeraður á klientkonto hjá Christian Andreasen, advokati.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at selja økið sum er uml. 12.000m2, fyri innkomið boð áljóðandi kr. 675 fyri hvønn fermeturin, sum svarar til ein keypspening uppá uml. 8,1 mio. Kr., alt í mun til endaligu støddina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Málið útsett.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt**.** Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at Tórshavnar kommuna hevur selt part av matr. nr. 139b á Skarðshjalla í Hoyvík til P/F Náttúruorka, sum skal byggja eitt biogassverk á økinum.

Á økinum, sum er uml. 12.000 m2 til víddar, liggur rættuliga nógv ymiskt tilfar, sum skal beinast burtur áðrenn byggibúningararbeiðið kann byrja. Talan er um grót og blandað tilfar á íalt uml. 21.000 m3. Nakað av tilfarinum kann brúkast til uppfylling, meðan annað tilfar má beinast burtur, niðan í Húsahaga.

Umsitingin hevur innheintað tvey tilboð uppá arbeiðið at flyta tilfarið:

Articon bjóðar sær at gera arbeiðið fyri íalt kr. 950.000 uttan mvg.
Tilboðið er treytað av at teir kunnu nýta tilfarið til annað endamál og at Articon sleppur at nýta øki niðanfyri til millumlagur í 4 mánaðir.

J&K Petersen bjóðar sær at gera arbeiðið fyri íalt 1.160.868 uttan mvg.

Viðmerkjast skal, at P/F Náttúruorka hevur gjørt avtalu við Articon um at gera jørðarbeiðið í sambandi við bygging av Biogass verkinum.

Tilfar sum liggur á økinum og sum onnur eiga, er ikki við í tilboðnum. Talan er um sand, sum skal brúkast til kirkjugarðin í Hoyvík, og sorterað tilfar, sum skal brúkast til gøtur. Alt hetta tilfari verður í løtuni flutt av staðnum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
j.nr. 18/04221 Umsókn um byggiloyvi

**Skjøl**
j.nr. 18/00908-29 Tilboð frá Articon
j.nr. 18/00908-28 Tilboð frá J&K Petersen
j.nr. 18/00908-31 Treytað skeytið (er sent til undirskrivingar)

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at taka av tilboðnum frá Articon á kr. 950.000 uttan mvg og at játtað kr. 1.009.375,- til arbeiðið, at fíggja av konto 6975 byggibúning ídnaðarøki L69002 Vinnuøkið á Skarshjalla 2. stig.

**Fíggjarnevndin 15. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 16. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggingina av nýggjum Biogass anleggi á matr. nr. 139b, Hoyvík, hevur keyparin gjørt vart við, at kommunan eigur at bera kostnaðin av at gera veg til stykkið og at leggja leiðingar inn á stykkið.

Byggiharrin hevur sent kommununi eitt prosjekt av vegnum og leiðingum, umframt eina kostnaðarmeting sum vísir, at parturin hjá kommununi verður kr. 600.000.
Umsitingin hevur mett um kostnaðin og tosað við ráðgevan hjá byggiharranum, sum er LBF, og tað sær út til, at kostnaðurin er á einari góðari leið.

Mett verður, at besta loysnir fyri kommununa er at gera eina avtalu við Biogass verkið, at kommunan rindar ein avtalaðan prís fyri veg og leiðingar og at byggiharrin sjálvur kemur at standa fyri arbeiðinum.

Umsitingin er í ferð við at samráðast við byggiharran um kostnað og aðrar treytir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta neyðugu upphæddina av konto 6975 Byggibúning, til at gjalda fyri veg og leiðingar til stykkið hjá Biogass verkinum.

**Tekniska nevnd 08. oktober 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Bogi Andreasen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Teknisiku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt varð um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 ímóti og ongari blankari**.**

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

## 243/19 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 19/17 | 17/03195-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 229/17 | 17/03195-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 239/17 | 17/03195-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 42/18 | 17/03195-1 |
| 5 Eldranevndin | 09.04.2018 | 1/18 | 17/03195-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 95/18 | 17/03195-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 75/18 | 17/03195-1 |
| 8 Eldranevndin | 04.06.2018 | 2/18 | 17/03195-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 171/18 | 17/03195-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 147/18 | 17/03195-1 |
| 11 Eldranevndin | 10.09.2018 | 9/18 | 17/03195-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 254/18 | 17/03195-1 |
| 13 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 211/18 | 17/03195-1 |
| 14 Eldranevndin | 05.11.2018 | 15/18 | 17/03195-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 77/18 | 17/03195-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 248/18 | 17/03195-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 332/18 | 17/03195-1 |
| 18 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 270/18 | 17/03195-1 |
| 19 Eldranevndin | 19.03.2019 | 2/19 | 17/03195-1 |
| 20 Eldranevndin | 27.03.2019 | 9/19 | 17/03195-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 28.03.2019 | 94/19 | 17/03195-1 |
| 22 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 65/19 | 17/03195-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 103/19 | 17/03195-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 117/19 | 17/03195-1 |
| 25 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 90/19 | 17/03195-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 272/19 | 17/03195-1 |
| 27 Eldranevndin | 29.10.2019 | 20/19 | 17/03195-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 288/19 | 17/03195-1 |
| 29 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 243/19 | 17/03195-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýggjan depil til umlætting og samdøgursrehabilitering. Hetta tilmælið verður niðanfyri útgreinað.

Mett verður skilabest við depli við 30 plássum, sum í høvuðsheitum kunnu býtast í 10 samdøgursrehabiliteringspláss og 20 umlættingarpláss, ið tó skal hugsast fleksibult eftir tørvinum hjá brúkarunum.

Í løtuni hevur heilsu- og umsorganartænastan 11 umlættingarpláss og 5 samdøgursrehabiliteringspláss.

Samdøgursrehabiliteringspláss eru stutttíðarpláss til eldri fólk, sum við tilboði um endurmenning í styttri tíðarskeið kunnu fara heim aftur til sín sjálvs at búgva, møguliga stuðlað við heimahjálp. Til samdøgursrehabilitering verður dentur lagdur á at endurmenna búfólkini og geva hjálp til sjálvhjálp gjøgnum venjing og annað.

Rehabiliteringstíðarskeiðið kann vera ymiskt alt eftir støðuni hjá einstaka borgaranum.

Umlættingarpláss eru eisini stutttíðarpláss til eldri fólk, sum búgva heima, men eru illa fyri. Tey koma til umlætting fyri at lætta um hjá avvarðandi, sum eru við til at taka sær av teimum í heiminum. Til ber at fáa afturvendandi umlætting, um mett verður, at tørvur er á tí. Tað er rættiliga vanligt, at fólk, sum fær tillutað fast røktarbúpláss, fyrst hevur verið til umlætting. Umlættingartíðarskeiði kann vera ymiskt alt eftir tørvi.

Umframt at vera týðandi tilboð til borgararnar, hava enn fleiri stutttíðarpláss til umlætting og rehabilitering stóran skipanarligan týdning fyri skipan av samlaðu heimatænastuni, harundir starvsfólkatørv, og til ber betri at tálma tørvin á nýggjum røktarheimsplássum. Tað ber eisini betri til at taka ímóti bráðfeingis støðum, liðugt viðgjørdum sjúklingum v.m., og somuleiðis kunnu fleiri stutttíðarpláss tryggja betur visitatión.

Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er hugsaður sum ein deild, har mestsum øll umlætting og samdøgursrehabilitering í Heilsu- og umsorganartænastuni fer fram.
Við hesi støðd fæst bæði fakligur og tænastuligur fleksibilitetur og skynsamur rakstur.

Í dag fáa umleið 40 fólk um árið gagn av tilboðnum um samdøgursrehabilitering, og vanliga standa eini 10 fólk á bíðilista. Við at økja plássini til 10 pláss, skuldi rúm verið fyri, at 80 heimabúgvandi um árið kunnu brúka samdøgursrehabiliteringstilboðið.

Viðvíkjandi umlætting, so kunnu 10 av teim 30 plássunum verða nýtt til fólk, sum hava afturvendandi tørv á umlætting t.d. 3-4 ferðir um árið. Tá vilja millum 30 og 40 fólk gagnnýta hesi 10 plássini. Higartil í ár (sept. 2017) hevur Heilsu- og umsorganartænastan fingið 224 áheitanir um umlætting. Hetta er bæði frá borgarum, sum hava fingið umlætting í ár, og frá borgarum, sum senda áheitan fyrstu ferð.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur veitt umlætting 157 ferðir í ár. Longdin á teimum 157 umlættingunum, sum hava verið higartil í ár, er ymisk. Tað vil siga, at higartil í ár eru 67 áheitanir, sum ikki eru gingnar á møti.

Restina av teimum 30 plássunum, t.e. eisini 10 pláss, kunnu brúkast til bráðfeingispláss, liðugt viðgjørdar sjúklingar, sonevnd metingarpláss og onnur, sum hava ikki so ofta tørv á umlætting, t.d. bert eina til tvær ferðir um árið.

Upplagt er, at liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum ikki kunnu fara heim av sjúkrahúsinum, koma á depilin til metingar og til uppvenjing, har tað betri ber til at meta um og staðfesta, hvørt borgarin kann fara heim ella skal hava búpláss á røktarheimi.

Hesin býtislykil millum rehabilitering, umlætting og bráðfeingis pláss er ikki endaligur, men skal júst vera fleksibul í mun til áleikandi tørv.

Við deplinum er møguligt at flyta verandi umlættingarpláss, t.e. 2 á Lágargarði og 2 á Boðanesheiminum, og tey 5 samdøgursrehabiliteringsplássini á Boðanesheiminum, til depilin. Hesi 9 stutttíðarplássini verða so løgd um til føst búpláss, ið tað eisini er tørvur á.

Umframt at fáa 9 nýggj føst bupláss, so ger hetta eisini, at allar røktardeildir í Heilsu- og umsorganartænastuni eru røktardeildir burturav. Hetta er meira skynsamt fyri deildirnar, sum í dag eisini fast hýsa umlætting og samdøgursrehabilitering, tí tað viðførir størri stabilitet og frið við sær.

Við at byggja 30 pláss verður mett møguligt eisini at endurnýggja tey sjey plássini á Umlættingarheiminum í V.U. Hammershaimbsgøtu, tvs. niðurleggja virksemið har. Fysisku karmarnir hava leingi verið ótíðarhóskandi og illa egnaðir til røktartørvandi og demenssjúk fólk, og rakstrarliga er talan um lítla og tí lutfalsliga kostnaðarmikla eind.

Við hesi loysnini verða sostatt: 7 umlættingarpláss endurnýggjað, 9 pláss umløgd til føst búpláss, tá umlættingin flytur í umlættingar- og rehabiliteringsdepilin, og 14 nýggj stutttíðarpláss fingin til vega aftrat teimum, sum eru í dag.

Við deplinum økist dekningsstigið, t.e. lutfallið av búplássum í mun til talið av fólki eldri enn 80 ár, bæði á føstum røktarbúplássum og á stutttíðarbúplássum, sí kolonnu fyri árið 2018 í talvuni niðanfyri, har ætlanin við 8 nýggjum umlættingarplássum til demenssjúk á Tjarnargarði (j.nr. 17/02942) eisini sæst í kolonnu fyri ár 2020.

Verkætlanartilgongd:
Ætlanin er, at depilin skal vera í rakstri seinnu hálvu av 2018. Farast skal tí beinanvegin undir at gera nærri tørvs- og kravlýsing umframt skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, kostnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri eldranevndina í seinasta lagi til nevndarfundin 27. november 2017.

Staðseting og lendið kann hava ávísan týdning fyri bygningsloysn, og tí eigur at verða biðið um staðseting og grundøkið beinanvegin.

Til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. verður mett neyðugt við upphædd kr. 500.000 at játta av tøkum íløgukarmi 2775 eldrarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at byggja nýggjan umlættingar- og samdøgursrehabiliteringsdepil við 30 plássum at standa klárt at taka í nýtslu í seinnu hálvu av 2018, og í hesum sambandi:

- at gera tørvs- og kravlýsing og skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, konstnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri nevndina aftur til nevndarfundin 27. november 2017,
- at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um staðseting, og
- at játta kr. 500.000 til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. av íløgukontu 2775 eldarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Eldranevndin 02. oktober 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við verkætlanina at byggja ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil hevur býarskipanardeildin arbeitt við møguligum staðsetingum til verkætlanina. Í mun til býarplanleggingina og staðseting av almennum stovnum vísir umsitingin á eitt økið við endan av Rólantsgøtu í Hoyvík, ið liggur náttúruvakurt upp at dalinum Langa, sí kortskjalið *Rólantsgøta_kort.*

Økið er partur av matrikklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri, enn hvat tørvur er á, og skal ein depil til fólk byggjast, má hóskandi øki til tess frámatrikulerast. Byggingin skal somuleiðis skipast í mun til ein byggilinju, ið skal tryggja, at byggingin leggur seg eftir bygda umhvørvinum, og at ein hóskandi frástøða til verandi gøtu og frílendi verður hildin.

Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Soleiðis er ein umlættingar- og rehabiliteringsdepil ikki í stríð við almennu byggisamtyktina. Men í sambandi við útstykkingar í A3 øki skal serstøk byggisamtykt gerast.

Byggitørvurin á deplinum er áleið 2000m$^2$. Mest loyvda byggistig í A3 øki er 0,3, og er sostatt tørvur á einum grundstykki áleið 6000-6500m$^2$ til støddar. Talan er um bygging í einari hædd við 30 kømrum við bað og duri, venjingarhøli, uppihaldsøki við serveringskøki, vaskarí, goymslur.

Ein bústaður til umlætting hóskar seg væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki. Fríøki er nærmasti granni til ætlaðu byggingina, og stuðlar tað væl undir virksemið, at fólk búgva til umlætting í eitt styttri tíðarskeið.

Sama økið var einaferð ætlað til dagstovn í Hoyvík, men er hetta ikki aktuelt longur.

**Skjøl:**
Økið við Rólantsgøtu, journal nr. 17/03195-5
Rólantsgøta_kort, journal nr. 17/03195-6

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at samtykkja nevndu staðsetingina til ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, at sundurbýta uml. 6500m$^2$

av matr.135fe og 138a, at gera nýggja serstaka byggisamtykt og at beina málið í eldranevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina omanfyri.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin mælir til at eldranevndin tekur undir við staðsetingini sum er ávíst og sum er samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini, og at beina málið víðari í fíggjarnevndina og býráðið.

**Eldranevndin 09. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykti at taka undir við Eldranevndini og senda málið til kunningar/viðmerkingar hjá eigarafelagnum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigursson um at beina málið aftur í nevnd.

Einmælt samtykt at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Tørvslýsing

Til tess at gera tørvslýsingina, ið er grundarlag fyri ítøkiligari byggiskrá, so kvalifiseraða sum gjørligt, er valt at taka brúkaraumboð við servitan innan allar funktiónir við í arbeiðið. Hesi eru ein ergoterapetur, ein fysioterapeutur, ein køksleiðari og deildarleiðarin fyri verandi rehabilitering/umlætting. Harafturat hevur ein eindarleiðari verið við til tess at tryggja skynsemi í rakstri, tá bygningurin er liðugur og tikin í nýtslu.

Í stuttum verður mælt til 28 pláss býtt í tvær lonir. Við støði í hesum er gjørd meting um starsvfólkanormering og rúmskrá, umframt onnur yvirskipað viðurskifti. Talan verður eftir hesum um bygning uml. 1.800 fermetrar.

Sí tørvslýsing í hjalagda skjalið.

Í ætlan liggur at byggja depilin við Rólantsgøtu í Hoyvík. Hoyring hevur verið hjá eigarafelagnum, og er ynskið borið fram um, at bygningurin skal vera í einari hædd og hava flagtekju.

Brúkaraumboð hava serliga lagt dent á at køkur eigur at verða partur av umlættingar og rehabiliteringsdeplinum. Tí umframt tað heimliga og hugnaliga við at matur verður gjørdur á staðnum, so er kostur ein sera týðandi partur av rehabiliteringini og skal tillagast til einstaka borgarar.
Lágargarður er við at vera á markinum fyri hvussu nógvar døgurðar afturat køkurin megnar at gera afturat tí sum verður gjørt í dag.

Bygginevndin hevur góðkent tørvlýsingina, og klárt er tí at fara undir at gera byggiskrá, tíðarætlan og kostnaðarætlan.

Mett verður skilagott, at eldranevndin eisini umrøður tørvslýsinga til tess at tryggja felags fatan um verkætlanina.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla eldranevndini til, at taka undir við tørvslýsingini sum grundarlag fyri víðari arbeiðinum at gera byggiskrá v.m.

**Eldranevndin 04. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Eigarafelagið hevur í hoyringssvari gjørt vart við, at um kommununa velur at brúka økið í Rólantsgøtu til annað enn barnagarð, hevur eigarafelagi rætt til endurgjald.

Umsitingin hevur kannað hetta hjá løgfrøðinginum, sum arbeiddi við avtaluni við eigarafelagið og løgfrøðiliga niðurstøðan er henda:

Kommunan hevur luttikið í útstykkingarararbeiðinum og hevur tá goldið fyri 2.500 m2 . Ætlanin var at byggja barnagarð á øki.

Løgfrøðiliga metingin er, at kommunan hevur goldið fyri hetta øki og tí ikki eigur at gjalda einaferð afturat, um kommunan velur at byggja annað enn barnagarð á øki. Um kommunan ætlar at brúka meira enn 2.500 fermetrar, eigur kommunan at gjalda eigarafelagnum fyri tað, sum fer upp um 2.500 fermetrar. Tann kostnaðurin má avtalast nærri við eigarafelagið.

Tann løgfrøðiliga metingin er, at um kommunan ikki fer upp um teir 2.500 fermetrarnar, eigur kommunan ikki at gjalda eigarafelagnum nakað, tí goldið er longu fyri 2.500 fermetrar.

Enn er ikki greitt hvussu stórur ein umlættingar/rehabiliteringsdepil verður og tí er ilt at siga um kommuna hevur tørv á meira enn 2.500 fermetrum. Heldur ikki ber í løtuni til at siga hvat ein evt. kostnaður vildi verið um tørvur er á meira enn 2.500 fermetrum

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og virkandi leiðari á stjórnarskrivstovuni mæla til at Fíggjarnevndin gevur umsitingini heimild at samráðast við eigarafelagi um evt. kostnað um kommunan hevur tørv á lendi sum er størri enn 2.500 fermetrar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við staðsetingini og at heimila umsitingini at samráðast við eigarafelagið um evt. kostnað um lendi størri enn 2.500 fermetrar. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Anfinn Brekkstein.

**Ìskoyti:**

Bygginevndin hevur á fundi 05.09.18 samtykt at bjóða Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin út sum totalentreprisa ætlandi til tríggjar arbeiðstakarar. Tá bjóðað verður út sum totalentreprisa er vanligt, at tey, sum ikki fáa projektið, verða samsýnt fyri teirra uppskot. Til hetta endamál metir tekniska fyrisiting, at tørvur er á 300.000 kr.

Harumframt er tørvur á at gera lendiskanningar av staðsetingini, áðrenn útbjóðingartilfarið kann gerast liðugt. Til hetta krevst 100.000 kr.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla eldranevndini til at játta 400.000 kr. til 2775 Eldrarøkt (íløgur) L 27011 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil av 2775 Eldrarøkt (íløgur) L00001 Løgukarmur fyri árið og leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 10. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam og Odd Færø.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Byggiskráin/útbjóðingartilfarið er í gerð til umlættingar- og rehabiliteringsdepilin. Mett er um heildarkostnað fyri verkætlanina. Sí kostnaðarmeting j. nr 18/03889 Ætlanin er at bjóða verkætlanina út í heildararbeiðsstøku í desember 2018. Tilboðini skulu verða TK í hendi í februar 2019. Mett byggitíð er 18 mánaðir. Arbeiðið at byggja umlættingar- og rehabiliteringsdepilin byrjar eftir ætlan í apríl 2019 og avhending í oktober 2020.

Verkætlanin verður boðin út í heildararbeiðstøku til 3 arbeiðstakarar:

Sp/f Húsavarðartænastuna,
P/F Articon
P/F MT Højgaard.

**Tryggingarviðurskifti:**
Teknað verður all-risk trygging, men ivasamt er um tað ber til at tekna verkætlanarábyrgdartrygging í heildararbeiðstøku sambært tryggingarráðgeva hjá TK.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, Verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjóri mæla til, at umsitingin arbeiðir eftir omanfyristandandi leisti og fær heimild til at fara í sáttmálasamráðingar við vinnandi arbeiðstakara við møguligum tillagingum. Mælt verður somuleiðis til at samtykkja kostnaðarmetingina, sí j. nr. 18/03889. Vísir tað seg, at ein arbeiðstakari meldar frá, verður mælt til, at umsitingin bjóðar nýggjum arbeiðstakara við at

veita tilboð. Málið verður lagt fyri aftur eldranevnd, fíggjarnevnd og býráðið til støðutakan eftir sáttmálasamráðingarnar.

**Eldranevndin 05. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Nevndin ynskir at elementir ella modulir kunnu verða positivt nevnd í útbjóðingini sum ein møguleiki, umframt at tilboðsveitarar kunnu koma við einum alternativum uppskoti.

**Ískoyti:**
Sambært ásetingunum fyri A3 øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini skal serstøk byggisamtykt gerast fyri nýggjar útstykkingar. Ásetingarnar fyri útstykkingina við Rólantsgøtu í Hoyvík, sum fevnir um grundstykkir á 300 $m^2$, eru ásettar í skeytið fyri hvørt grundstykkið, og tískil er ongin serstøk byggisamtykt fyri økið. Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er partur av hesi útstykkingini, tískil verður kunnað um, at ásetingarnar fyri nýggja stovnin somuleiðis verða ásettar í skeytið.

Økið, sum er samtykt til nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, er partur av matriklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri enn hvat tørvur er á. Eitt øki áleið 4900 $m^2$ skal tí sundurbýtast frá matr. 135fe, umframt at eitt øki áleið 1700 $m^2$ skal sundurbýtast frá matr. 138a til samanlegging við sundurbýtið frá 135fe. Nýggi matrikulin verður sostatt áleið 6.600 $m^2$ til støddar, sí uppskot til sundurbýtið og samanlegging á kortskjalinum *Rólantsgøta_marknaumskipan*.

**Skjøl:**
*Rólantsgøta_marknaumskipan*, journal nr. 17/03195-21.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at sundurbýta eitt øki frá matr. 135fe og 138a at samanleggja til ein nýggjan matrikul áleið 6.600 $m^2$ til nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, sum verður at senda til Umhvørvisstovuna til avgreiðslu, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður ímóti og mælir til at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

Annfinn Brekkstein atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við eldranevndini 5. november 2018 og meirilutanum í teknisku nevnd 27. november 2018 og beina málið í býráðið og málið um sundurbýtið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson atkvøður ímóti og mælir til, at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti og mælir til at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutunum í fíggjarnevndini og byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjøghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Bjørg Dam

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

**Eldranevndin 19. mars 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Eftir at byggiskráin til umlættingar- og rehabiliteringsdepilin (URD) varð liðug, bleiv verkætlanin boðin út 6. desembur 2018, í heildararbeiðstøku til 3 heildararbeiðstakarar, tað er:

- Sp/f Húsavarðartænastan
- P/F Articon
- P/F MT Højgaard.

Tilboðini komu inn 7. marts 2019, og liggja í j.nr. 18/03889-3

Dómsnevnd, mannað við 7 fólkum við viðkomandi førleikum, hevur síðani neyvt gjøgnumgingið øll trý tilboðini og mett tey út frá útbjóðingartilfarinum. Eftir at tilboðini eru gjøgnumgingin og viðgjørd, hevur dómsnevndin gjørt dómsnevndarálit, sum er lagt fram fyri bygginevndina, sum tekur undir við úrslitinum.

Dómsnevndarálitið framgongur á j.nr. 18/03889-4

Um býráðið tekur undir við tilmælinum, er næsta stig, at kommunan fer undir sáttmálasamráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Tá sáttmáli er gjørdur, skal heildararbeiðstakarin gera myndugleikaprojekt í tøttum samstarvi við kommununa og fáa til vega øll neyðug loyvir.

Út frá vinnandi uppskotinum hevur umsitingin gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina, sum er íroknað HVÙ, prosjektumsiting, trygging o.a., sum sæst á j.nr. 18/03889-2.

Ætlanin er at hava framløgu fyri býráðslimunum mikudagin kl. 15.00, har øll uppskotini verða víst fram og har kunnað verður um dómsnevndararbeiðið.

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjórin mæla til:

- at taka undir við dómsnevndarálitinum og fara undir sáttmálasamráðingar og gera sáttmála við vinnandi heildararbeiðstakara.
- at játta kr. 23 mió. í 2019 av tøkum løgukarmi konto 5775 L0001 løgukarmur fyri ári og L0002 framfluttar løgur og at játta restina av kostnaðinum sambært kostnaðarmeting j.nr. 18/03889-2 á fíggjarætlanini í 2020.

at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. mars 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Bergun Kass og Halla Samuelsen, mælir býraðnum til at taka undir við dómsnevndarálitinum og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Málið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevnd og býráð.

Ein minniluti, Tróndur Siguðsson, tekur undir við at gera ein umlættingardepil, men mælir til at staðseta umlættingardepilin við Stórubrekku saman við barnagarðinum, ið ætlanin er at staðseta har.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari í móti og 5 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson, Odd Færø, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara, MT Højgaard Føroyar, til tess at finna sparingar á verkætlanina.

Út frá sparingum frá MT Højgaard Føroyar hevur umsitingin gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina, sum er íroknað HVÙ, prosjektumsiting, trygging o.a., sum sæst á j.nr. 18/03889-9.

Um býráðið tekur undir við tilmælinum er næsta stig, at kommunan fer undir sáttmálasamráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Tá sáttmáli er gjørdur, skal heildararbeiðstakarin gera myndugleikaprosjekt í tøttum samstarvi við kommununa og fáa til vega øll neyðug loyvir.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjórin mæla til:
- at taka undir við dómsnevndarálitinum og fara undir sáttmálasamráðingar og gera sáttmála við MT Højgaard Føroyar.

- at játta kr. 23 mió. í 2019 av tøkum løgukarmi konto 5775 L0001 løgukarmur fyri ári og L0002 framfluttar løgur og at játta restina av kostnaðinum sambært kostnaðarmeting j.nr. 18/03889-9 á fíggjarætlanini í 2020.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, tveimum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund til umrøðu og støðutakan.

**Ìskoyti**
Ósemja hevur verið millum Tórshavnar kommunu, grannar og eigarafelag um verkætlanina URD. Òsemjan liggur í kjalarvørrinum á eini avtalu frá 13. feb. 2003 millum Tórshavnar kommunu og Eigarafelagið Hoyvíkshædd(EiH).

Grannar kenna seg ikki hoyrdan og meta, at tað fer at verða bygt ov høgt og ov tætt við húsini. Nógv samskifti hevur verið millum borgarstjóra, umsiting og EIH. Til seinni fundir hevur EIH havt Mimi Steintórsdóttir, advokat við.

EiH hevur roknað seg fram til, at TK sambært avtaluni frá 2003, skal rinda uml. 2,6 mió. kr. fyri at leggja seg á ta vídd av lendi, sum tørvur er á til URD.

**Tórshavnar kommunu og EIH eru komin ásamt um uppskot til semju.**

**Punkt 1**
Tórshavnar kommuna kemur við alternativari loysn at taka einans 1 búpláss við Sivjugøtu, sum svarar til at bygningurin URD minkar á leið 4-5 metrar?

**Punkt 2.**
Tórshavnar kommuna kemur við alternativari loysn at minka um geiran framvið garðunum á 0,5 til 1 metur við grót bakkanti, sum t.d. er brúkt í verkætlan við hvítanesvegin hjá arbeiðstakaranum, Konsax. Síðani verður hesin geirin plantaður við runnum og trøum

**Punkt 3**
Kota 121.70. Hetta tann kotan, sum bygt verður eftir, so her er í lagi.

**Punkt 4**
Verður eisini mett at verða í lagi, at vegurin fram við URD verður gjørdur blindur.

**Punkt 5**
Verður eisini mett at verða í lagi, at vegurin ikki verður hægri enn myndin við svørtu strikuni vísir.

Eigarafelagið góðtekur semingsuppskotið um nýtsluna ímun til pkt 1-5, men góðtekur ikki at fráskriva sær gjaldið. Eigarafelagið hevur roknað hetta endurgjaldskravið at vera 2,6 mió kr.

Um TK byggir URD í mun til pkt 1-5, góðtekur eigarafelagið nýtsluna av lendinum, og vil eigarafelagið framyvir taka væl ímóti bygninginum og teimum, sum koma at virka har.

**Bygginevndin**
Bygginevndin hevur á fundi 27.07.19 og 29.10.19 gjørt ta niðurstøðu, at byggingin eigur at halda fram sum samtykt. Hóast fyrispurningur tá var at lækka bygningin, so er í stóran mun sama grundgeving galdandi. Kommunan heldur allar ásetingar í mun til byggingina og tí er trupult hjá bygginevndini at koma til aðra niðurstøðu enn, at verandi verkætlan heldur fram.

Hinvegin skilur bygginevndin støðuna um ósemjuna við grannarnar, men metir at hetta er ein politisk avgerð og leggur tí málið til politiska viðgerð, sí fundarfrásøgn hjá bygginevnd j.nr. 18/00270-12.

**Tilmæli**
Heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjórin og deildarleiðarin fyri verkætlanardeildina mæla til:

- at nevndin tekur støðu til uppskotið og beinir málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.
- at umsitingin setur upp fíggjarligu avleiðingarnar av broytingunum, at leggja fyri nevndina.

**Eldranevndin 29. oktober 2019:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, tekur undir við fyriliggjandi uppskoti punkt 1-5.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, heldur fast í samtykta projektið.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Eldranevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Siguðsson og Heðin Mortensen atkvøður ímóti samtyktini hjá meirilutanum í Eldranevndini, og vísur á áður gjørdar samtyktir um at staðseta umlættingardepilin við Stórubrekku saman við barnagarðinum, ið ætlanin er at staðseta har

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt var um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndin, ið varð samtykt við 7 atkvøðu fyri, 6 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein..

# 244/19 Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 365/18 | 18/04076-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 247/19 | 18/04076-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 238/19 | 18/04076-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 203/19 | 18/04076-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 244/19 | 18/04076-1 |

**Upprunin til málið:**
Gunvør Balle, forkvinna í mentamálanevndini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ynski er at heiðra minni um Andreu Árting og hennara virki innan fakfelagsrørsluna, kappróður v.m. við at gera eina standmynd ella minnismerki/-varða.

Andrea Árting var komin væl upp í árini, tá hon í ringastu tíðunum í 30´unum púra óvæntað gjørdist forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Kreppan hevði við sær, at fakfeløgini vóru undir trýsti. Hetta nervaði tó ikki Andreu. Hon var órørd, og hon segði altíð tingini beint fram sama, hvar ið hon var. Við sínum eyðsýnda sosiala tilviti gjørdist hon ein ímynd fyri fakfelagsstríði í Føroyum í 20. øld. Alt sítt vaksna lív setti hon rættindini hjá kvinnum í brennidepilin. Hóast hon ongantíð sat á tingi, so virkaði hon í roynd og veru sum ein sosialpolitikkari. Lønin hjá arbeiðskvinnunum var størsta partin av 20. øld væl lægri enn hjá monnunum. Hetta setti Andrea sær fyri at broyta. Í 1977 rakk hon loksins úrslitinum, at kvinnur og menn skuldu fáa líka løn fyri sama arbeiði. Tá hon seinni sama árið legði frá sær sum forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, var hon 85 ára gomul. Soleiðis verður sagt um Andreu Árting í sambandi við filmin, sum er gjørdur um hana og vístur í KVF í 2017.

Røddir hava av og á verið frammi um at gera eina standmynd av kendu havnarkonuni Andreu Árting.

Tórshavnar kommuna kundi tikið stig til samstarv við Havnar Arbeiðskvinnufelag og aðrar áhugapartar um at seta eina standmynd upp av Andreu Árting í býnum.

Ein staðseting kundi t.d. verði uttanfyri Steinatún, sum liggur mitt í býnum, har nógv fólk ferðast aftur og fram. Tað hevði klætt Tórshavnar kommunu væl at reist eina standmynd av hesi serstøku kvinnu, sum stríddist so íðuliga fyri rættindunum hjá kvinnum.

Møgulig staðseting av standmynd ella minnismerki/-varða er málsøkið hjá Býarskipanarnevndini og verður tikið upp í nevndini, um verkætlanin gerst aktuell.

Tá greitt er, hvørjir partar hava áhuga at vera við í verkætlanini, verður fíggjarætlan gjørd og leistur fyri, hvussu verkætlanin verður útint.

Eisini kann nevnast, at bók um søguna hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag eftir ætlan kemur út í 2019.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við málinum og at fáa samstarv í lag við Havnar Arbeiðskvinnufelag og onnur um møguliga verkætlan.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í dialogi við nøkur fakfeløg um at vera við í hesi verkætlan, og ábendingar eru um, at tað helst ber til. Eisini hevur TK søkt Betri Stuðul um stuðul, men fekk noktandi svar. Fyri at skapa betri grundarlag fyri at koma á mál við verkætlanini verður mett hóskandi, at TK nú tekur stig til at útvega hóskandi eginfígging til verkætlanina, sum so kann vera grundarlag undir endaligu tilgongdini at fáa onnur at koma við í samlaðu fíggingina.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at:
1. Flyta 100 tkr. av konto 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting
2. Flyta 100 tkr. av projektkontu L57029 (sak: Gøtuítrótt) til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heita á fíggjarnevndina at flyta 100 tkr. av kontu 5310 Mentanartiltøk o.a. til nýggja projektkontu: Minnismerki Andrea Árting.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av konto 4140, kr. 100.000 av L57029 og kr. 100.000 av konto 5310 á konto 5311 og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

# 245/19 Bygnaðarviðurskifti á dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2019 | 227/19 | 19/02605-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 206/19 | 19/02605-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.09.2019 | 254/19 | 19/02605-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 230/19 | 19/02605-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 269/19 | 19/02605-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 245/19 | 19/02605-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 290/19 | 19/02605-1 |

**Upprunin til málið:**
Tørvur á at seta í verk nýggjan bygnað á dagstovnaøkinum at leiða og skipa námsfrøðiligu tænastuna børnunum at gagni.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Dagstovnaøkið hevur verið kommunalt ábyrgdarøki síðan 2000, men er ikki tillagað og ment bygnaðarliga í samsvari við ekspanderingina av økinum hvørki viðvíkjandi mongd av stovnum og nýggjum tilboðum 0-18 ár ella teim vaksandi fakligu og fyrisitingarligu krøvum, ið nú verða sett til skipanina, leiðslurnar og fakligu tænastuna.

Kompleksiteturin í nútíðarsamfelagnum flytur eisini við inn í dagstovnarnar. Óhóskandi bygnaður sum verandi hevur við sær stórar leiðsluligar og skipanarligar avleiðingar umframt avleiðingar fyri námsfrøðiligu tænastuna og menniskjuni í tænastuni.

Endurskoðan av bygnaðinum á dagstovnaøkinum hevur verið á breddanum fyrr, seinast í 2013 og 2015, uttan at nakrar bygnaðarligar broytingar eru settar í verk. Tað merkir, at tilgongdir hava verið í gongd uttan úrskurð, men hava hinvegin skapt væntanir og helst eisini ørkymlan bæði í fyrisiting, hjá dagstovnaleiðarum og starvsfólkum um møguligar broytingar, ið ikki henda.

Tørvurin á nýggjum bygnaði er tann sami um ikki størri enn víst varð á í 2013 og 2015. Hóast einki hevur verið sett í verk av teimum uppskotunum, so hevur fyrisitingin tikið munagóð tøk móti somu málum, men tó í einum bygnaði og í eini skipan, ið ikki stuðlar undir átøkini. Hetta er ikki haldbar støða.

Fyri at kunna leiða og røkja ábyrgdina av námsfrøðiligu tænastuni skynsamt krevst ein tættur leiðslubygnaður, har tað er samanhangur líka frá politisku skipanini til umsitingina og út til virksemið á tí einstaka dagstovninum. Júst samanhangur er grundarlagið fyri at kunna leiða dagstovnaøkið við felags málum og tryggjar at:

- Børnini fáa góða og eins góða námsfrøðiliga tænastu
- Dygd og felagsmenning fyri starvsfólkini á dagstovnaøkinum í samanhangi við alt økið

- Dygd og felagsmenning fyri leiðslurnar á dagstovnaøkinum og samanhangi við alt økið
- Barna- og ungdómsdeildin er í samanhangi við og røkkur út til alt dagstovnaøkið javnbjóðis, við felags treytum og ásetingum í mun til politikkir og intervenering
- Barna- og ungdómsdeildin hevur leiðslubygnað undir sær, sum til ber at leiða og áhaldandi kunna seta felags menningarkós
- Samanhangur er millum øll liðini líka frá politisku skipanini, fyrisitingini, deild, leiðslu, starvsfólk, børn og víðari til foreldur
- Leiðsla er tættari uppá og tryggjar samanhang

Býráðið hevur júst samtykt barna- og ungdómspolitikk fyri námsfrøðiliga økið. Eisini er tikið undir við námsfrøðiligu stevnumiðunum, sum Mentamálaráðið hevur kunngjørt, og nýggjur námsætlanarfrymil er gjørdur. Hetta er gott og neyðugt grundarlag fyri teimum málum, ið sett verða námsfrøðiligu tænastuni bæði yvirskipað og á einstaka stovninum.

Skal tað eydnast í verki, krevst ein dyggur bygnaður og góðar umstøður at skipa námsfrøðiligu tænastuna til børn og ung.

Flati leiðslubygnaðurin á dagstovnaøkinum, soleiðis sum hann er í dag, tryggjar ikki hetta. Tað er ov langt frá deildarleiðaranum til teir 37 dagstovnaleiðararnar, sum allir vísa til deildarleiðaran, og sum allir hava sjálvsagt krav uppá nærverandi leiðslu og sparring frá sínum leiðara. Heldur enn at leiða, fyrisita og menna økið í øllum lutum, fer størsti parturin av orkuni hjá deildini, ið aftrat deildarleiðaranum telur 2 fulltrúar og eitt skrivstovufólk, tí til at sløkkja eldar, har ein tættari leiðsla og umsiting tvørturímóti kundi havt fyribyrgt slíkum støðum áðrenn.

Nýggjur bygnaður skal tryggja, at samanhangur er í ymisku leiðsluløgunum, bæði tvørgangandi, uppeftir og niðureftir. Høvuðsdentur á uppskotinum til nýggja bygnað er lagdur á at tryggja námsfrøðiliga tænastuna, ið skal veitast barninum, meðan síðuvinningurin í bygnaðinum er, at tað umframt at leiða námsfrøðiligu tænastuna skynsamt eisini ber til at hava betur heildaryvirlit yvir fíggjarligan rakstur, starvsfólkaliga og námsfakliga menning.

Skotið verður tí upp at skipa eitt nýtt leiðslulið millum deildarleiðaran og stovnsleiðararnar. Mett verður, at hetta millumleiðsluliðið skal hava millum 4-6 leiðarar, sum hvør hevur ávíst tal av stovnsleiðarum og stovnum undir sær. Hesi leiðarar vísa til deildarleiðaran.

Til tess at nágreina uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum ymsu leiðsluliðini verður skipað tilgongd saman við økinum og fyrisitingini annars, tí fleiri viðurskifti nema eisini við ábyrgdarøki hjá øðrum fyrisitingum enn trivnaðarfyrisitingini.

Endamálið er at fáa øll viðurskifti, sum kunnu styrkja grundarlagið undir bestu námsfrøðiligu tænastuni, við, harundir eisini fíggingina av tænastuni, og at broytingarnar merkjast koma námsfrøðiliga virkseminum á stovnunum til gagns.

Trivnaðarfyrisitingin leiðir hesa tilgongd, har umboð úr fyrisiting, stovnsleiðslum o.ø. fara at taka lut.

Harumframt kemur samskifti við sáttmálapartarnar, t.e. er Pedagogfelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, viðvíkjandi starvsfólkaviðurskiftum og lønarflokkingum.

Slík tilgongd, har ikki alt í nýggja bygnaðinum er læst fast frammanundan, og har høvi tí er at viðgera og taka avgerð um staklutir so hvørt grundarlag er klárt, krevur tó nakrar yvirskipaðar varðar á vegnum.

Ein varði er setan av millumleiðarunum – tvs. nýggja leiðsluliðið, har tal av leiðarum, starvsheiti og starvslýsing tí viðvíkjandi eigur at verða liðugt fyrireikað í heyst 2019, so at setanir kunnu verða framdar um ársskiftið. Samstundis verður undirliggjandi stovnsleiðarabygnaðurin skipaður og settur í verk.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/01148 Endurskoðan av stovnsøkinum á barna- og ungdómsøkinum

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Fíggjarætlanarviðgerðin 2020 skal somuleiðis taka hædd fyri bygnaðarbroytingini. Eitt nýtt leiðsluliði er í sjálvum sær ein kostnaðarøking, eru ikki aðrar fíggjarligar broytingar. Í

sambandi við fíggjarætlanina 2020 skal fíggingin av økinum í síni heild endurskoðast samsvarandi nýggja bygnaðinum, eitt nú um játtanir, sum barna- og ungdómsdeildin í dag umsitur (t.d. sjúkrafráverur, børn við serligum tørvi), skulu leggjast út til nýggja leiðsluliðið, um møguligar broytingar í normeringum e.ø. kunnu styrkja námsfrøðiligu tænastuna á stovnunum, um broytingar skulu gerast í gjøldum v.m. Partur av hesi viðgerð er eisini, um tillagingar í fíggjarætlanini verða gjørdar í stigum yvir ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at broyta leiðslubygnaðin á dagstovnaøkinum soleiðis, at eitt nýtt leiðslulið verður skipað millum deildarleiðaran og stovnsleiðararnar. Málið at beina í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður ímóti og mælir til at beina málið til hoyringar hjá Pedagogfelagnum og stovnsleiðarunum, áðrenn endalig støða verður tikin til leiðslubygnaðin á dagstovnaøkinum.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið víðari við bygnaðarbroytingini, sum omanfyri lýst hevur sum yvirskipað mál at at tryggja námsfrøðiligu tænastuna, at tryggja samanhang millum tey ymisk leiðsluløgini og fáa eitt betri heildaryvirlit yvir rakstur og námsfakliga menning á dagstovnaøkinum.

Síðstu mánaðirnar hevur toymi úr ymsum deildum í umsitingini arbeitt víðari við at nágreina ymsar staklutir í bygnaðarbroytingini. Kunnandi fundir hava verið við ávikavist leiðsluna í Føroya Pedagogfelag og við dagstovnaleiðararnar um bygnaðarbroytingina. Eisini eru tey kunnað um uppskot til skipan við fyrireikingartíð ætlað sum fyrsta stig í størri arbeiði at broyta fíggjarleistin fyri dagstovnaøkið, har betri umstøður til námsfrøðiligu tænastuna, ogharvið barnið er í fokus.

Frá fundunum er niðurstøða, at Pedagogfelagið leggur størstan dentin á at betra fíggjarligu karmarnar til námsfrøðiliga virksemið á stovnunum, og at dagstovnaleiðarin í nýggjum bygnaði framhaldandi skal hava leiðsluna av stovninum. Dagstovnaleiðararnir leggja eisini størsta dentin á umstøðurnar á stovnunum, men flestu teirra ynskja eisini leiðslu tættari uppá.

Í samskiftinum við Pedagogfelagið og dagstovnaleiðararnar er dentur lagdur á, at talan er um broytingartilgongd, har høvi skal vera at viðgera og taka avgerð um staklutir so hvørt grundarlagið er klárt, og at avvarðandi partar verða tiknir við í tilgongdina.

**Nýggja leiðsluliðið**
Umrøtt er starvsheiti og tal av eindarleiðarum. Vísandi til, at Heilsu- og umsorganartænastan í Tórshavnar kommunu brúkar heitið eindarleiðari fyri samanberiligt leiðslulið, og at hetta tí er kent starvsheiti í kommununi, verður mett skilabest at brúka sama starvsheiti til dagstovnaøkið.

Viðgjørt er, hvussu nógvar eindarleiðarar skipanin skal hava. Sammett við donsk viðurskifti og við støði í, hvat mett verður hóskandi til Tórshavnar kommunu, verður mett skilabest við í alt 5 eindarleiðarum. Hetta svarar til, at hvør eindarleiðari hevur uml. 6-7 dagstovnaleiðarar undir sær og uml. 150 starvsfólk.

Eindirnar eru ikki skipaðar enn, men ætlast tikið upp, so skjótt avgerð um tal av eindarleiðarum er greitt.

**Uppgávu- og ábyrgdarbýtið**
Nýggja eindarleiðsluliðið ber í sær, at neyðugt er at broyta núverandi ábyrgdar- og uppgávubýtið millum dagstovnaleiðara og eindarleiðara og millum eindarleiðara og deildarleiðara. Í eini ætlanartilgongd er neyðugt, at øll leiðslulið eru tikin við uppá ráð, áðrenn endalig avgerð verður tikið um ítøkiliga uppgávu- og ábyrgdarbýtið.

Skipaður er arbeiðsbólkur við umboðum fyri umsitingina og umboðum fyri dagstovnaleiðararnar. Arbeiðið er grundarlagið undir starvslýsingunum hjá dagstovnaleiðarunum, eindarleiðarunum og deildarleiðaranum. Miðað verður eftir, at eindarleiðarastørvini verða sett pr. 1. januar 2020. Hetta merkir, at størvini skulu verða lýst leys seinnu hálvu av oktober.
Yvirskipað skal eindarleiðarin hava leiðsluábyrgd av dagstovnaleiðarunum í eindini og fíggjar- og fyrisitingarligu leiðsluna. Dagstovnaleiðarin skal framhaldandi hava leiðsluábyrgdina av virkseminum á stovninum og starvsfólkunum.

Tá ið starvslýsingarnar eru gjørdar, skal støða takast til, hvussu tilgongdin viðvíkjandi ábyrgdarbroytingunum hjá stovnsleiðarunum og deildarleiðaranum skal vera, harundir møguligar hoyringsfreistir.

**Flokking av eindarleiðarastarvinum**
Tann yvirskipaða leiðsluuppgávan hjá eindarleiðaranum verður tvídeild. Eindarleiðarin skal vera við til at tryggja námsfrøðiligu tænastuna, og samstundis skal eindarleiðarin tryggja betri heildaryvirlit yvir raksturin.

Av tí at ein so stórur partur av leiðsluuppgávuni er tengdur at námsfrøðiligu tænastuni, er ynskiligt, at eindarleiðarin hevur námsfrøðiliga bakgrund. Pedagogfelagið hevur í løtuni ikki nakra flokking til starvið sum eindarleiðari innan dagstovnaøkið, men hevur sum fyrimynd víst kommununa á flokking av eindarleiðarum, sum felagið hevur við Almannaverkið, tó lønt eftir tænastumannasáttmálanum.

Neyðugt er tó, at sáttmálapartarnir flokka eindarleiðarastarvið hjá kommununi.

**Fyrireikingartíð og fíggjarleistur**

Til tess at styrkja námsfrøðiliga arbeiðið á stovnunum og stovunum, verður arbeitt við uppskoti at játta 2 tímar fyrireikingartíð frá 1. januar 2020. Aftrat bygnaðarbroytingini er játtan til fyrireikingartíð tikið upp sum liður í sjálvum endamálinum at tryggja námsfrøðiligu tænastuna.

Verandi skipan er, at fyrireikingartíðin – ella tíð til annað arbeiði, sum hetta eisini verður nevnt – verður tikin frá stovuni, tí starvsfólk noyðast at fara frá, meðan børnini eru á stovuni, uttan at starvsfólk kemur í staðin.

Hjálagt málinum er upprit, sum lýsir, hvussu stór lønarútreiðslan fyri hvønn tíma fyrireikingartíð er. Sambært hesum útrokningum fara 2 tímar fyrireikingartíð til hvørja stovu á dagstovnunum og hvønn flokk í frítíðarskúlunum umframt til ungdómsklubbarnar at kosta uml. kr. 2,6 mió.
Á fundinum við dagstovnaleiðararnar komu fram ymisk sjónarmið um henda leist. Eitt nú varð víst á, at fyrireikingartíðin eigur at verða løgd til námsfrøðingarnar og ikki til stovuna/flokkin. Vansin við hesum er, at stovur/flokkar við fáum ella ongum pedagogum sostatt ikki fáa lut í tímunum/fíggingini til fyrireiking.

Til tess at skipa leist fyri, hvussu fyrireikingartíðin skal skipast í verki, verður arbeiðsbólkur skipaður við umboðum fyri álitisfólkini á dagstovnunum, umboðum fyri dagstovnaleiðararnar og umsitingini. Hesin bólkur fer í gongd seinni í september.

Skipanin við fyrireikingartíð er eisini fyrsta stig í størri arbeiði at endurskoða og ætlandi nýhugsa allan fíggjarleistin fyri dagstovnaøkið.

Eindarleiðararnir koma at hava sum eina høvuðsuppgávu at tryggja raksturin og harvið fíggjarstýringina. Ætlanin er tí, at so skjótt hesi størv eru sett, verður tilgongdin saman við leiðsluni og umsitingini annars at skipa nýggjan fíggjarleist sett í gongd, og úrslitið av tí síggjast aftur í fíggjarætlanarbeiðinum 2021.

**Fígging**
Tá dagstovnaøkið er skipað í eindir, verður kontubygnaðurin í fíggjarætlanini broyttur soleiðis, at hvør eindarleiðari roknskaparliga hevur játtanina til stovnarnar í viðkomandi eind samlaða í einari rakstrarkontu/stovnsnummari, meðan stovnarnir fara at verða bólkaðir sum prosjektir. Broytingar verða annars ikki gjørdar, hvussu ið tær einstøku lønar- og útreiðslukonturnar verða settar upp.

Hetta gevur øllum dagstovnaøkinum eitt sterkari fíggjarligt grundstøði. Saman við møguligum umleggingum av játtanum, sum í dag liggja uttanfyri verandi stovnsrakstrarkontur, fer hetta væntandi yvir tíð geva ávísar tænastuligar og fíggjarligar betringar.

Umsitingin ger í løtuni samlað uppskot til fígging av bygnaðarbroytingini og skipan við fyrireikingartíð, sum samlað sær er betran av normeringini. Sjálv bygnaðarbroytingin verður mett at kosta uml. kr. 3,5 mió alt eftir talið av eindum. Aftrat kemur uppskotið um játtan til fyrireikingartíð. Tær fíggjarligu betringarnar koma helst ikki at síggjast í fullum líki fyrsta árið eftir bygnaðarbroytingina, tí nýggja skipanin skal fóta sær. Men annað árið eftir broytingina eiga munandi betring at vera at síggja, og saman við nevndu umleggingum í ávísum játtanum verða broytingarnar eftir ætlan útreiðsluneutral.

**Víðari tilgongd**
Sum omanfyri lýst, hava fundir verið við Pedagogfelagið og dagstovnaleiðararnar, umframt at umsitingin hevur arbeitt víðari við málinum. Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri umsiting og

dagstovnaleiðarar er settur at gera uppskot til uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum ymsu leiðsluliðini sum grundarlag fyri starvslýsingunum, og ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri umsiting, álitisfólk á dagstovnaøkinum og dagstovnaleiðarum verður settur at gera leist fyri fyrireikingartíðini.

Ætlanin er, at starvslýsing av eindarleiðarastarvinum er klár at góðkenna til fíggjarnevndarfundin í oktober. So verða størvini lýst leyst til setan ætlandi 1. januar 2020. Flokking av starvinum skal tí eisini vera klár.

Uppskot til samanseting av stovnum í hvørjari eind verður eisini liðugt lagt fyri fíggjarnevndarfundin í oktober.

Uppskot til fígging av bygnaðarbroytingunum, fyrireikingartíð og uppskot til kontubygnaðin ætlast eisini lagt fyri fíggjarnevndini í oktober og verður partur av fíggjarætlanarviðgerðini 2020.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla til at taka omanfyri standandi til eftirtektar og í hesum sambandi at góðkenna:

- At skipa kommunala dagstovnaøkið í fimm eindir við hvør sínum eindarleiðara
- At uppskot til starvslýsing av eindarleiðarastarvinum verður latið fíggjarnevndini at góðkenna á nevndarfundinum í oktober
- At heita á Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um at fáa flokkað eindarleiðarastarvið við Pedagogfelagið
- At uppskot til fyrireikingartíð verður gjørt sum partur av fíggjarætlanini 2020
  At uppskot til samlaða fígging av broytingunum verður latið fíggjarnevndini á nevndarfundinum í oktober, harundir broytingar í kontubygnaðinum í fíggjarætlanini.

**Fíggjarnevndin 25. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Turið Horn fór av fundinum og tók Jógvan Arge sæti.

Atkvøtt varð um avgerðina í fíggjarnevndini 25. september 2019.

Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Jógvan Arge, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**

Víst verður til tilgongdina omanfyri og tær ávegis avgerðir, sum tiknar eru.

Síðani síðstu viðgerð hava fundir verið við dagstovnaleiðararnar (3/10 og 11/10) og álitisfólkini (26/9 og 7/10). Kunningarskriv um ætlaðu broytingar varð sent stovnunum 4/10, har tað eisini varð greitt frá normeringini.

Á fundunum eru reistir ymsir spurningar, har tørvur hevur verið at lýsa tilgongdina og endamálið við bygnaðarbroytingini greiðari. Eisini er spurt um, hvussu broytingarnar fara at ávirka námsfrøðingarnar, dagstovnaleiðararnar og deildina, harundir um ábyrgdir og rættindi. Uppskotið um játtan til fyrireikingartíð hevur fingið atfinningar, tí ynskið er heldur at fáa hægri normering, og at skipan við fyrireikingartíð er partur av leiðsluuppgávuni á stovninum.

Við støði í fundarvirkseminum hevur umsitingin tillagað uppskotið um tal av eindum og um hægri játtan til normering. Sum liður í hesum verður skotið upp, at samlaði kostnaðurin av bygnaðarbroytingini og normeringsøkingini verður kr. 7,25 mió, ið mett verður kann fáast til vega sjálvfíggjandi (útreiðsluneutralt) innan grein 3 í fíggjarætlanini sum liður í nýggja bygnaðinum. Lagt er ikki upp til hægri foreldragjøld.

<u>Viðv. tal av eindum/eindarleiðarum:</u>
Skotið verður upp at broyta samtyktina um at skipa kommunala dagstovnaøkið í fimm eindir til í staðin at verða fýra eindir. Broyting er, at hvør eindarleiðari tá hevur uml. 185 starvsfólk í eindini heldur enn 150, og mett verður, at hetta fær ikki avgerandi avleiðingar fyri nýggja bygnaðin, sum tí eisini verður bíligari at fremja. Mett verður, at fýra eindarleiðarastørv íroknað byrjanarútreiðslur kostar kr. 2,738 mió. Arbeitt verður fram ímóti, at eindarleiðararnir fáa skrivstovu saman í kommunalum hølum.

<u>Viðv. normering</u>: við støði í viðmerkingunum frá fundunum við dagstovnaleiðararnar og álitisfólkini verður skotið upp at broyta uppskotið um at játta 2 tímar fyrireikingartíð pr. stovu/flokk – svarandi til kr. 2,6 mió, til í staðin at økja normeringarnar svarandi til upphædd kr. 4,512 mió.

Í tilgongdini er upplýst, hvussu normeringin hevur verið aftur til 2002. Har útrokningarlykilin til vøggustovu- og barnagarðsnormeringina hevur staðið í stað, er útrokningarlykilin til frítíðarskúlanormeringina og fyrisitingar/leiðslunormeringina lækkað.

At økja normeringarnar, so at tær hava mest gagnligu ávirkan, er eisini ein spurningur um, hvussu økta normeringin skal býtast út á ymsu normeringarnar (vøggustovu, barnagarð, frítíðarskúla, fyrisiting/leiðslu). Her eru fleiri atlit at taka, ið kunnu vera ósamsvarandi. Sum ætlað verður settur arbeiðsbólkur við umboðum fyri dagstovnaleiðararnar og umboðum fyri álitisfólkunum, ið saman við umsitingini skulu viðgera og gera uppskot til normeringsbroytingar innanfyri ásetta karmin uppá kr. 4,512 mió.

<u>Fíggjartørvur og fígging av eindarleiðslu og normeringsøking</u>
Við støði í omanfyri nevndu uppskotum um meirnormering uppá kr. 4,512 mió og at skipa økið við fýra eindarleiðarum, verður samlaði kostnaðurin mettur at verða kr. 7,25 mió.

| **KOSTNAÐUR** | |
|---|---|
| Fýra eindarleiðarar | 2.550.000 |
| Byrjunarkostnaður, arbeiðsamboð | 200.000 |
| Meirnormering | 4.500.000 |
| **Kostnaður íalt** | **7.250.000** |

Fíggingin av øktu kostnaðinum er settur saman av niðanfyri nevndu betringum í rakstri, samskipan, tillaging og umlegging av ávísum játtanum.

| FÍGGING | |
|---|---|
| **Tímalønir, avloysing.** Betri samskipan av vikarum | 1.000.000 |
| **Dygdarmenning.** Játtan var 2 mió.kr. Helvt er nøktandi | 1.000.000 |
| **Tímar vegna serligan tørv.** Betri eftirlit, minni tørvur | 1.000.000 |
| **Regulering barnatal.** Farið verður frá mánaðarligari regulering | 1.000.000 |
| **Endurgjald, útj.st., lágt barnatal** - javnast burtur við eindunum | 1.000.000 |
| **Aðrar betringar í rakstri, innkeypi, løn v.m.** 1,7% av játtan íalt | 2.250.000 |
| **Fígging íalt** | **7.250.000** |

Samlaða rakstrarjáttanin á grein 3, Børn og ung, er kr. 179,7 mió í 2019, og er tað fyri vøggustovu- og barnagarðar, frítíðarskúlar, ungdómstilboð og játtanir til ávís endamál. Til samanberingar er talið í fíggjarætlanini fyri 2020, sum nú er til viðgerðar, kr. 190,1 mió.

Játtanin til teir 39 vøggustovu og barnagarðarnar og frítíðarskúlarnar er kr. 138 mióí 2019. Sama tal fyri 2020 er kr. 145 mió.. Hetta svarar til ein vøkstur í rakstrarjáttanini á 5,1%.

Upphæddin uppá kr. 2,25 mió til aðrar betringar/effektiviseringar í rakstri, svarar til uml. 1,6% av hesi upphædd (kr. 145 mió), ið skal vinnast inn aftur í betri skipaðum rakstri.

Verður tímalønt avloysing uppá kr. 1 mió og endurgjald til útjaðarastovnar fyri lágt barnatal uppá kr. 1 mió lagt aftrat teimum kr. 2,25 mió, er samlaða upphæddin íalt av betraðum rakstri kr. 4,25 mió ella svarandi til 2,9%.

Mett verður tí, at uppskotið um at sjálvfíggjað fýra eindarleiðarar og meirnormering letur seg gera.

Starvslýsingar (uppgávu- og ábyrgdarbýti) eindarleiðari og dagstovnaleiðari:
Sum upplýst til undanfarna fund er arbeiðsbólkur skipaður at viðgera uppgávu- og ábyrgdarbýtið soleiðis, at samanhangur kemur í alla skipanina, harundir eisini at gera uppskot til starvslýsing av dagstovnaleiðarastarvinum og eindarleiðarastarvinum bæði viðvíkjandi uppgávum, ábyrgd og førleikakrøvum.

Uppskotið til uppgávu- og ábyrgdarbýtið sær í løtuni soleiðis út, sí niðanfyri. Arbeiðstilgongdin er enn í gongd og ætlast liðug til fíggjarnevndarfundin. Arbeiðsbólkurin, sum arbeiðir við uppgávuni, skal møtast aftur mánadagin, og stovnsleiðararnir skulu møtast týsdagin. Um so er, at broytingar koma til niðanfyristandandi lýsingar, verða broytingarnar latnar fíggjarnevndini skjótast til ber, áðrenn fundin í fíggjarnevndini.

**Dagstovnaleiðari**

**Uppgáva/ábyrgd**

- Hevur leiðsluábyrgd av starvsfólkunum á dagstovninum og setir starvsfólk í samstarv við eindarleiðara
- Hevur ábyrgd av starvsfólkmenning í samstarvi við eindarleiðara
- Hevur ábyrgd av, at skipa fyri innleiðslu av starvsfólkum
- Hevur fíggjarligu og námsfrøðiligu ábyrgdina á dagstovninum
- Hevur ábyrgd av at tryggja umstøðurnar fyri góðum dagstovnavirksemi á stovninum
- Hevur ábyrgd av at arbeiða við umstøðum, ið krevja ábøtur
- Hevur yvirskipað ábyrgd fyri foreldrasamstarvinum
- Hevur yvirskipað ábyrgd av bæði innanhýsis og uttanhýsis tvørfakliga samstarvinum

**Eindarleiðari**

**Uppgáva/ábyrgd:**

- Hevur leiðsluábyrgd av dagstovnaleiðarunum í eindini
- Hevur yvirskipaða starvsfólkaábyrgd av øllum starvsfólkum í eindini
- Hevur ábyrgd av leiðslumenning í samstarvi við Barna- og ungdómsdeildina.
- Hevur ábyrgd av, at starvsfólkainnleiðsla verður framd
- Hevur yvirskipaðu fíggjarligu og námsfrøðiligu ábyrgdina í eindini
- Hevur ábyrgd av at tryggja umstøður fyri góðum dagstovnavirksemi á einstøku dagstovnunum
- Hevur ábyrgd av at arbeiða við umstøðum, ið krevja ábøtur
- Hevur ábyrgd av at taka stig til felags skipanir og at hesar verða røktar

Tað eru ymisk krøv til starvið sum stovnsleiðari og starvið sum eindarleiðari. Ein av teimum eyðsýndu ymiskleikunum er, at stovnsleiðarin er leiðari fyri starvsfólk og eindarleiðarin er leiðari fyri leiðarar. Í teirra dagliga yrki merkir hetta, at stovnsleiðarin skal hava námsfrøðiligt innlit og skal duga at menna fakleikan hjá starvsfólkunum á stovninum. Eindarleiðarin skal eisini hava námsfrøðiligt innlit, men hevur eisini leiðslu sum fak og skal duga at menna og stuðla leiðsluni hjá stovnsleiðaranum.

Bygnaðarbroytingin skal eisini tryggja, at arbeitt verður við at skapa javnt góða tænastu tvørturum allar dagstovnarnar hjá Tórshavnar kommunu. Hetta verið seg bæði námsfrøðiligt og fíggjarligt. Eindarleiðarin, sum skal vera leiðari fyri á leið 8-9 stovnum, skal hava skipaðar og regluligar fundir við stovnsleiðararnar, bæði einsamallar og í leiðslubólkinum. Ein av seruppgávunum er at tryggja, at eindarleiðarin saman við stovnsleiðarunum leggur ætlanir og strategi fyri, hvussu hetta máli best verður nátt.

Bæði stovnsleiðarin og eindarleiðarin hava fíggjarliga ábyrgd. Stovnsleiðarin hevur brúk fyri hesi ábyrgd fyri at kunna reka stovnin. Eindarleiðarin hevur fíggjarliga ábyrgd fyri eindini. Hettar merkir, at eindarleiðarin hevur eina meira holistiska fíggjarábyrgd. Hann fær innlit í fíggjarviðurskiftini hjá øllum stovnunum í eindini, og kann taka støðu til tvørgangandi og einsæris átøk, um hettar er neyðugt. T.d. kann talan verða um felags innkeyp av ávísum vørum ella tilfari. Tað kann eisini vísa seg, at ein stovnur hevur eina serliga skipan sum er gagnlig at breiða út á hinar stovnarnar í mun til fíggjarstýring.

<u>Flokking av eindarleiðarastarvinum</u>:
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelagið hava tikið upp samráðing um at flokka eindarleiðarastarvið. Avtalaðir eru fundir við tí ætlan, at semja er um flokking síðst í hesum mánaðinum. Upplýst er, at kommunan kann seta eindaleiðararnar í starv og løna teir við fyribils flokking til størvini eru endaliga flokkað.

<u>Víðari tilgongd</u>:
Eftir at gera er at skipa samansetingina av stovnum í hvørjari av teimum fýra eindunum og samsvarandi tillaging av kontubygnaðinum í grein 3, ið skal samtykkjast í november saman við fíggjarætlanini 2020. Tá skal arbeiðsbólkurin, sum gera skal uppskot til broyttar normeringar, ætlandi eisini verða liðugur.

Ein starvsrættarlig kanning skal gerast, sum staðfestir, um broytingarnar fyri stovnsleiðararnar eru so stórar, at tað er neyðugt við hoyring, umfamt at kanna aðrar

løgfrøðilig avleiðingar. Við støði í uppgávu- og ábyrgdarbýtinum eru sannlíkindini, at hetta verður mett sum ein lítil broyting.

Tá uppgávu- og ábyrgdarbýtið er samtykt, verða eindarleiðarastørvini lýst leys. Miðað verður framvegis ímóti, at størvini eru sett 1. januar 2020.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla fíggjarnevndini til:

1) at broyta samtyktina um at skipa kommunala dagstovnaøkið við fimm eindarleiðarum til at verða fýra eindarleiðarar,
2) at broyta útrokningarlykilin til at økja normeringar innanfyri ein fíggjarkarm uppá kr. 4,512 mió frá fíggjarárinum 2020,
3) at kostnaðurin av pkt. 1) og 2) tilsamans kr. 7,250 mió verður sjálvfíggjaður innan grein 3 í fíggjarætlanini og tikin við í viðgerðina av fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2020, og
4) at góðkenna uppgávu- og ábyrgdarbýtið fyri ávikavist eindarleiðarastarvið og dagstovnaleiðarastarvið.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum tó við dagførdum uppskoti um uppgávu- og ábyrgdarbýti fyri ávikavist eindarleiðarastarvið og dagstovnaleiðarastavið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við málinum.

Tróndur Sigurðsson krevur málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa avgerðina hjá fíggjarnevndini fyri býráðið.
**Ískoyti:**
Skotið verður upp at broyta uppskotið til fígging av samlaðu broytingunum kr. 7,25 mió, so sum tað er framlagt í málslýsingini til fíggjarnevndarfundin 23. oktober 2019, soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| - | Tímalønir, avloysing: | 500.000 kr. |
| - | Dygdarmenning: | 1.000.000 kr. |
| - | Regulering barnatal: | 1.000.000 kr. |
| - | Endurgjald út.j. stovnar: | 1.000.000 kr. |
| - | Aðrar betringar í rakstri: | <u>750.000 kr.</u> |
| Í alt | | 4.250.000 kr. |

At fíggja afturat er kr. 3 mió. Skotið verður upp, at fígging til hetta fæst til vega av í sambandi við fíggjarætlanarviðgerðina 2020.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at broyta uppskotið til fígging sum omanfyri nevnt og at kr. 3 mió í hesum sambandi verða fingnar til vega til grein 3 í fíggjarætlanini 2020.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Minnilutin, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Annfinn Brekkstein, legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

«Minnilutin tekur ikki undir við eindarleiðslu og mælir í staðin til at játta kr. 9 mió. til hægri normering á dagstovnaøkinum, fíggjað av rakstrinum í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2020.»

Broytingaruppskotið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen. Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Jógvan Arge, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini tann 23. oktober við teirri broyting, ið meirilutin í fíggjarnevndini samtykti 30. oktober 2019, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Jógvan Arge, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Turið Horn boðaði frá, at hon var ógegnig í málinum. Jógvan Arge tók sæti fyri hana.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. oktober 2019 | Blað nr.: 1046<br>Formansins merki: |

# 246/19 Prísregulering av brúkaragjøldum á brandstøðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tilbúgvingarnevndin | 25.09.2019 | 10/19 | 19/03929-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 275/19 | 19/03929-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 246/19 | 19/03929-1 |

**Upprunin til málið:**
Brúkaragjøldini á Brandstøðini eru ikki dagførd í eini 8 ár, lønir eru hækkaðar hesi árini og tað er nú neyðugt at fáa gjøldini dagførd.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl** Viðheft er skjal við brúkaragjøldum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og sløkkiliðsstjórin mæla til at prísreguleringin verður góðkend og beina málið í fíggjarnevndina.

**Tilbúgvingarnevndin 25. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilbúgvingarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. oktober 2019 | Blað nr.: 1048 |
| | Formansins merki: |

# 247/19 Umsókn um stuðul til Listasavn Føroya

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 274/19 | 19/04201-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 247/19 | 19/04201-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 19/04201-1 |

**Upprunin til málið:**
Umbøn frá nevndarformanninum í Listasavni Føroya.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Um Listasavn Føroya
Listasavn Føroya fevnir um framsýningarhúsið Listaskálan, aðrar ognir og almenna savnið av føroyskari list. Listasavn Føroya røkir myndlistaliga mentanararv Føroya við innsavning, varðveiting, skráseting, gransking og miðlan. Listasavn Føroya ger savnsins listaverk atkomulig fyri almenningin og letur tey vera tøk til gransking. Listasavn Føroya savnar og keypir føroyska myndlist, og kann savna inn aðra list, tá listafólk og listaverk fakliga kunnu setast í samband við Føroyar.

Stuðul o.a.
Mentamálanevndin í Tórshavnar kommunu hevur í fleiri ár játtað uml. 150 tkr. í árligum rakstrarstuðli til Listasavn Føroya. Seinasta 11. september 2019. Sbrt. galdandi viðtøkum fyri savnið hevur Tórshavnar kommuna ein lim í stýrinum fyri savnið (er innanhýsis skipað sum Listasavn Føroya og Sjálvsognarstovurin Listasavn Føroya). Listasavnið fær árligan rakstrarstuðul fra landinum - í 2018 á 2.284 tkr. Samlaði umsetningurin í 2018 var uml. 3,7 mio.kr.

Savnið hevur fíggjarligar avbjóðingar a í sambandi við bygningsviðurskifti, har tað er átroðkandi tørvur á umvælingum av m.a. takinum. Løgtingið hevur júst játtað 500 tkr. til endamálið. Formaðurin í stýrinum fyri savnið hevur spurt um Tórshavnar kommuna kann veita stuðul á 71 tkr. í sambandi við serliga brandvakt, ið er neyðugt í sambandi við umvælingarnar av takinum v.m.

Á mentanarstuðulskontunum er ikki peningur tøkur til endamálið í verandi støðu. Møgulig upphædd kann játtast av konto aðrar útreiðslur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og trivnaðarstjórin mæla til at játta 71.000 kr. sum stuðul av konto 20910 aðrar inntøkur.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. oktober 2019 | Blað nr.: 1050<br><br>Formansins merki: |

# 248/19 Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 26.02.2014 | 8/14 | 14/00417-16 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.04.2015 | 61/15 | 14/00417-16 |
| 3 Mentamálanevndin | 03.06.2015 | 151/15 | 14/00417-16 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 57/16 | 14/00417-16 |
| 5 Kaldbaksnevndin | 27.04.2016 | 5/16 | 14/00417-16 |
| 6 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 100/16 | 14/00417-16 |
| 7 Kaldbaksnevndin | 24.10.2016 | 8/16 | 14/00417-16 |
| 8 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 248/16 | 14/00417-16 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 312/16 | 14/00417-16 |
| 10 Kaldbaksnevndin | 29.03.2017 | 2/17 | 14/00417-16 |
| 11 Kaldbaksnevndin | 25.10.2017 | 8/17 | 14/00417-16 |
| 12 Kaldbaksnevndin | 04.04.2018 | 2/18 | 14/00417-16 |
| 13 Kaldbaksnevndin | 04.09.2018 | 6/18 | 14/00417-16 |
| 14 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 281/19 | 14/00417-16 |
| 15 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 273/19 | 14/00417-16 |
| 16 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 248/19 | 14/00417-16 |

**Málslýsing:**

**Fimleikahøll til skúlan í Kaldbak**

**Kaldbaksnevndin 19. mai 2010:** Nevndin ynskir at fáa eina fimleikahøll til skúlan, sum eisini kann brúkast til ítrótt, ítriv og sum borgarahús.

**Kaldbaksnevndin 24. november 2010:** Borgarstjórin beinir málið í mentamálanevndina.

**Kaldbaksnevndin 22. februar 2012:** Ynski er framhaldandi um at fáa eina politiska viðgerð av málinum, við tí fyri
**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa á, at eingin peningur er avsettur á íløguætlanini.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Samtykt at heita á umsitingina um at kanna møguligan tørv á fimleikahøll/felags hølum í bygdum kommununnar.
eyga at fáa málið raðfest á eini langtíðaríløguætlan.

**Kaldbaksnevndin 29. mai 2012:** Borgarstjórin beinir málið í mentamálanevndina til víðari viðgerð.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið áheitan um at kanna møguligan tørv á fimleikahøll/felagshúsum í bygdum kommununnar. Bygdirnar Kaldbak, Nólsoy og Velbastað eru ymiskt fyri í mun til innandura ítróttaumstøður og almenn felags- ella bygdahús, sum ikki eru átrúnaðarlig samkomuhús. Harumframt eru kommunalir skúlar og dagstovnar.

Í nógvum bygdum verða felagshús nýtt til størri samkomur so sum brúdleyp, ervi, føðingardagar, bygdastevnur o.a.. Hesi felagshús eru oftast skipað av einum felag, tað veri seg bygdafelag, ítróttafelag, dansifelag osfr., sum eigur og rekur húsið, aloftast við sjálvboðnari megi. Í Havn eru nøkur kommunal býlingshús, sum í ávísan mun hava somu funktiónir.

Á Velbastað er felagshús, men eingin fimleikahøll. Í Nólsoy er felagshús og ein lítil fimleikahøll í skúlanum. Harumframt stendur ein grund til svimjihyl. Í Kaldbak er eingin fimleikahøll og einki felagshús.

Umsitingin skilur áheitanina soleiðís, at ynskt verður tilfar til víðari støðutakan um ætlan at byggja ella betra um felagsumstøður til innandura ítrótt og fjøltáttað felags tiltøk og virksemi í nevndu bygdum.

Til tess skal gerast ein tørvsgreining. Harumframt er neyðugt við uppskotum til, hvussu hetta best kann loysast í ymsu bygdunum í mun til funktiónir, og hvussu hetta í skitsum kundi tikið seg út, har talan er um at byggja nýtt. Gerast skal meting um íløgutørv og eftirfylgjandi rakstrarkostnað. Eisini er neyðugt at fáa lýsing av, hvussu verandi felagshús og karmar annars eru skipaði í dag – privat og kommunalt, og uppskot til, hvussu hetta eigur at verða skipað í framtíðini eisini við atliti at, hvussu hetta er skipað aðrastaðni í kommununi.

Sum tað áður er gjørt vart við, so er eingin játtan sett av á íløguætlanini til hetta endamál. Mett verður neyðugt at fáa uttanhýsis ráðgeving at standa fyri omanfyri lýstu tørvsgreining. Mett verður, at hóskandi upphædd er kr. 300.000. Skal tørvsgreiningin fremjast eftir hesum leisti, er neyðugt at flyta játtan frá øðrum verkætlanum. Uppskot er at flyta játtan frá ætlanini at byggja svimjifelagnum felagshøli L57009, tí mett verður, at hetta kann takast við í ætlanina at byggja nýggja svimjihøll L57015.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 300.000 til felagshús í bygdum kommununnar av íløgukontu 5775 ítróttaanlegg, L57009 svimjifelagið hølir.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 12. september 2012:** Borgarstjórin kunnaði um, at málið er viðgjørt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini, har tað verður mælt býráðnum til at játta kr. 300.000 til at gera tørvsgreining viðvíkjandi felagshúsum í bygdum kommununnar.

Staðbundnu limirnir hildu ikki, at tørvur var á tørvsgreining, men at peningurin heldur skuldi verið brúktur til at gera høllina í Kaldbak.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 1. november 2012:** Jan Christiansen ynskti at fáa soljóðandi broytingaruppskot *ført í protokol: Jan Christiansen mælir til at samtykkja at taka undir við býráðnum 13. september 2012, men at játtanin verður brúkt til gerð av fimleikarhøll í Kaldbak.*

*Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti.*

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen og Anfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Kaldbaksnevndin 3. desember 2012:** Borgarstjórin kunnaði um støðuna í málinum**.**

Ískoyti:
Staðbundnu limirnir spyrja hvussu gongur við arbeiðinum.

**Kaldbaksnevndin: 20. februar 2013:** Borgarstjórin kunnaði um at málið liggur í mentamálanevndini. Rykt verður eftir málinum viðv. fimleikahøll í Kaldbak.

**Mentamálanevndin 27. februar 2013:** Málið varð umrøtt og útsett. Semja varð um at viðgera málið saman við framtíðar íløguætlanini.

**Kaldbaksnevndin 27. november 2013:** Nevndin heitir á mentamálanevndina um at taka málið uppaftur soleiðis at gongd kann koma á málið.

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa á, at eingin peningur er avsettur á íløguætlanini. Vísandi til býráðsamtyktina 1. november 2012 eigur støða at takast til, hvørt arbeiði skal setast í gongd fyri nevndu játtan.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at gera tørvslýsing viðvíkjandi trivnaðar/-virksemishúsum í nevndu bygdun fyri játtaðu upphæddina.

**Kaldbaksnevndin 26. februar 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Gunnar Djurhuus, vinnu- og økissamskipari, kemur á fundin at greiða frá tørvskanning.

**Mentamálanevndin 07. april 2015:** Gunnar Djurhuus, vinnu- og økissamskipari, kunnaði um tørvskanningina.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge biður um at fáa málið á skrá.

**Mentamálanevndin 03. juni 2015:** Málið varð umrøtt og verður sett á skrá ein av komandi fundum.

**Ískoyti:**
Til tess at gera eina fimleikahøll í Kaldbak er neyðug við meiri lendi. Talan er um lendi í bólki B í byggisamtyktini fyri Kaldbak, og kann nýtslustigið ikki fara upp um 0,30. Verandi lendi hjá skúlanum er ov tepurt, og er tí neyðugt at fáa meiri lendi til vega til at byggja á og til

parkeringspláss. Mest upplagt er at fáa lendi til vega vestanfyri Kaldbaks skúla framvið Krossgøtu og í øðrum lagi norðanfyri skúlan. Talan er um lendi í bólki D í byggisamtyktini, har nýtslustigið ikki má fara uppum 0,30. Leysliga mett verður ein komandi fimleikahøll umleið 400 $m^2$, alt eftir hvussu bygt verður og møgulig sambygging við skúlan. Tí verður mett neyðugt at útvega umleið 1500 $m^2$ av lendi. Talan er um landsjørð og skal tí samráðast við Búnaðarstovuna um málið.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Búnaðarstovuna um at ogna sær umleið 1500 $m^2$ lendi til fimleikahøll og venda aftur við einum avtaluuppskoti. Málið verður beint í fíggjarnevndina.
Mentamálanevndin 02. marts 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Kaldbaksnevndin 27. april 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur havt samráðingar við Búnaðarstovuna um lendi í bygdini. 29. september 2016 fekk Tórshavnar kommuna skriv frá Búnaðarstovuni við fyribils tilsøgn um lendi til ynskta endamálið.

Víddin sum partarnir eru komnir ásamt um eru 1700 $m^2$. Hetta var mett sum mest upplagda støddin í mun til økið, lendið vm.

Samlaði kostnaðurin fyri lendið verður kr. 215.915.

Á projektkonto L57018 eru kr. 300.000 tøkar til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka av tilboðnum á kr. 215.915 sum lýst í fyribils tilsøgnini frá Búnaðarstovuni dagfest 29. september 2016. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eyka ískoyti:**
Eftir at fyrra tilmælið var skrivað og tilsøgn komin frá Búnaðarstovuni, hevur bóndin/festarin mótmælt ætlanini vestanfyri og mælir til lendið norðanfyri í staðin og um tað ikki verður gjørt fer hann at kæra málið til landbúnaðarstevnu. Bóndin sigur at lendið vestanfyri er góður maskinbøur og tískil ein missur fyri sláttur.

Umsitingin er í holt við at finna fram til staðseting og stødd á einum stykkið norðanfyri og kann til ein fund í heyst fund helst verða komin á mál ella áleiðis við samráðingunum um tað.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálnevndini til at halda fast við at keypa lendið vestanfyri og í øðrum lagi at umsitingin fær til vega uppskot til loysn norðanfyri skúlan.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Ein meiriluti Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Vegna brákomnar nýggjar upplýsingar í málinum, tekur ein minniluti, Jógvan Arge, støðu á seinni fundi

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at heimila umsitingini at samráðast um at keypa lendið vestanfyri.

**Kaldbaksnevndin 24. oktober 2016:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Umboð frá umsitingini koma inn at greiða frá málinum.

**Kaldbaksnevndin 29. mars 2017:** Borgarstjórin mælir til at taka ein fund við bóndan og kaldbaksnevndina á einum eykafundi.

**Kaldbaksnevndin 25. oktober 2017:** Økissamskiparin og onnur hava havt fund við bóndan, men hann vil ikki selja. Arbeitt verður víðari við somu loysn og øðrum alternativum.

**Kaldbaksnevndin 04. apríl 2018:** Borgarstjórin heldur at arbeiðast skal við at ognartaka økið innan fyri skúlan.

**Kaldbaksnevndin 04. september 2018:** Umboð frá løgdeildini og mentamáladeildini greiddu frá málinum og seta seg í samband við festaran skjótast gjørligt og kanna eftir um eitt e.v.t. makaskifti.

**Ískoyti:**
Búnaðarstovan hevur givið kommununi tilsøgn um keyp av lendi vestan fyri skúlan. Talan verður um at keypa uml. 1.000m2. Mettur keypsprísur íroknað frábýtingar-útreiðslur, sakargjald og tinglýsing er uml. 135 tkr.
Festarin missir gott dyrkilendi og leggur upp til, at hann fær eitt endurgjald, sum hann kann brúka til at velta annað lendi.
Búnaðarstovan hevur saman við festara gjørt eina veltiætlan av lendi, sum umfatar umvælingar í bønum á matr. nr. 22a, Kaldbak. Talan er um bøin oman fyri koyrivegin oman fyri kirkjuna og nýggja kirkjugarðin.

Mettur kostnaður uml. 44 tkr.

Samlaður kostnaður fyri keyp og endurgjald verður tá uml. kr. 180 tkr.

<u>Fígging</u>
Í máli 14/02822 Útiøki hjá skúlum í Tórshavnar kommunu samtykti mentamálanevndin í ár at játta 305 tkr. til útiøkið hjá skúlanum og í fjør 50 tkr. Av hesi upphædd eru uml. 322 tkr. ikki nýttar enn. Samstundis er komið eitt gott spælipláss í bygdini skamt frá skúlanum. Tí metir umsitingin, at spæliplássverkætlanin tolir, at 180 tkr. verða umraðfestar til útvegan av lendinum til fimleikahøll. Skúlaleiðarin í Kaldbaks skúla tekur undir við málinum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at møgulig útvegan av lendi v.m. kann rindast av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

# 249/19 Fjallasúkklufelagið : Umsókn um lendi til fjallasúkklurás

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 168/16 | 15/03842-7 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 177/19 | 15/03842-7 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 276/19 | 15/03842-7 |
| 4 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 249/19 | 15/03842-7 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hjá TK vísti á heysti 2015 á eitt øki í Flatnahaga, sum kundi brúkast til eina fjallasúkklubreyt (sí skjal 15/03842-3, MTB-økiAnalysekort.pdf), ið lýkur altjóða krøvini og kann brúkast til til dømis oyggjaleikir, NM og líknandi kappingar. Felagið hevur síðani, í mai 2016, handað TK ein lýsing av virksemi felagsins og eitt uppskot til staðseting av eini fjallasúkklubreyt. Sí uppskot til fjallasúkklubreyt (skjal 15/03842-6, Fjallasúkklubreyt.pdf). Ætlanin er, at rásin skal brúkast bæði til kappingar á høgum støði og til óroynd. Fyri at skapa eina súkklurás, sum lýkur altjóða krøvini, ætlar felagið at brúka serfrøði útifrá. Rásin verður lagað eftir lendinum og arbeiðið verður skipað í tøttum samstarvi við Tórshavnar kommunu. Rásin kann byggjast út og gerast partur av einum størri fjallasúkkluøki. Partar av lendinum, sum felagið hevur umbiðið, er lagt út til annað endamál. Skal kommunan brúka lendið til annað virksemi, má rásin víkja. Brúkararnir av økinum verða kunnaðir, um tikið verður undir við uppskotinum, t.e. ríðifeløgini, Landsverk og leigarin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna staðsetingina av rásini. Samstundis verður mælt til, at løgdeildin ger uppskot til sáttmála millum Tórshavnar Kommunu og Fjallasúkklufelagið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Fjallasúkklufelagið var á fundi við býarskipanardeildina 13.06.2019, har broytt uppskot til fjallasúkklubreyt varð lagt fram.
Fjallasúkklufelagið stendur sjálvt fyri arbeiðinum við sjálvbodnari arbeiðskraft. Tey gjalda sjálvi kostnaðin. Tó skal væntast, at tey fara at søkja um játtan til verkætlanina, tá arbeiðið fer í gongd.
Sí skjal: 15/03842-17 2019-06-13 framløga fyri TK
Ætlanin er broytt nakað í mun til hana, ið varð viðgjørd 7. juni 2016.
Býarskipanardeildin tekur undir við uppskotinum hjá fjallasúkklufelagnum, og hevur gjørt vart við, at tey mugu samskipa virksemið við Føroya Ríðingafelag, sum er nærindis økinum.
Uppskot til brúksavtalu er gjørt, og verður við hesum lagt til gókenningar.

**Skjøl:**
**15/03842-17** *2019-06-13 framløga fyri TK*
**15/03842-19** *Brúksavtala Fjallasúkklufelagið*

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at taka undir við ætlanini hjá Fjallasúkklufelagnum, og brúksavtaluni millum partarnar, treytað at loyvi fæst frá avvarðandi myndugleikum og festara, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Fjallasúkklufelagið var á fundi við býarskipanardeildina 13.06.2019, har broytt uppskot til fjallasúkklubreyt varð lagt fram.
Fjallasúkklufelagið stendur sjálvt fyri arbeiðinum við sjálvbodnari arbeiðskraft. Tey gjalda sjálvi kostnaðin. Tó skal væntast, at tey fara at søkja um játtan til verkætlanina, tá arbeiðið fer í gongd.
Sí skjal: 15/03842-17 2019-06-13 framløga fyri TK
Ætlanin er broytt nakað í mun til hana, ið varð viðgjørd 7. juni 2016.
Býarskipanardeildin tekur undir við uppskotinum hjá fjallasúkklufelagnum, og hevur gjørt vart við, at tey mugu samskipa virksemið við Føroya Ríðingafelag, sum er nærindis økinum.
Uppskot til brúksavtalu er gjørt, og verður við hesum lagt til gókenningar.

**Skjøl:**
**15/03842-17** *2019-06-13 framløga fyri TK*
**15/03842-19** *Brúksavtala Fjallasúkklufelagið*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at taka undir við ætlanini hjá Fjallasúkklufelagnum, og brúksavtaluni millum partarnar, treytað at loyvi fæst frá avvarðandi myndugleikum og festara, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

## 250/19 Gøtan kring Havnina og fiskastykkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 175/17 | 17/02247-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 246/17 | 17/02247-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 56/17 | 17/02247-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.11.2017 | 54/17 | 17/02247-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 306/17 | 17/02247-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 308/17 | 17/02247-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 177/18 | 17/02247-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 56/18 | 17/02247-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 74/18 | 17/02247-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 251/18 | 17/02247-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 374/18 | 17/02247-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 358/18 | 17/02247-1 |
| 13 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 320/18 | 17/02247-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 17/19 | 17/02247-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 153/19 | 17/02247-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 242/19 | 17/02247-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 278/19 | 17/02247-1 |
| 18 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 250/19 | 17/02247-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við eini ringrás kring Havnina. Ringrásin er eitt áleið 35 km langt gøtu- og vegasamband, sum liggur í landslagnum kring býin. Hugskotið er at leiða borgaran og ferðafólk út í náttúruna umframt at skapa søguligar og mentanarligar upplivingar á leiðini.

Ringrásin er eitt samanhangandi strekki, sum fevnir um seks styttri og longri leiðir við hvør sínum serliga eyðkenni - frá miðbýnum og niðan í fjallalendið. Ringrásin bjóðar tí náttúrupplivingar við rørslu og útsýni umframt upplivingar fram við bygdum øki, har surrandi býarlívið skilur seg týðiliga frá tí opna landslagnum. Landslagið er sermerkt við jørð, vatn og vindi, ið avgjørt setur sín dám á leiðina.

Ringrásin tillagar seg landslagið, og fylgir so vítt møguligt verandi vegum og gøtum, sum tilsamans telja 25 km av leiðini.

**Gøtan millum bý og hav**
Sum ein liður í heildarætlanini av ringrásini er uppskot at gera gøtu fram við strondini Yviri við Strond. Hugsanin er at skapa eitt samband frá Skansanum og niðan til Boðanes, har fólkið kann flyta seg burtur frá einum vegastrekki við nógvari ferðslu og tættari at náttúruni. Harafturat kann kommunan verja landslagið við at leiða fólk, hvar tey skulu ganga, hetta eisini í mun til vaksandi ferðafólkatalið.

Væl vitandi um, at hav og vindur setur sín dám á strondina, vil leiðin ikki altíð vera atkomulig, tá sjógvur skolar inn yvir. Arbeiðast skal við eini ítøkiligari ætlan, ið nemur við tilfarsval í mun til vatnføri, og hvussu sniðgivið verður við virðing fyri náttúruni.

**Fiskastykkið**

*Yviri við Strond er einasta fiskastykkið, sum eftir er í Havn. Hetta eigur at verða varðveitt og atkomuligt fyri almenningin.*

Leiðir leggja seg eftir, hvar menniskjan hevur havt ávirkan á landslagið. Hetta kemur m.a. til sjóndar í søguligum og mentanarligum slóðum. Eitt dømi um hetta er fiskastykkið Yviri við Strond, ið liggur á leiðini frá Skansanum til Boðanes. Økið varð nýtt til fiskaturking, eisini nevnt fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu.

"Helst eru tey farin at turka fisk á stykkinum yviri við Strond í seinnu helvt av 1920-árunum, ella kanska fyrst í 1930-árunum. Sostatt var virksemið hjá fyritøkuni stutt har yviri.
*Í 1934 søkti Johannes í Stórustovu um loyvi at byggja eitt pakkhús "ved Torgard anlagte Fisketørreplads har jeg tænkt mig opført midlertidig Fiskehus..." Byggiloyvið varð latið honum (Th. Bygningskommision, j. no. 32/1934) V.ø.o. hava tey turkað fisk á hellu og tí steinsetta lendinum á leigutrøðni hjá Johannesi, áðrenn húsið varð bygt. Ein abbasonur Johannes í Stórustovu, Johannes Jacobsen, f. 1935, vanliga nevndur Hannis í Stórustovu, veit at siga, at húsini, sum standa í dag, har feløgini Føroya Ellisakfør og Føroyskir Radioamatørar halda til, eru tey somu húsini, sum vórðu bygd til endamálið á sinni, men eru tó umvæld seinni..."*

Sí søguliga lýsing av fiskastykkinum í skjalinum "Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu". Verandi støða á fiskastykkinum í dag, er hin sama, sum lýst verður í skjalinum, og stendur soleiðis skrivað:

*"...Uttanfyri síggjast enn sjónligu sporini eftir gamla "Bukkvald", og longur uppi er tjaldingarplássið, har fremmandir gestir halda til um summarið. Framvið fjøruna og suður móti Tórgarðstanga, har fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu er, síggjast stórir tyrvdir dungar av alskyns tilfari, asfalt, betong og yvirskotsgróti. Hetta er til lítlan sóma fyri umhvørvið harúti. Fjøran er sum øllum kunnugt friðað, og nú átti tíðin verið búgvin at rudda økið. Undir hesum dungum eru uttan iva eisini leivdir av steinsetta fiskastykkinum.
Á fiskastykkinum liggur antennuútbúnaður, og har hevur tað ligið leingi. Niðriundir húsinum, oman móti fjøruni, stendur onnur útgerð og rustar. Hetta átti avvarðandi kommunalu myndugleikin, sum eigur og umsitur ognina, at síggja til at fáa beint burtur..."*

*"...Sum greitt frá omanfyri átti lendið við Tórgarðstanga at verið ruddað. Tað steinsetta lendið er í støðum vorðið meira ójavnt. Tað er farið av tíðarinnar tonn. Hømilia og illgras skora seg upp millum steinarnar, brotnar fløskur liggja og sløðast..."*

Økið fevnir um 11 matriklar, ið eru ogn hjá Tórshavnar kommunu, Føroya Landsstýri og privatum eigarum.

Fyri at fara undir verkætlanina, gøtu og fiskastykkið, er neyðugt at gera avtalur við avvarðandi eigarar og leigarar og at fáa loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Leigusáttmáli er við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør.

Á sumri 2017 var verkætlanin um "Tórsstien" løgd fram, sum starvsnæmingar gjørdu á býarskipanardeildini. Uppskotið er gott grundarlag at arbeiða út frá, og skal ein ítøkilig ætlan gerast, sum í høvuðsheitum fevnir um at rudda økið, gera gøtu og uppskot til skipan av fiskastykkinum og øðrum hóskandi mentanarsøguligum minnum og útsýnisstøðum á strekkinum Yviri við Strond. Mælt verður somuleiðis til at ein ítøkilig ætlan verður gjørd í stigum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Økið fram við strandarlinjuni Yviri við Strond liggur í umráðispartinum D1, umframt at ein partur av økinum liggur í B6 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál og tílíkt. Um at skipa gøtur í B6 skal loyvi fáast frá eigarunum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið um varðveitan av nevnda fiskastykki varð reist í 1992. Økið varð skrásett og ein ítøkilig ætlan varð gjørd um at hampa økið og harnæst at varðveita fiskastykkið. Harafturat varð mett frá einum frílendissjónarmiði, at økið av Skansanum - ella Eystfalsskeri og niðan á Boðanes – átti at fatast sum ein heild, og tí er fiskastykkið yviri á Tórgarði áhugavert og hevur sjálvsagdan søguligan týdning. Málið var fyri í mentamálanevndini í 1995, men har kom tað ikki longur.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Økið er friðað sambært lóg um náttúrufriðing.

**Umhvørvisárin**
Mett verður ikki, at gøtan fer at hava serligt árin á umhvørvið.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Krøv frá eigarum og brúkarum av lendinum og ætlanarkostnaður.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ymisk viðurskifti framvið strond skulu gerast í samráð við mentamáladeildina.

Húsaumsitingin metir bygningin ikki vera í góðum standi, og mælir til, at bygningurin verður tikin niður.

Býarverkfrøðingurin tekur undir við ætlanini treytað av, at nýggj staðseting verður funnin til Reinhaldið til at umskipan av sópingarmaskinunum. Og atlit skulu takast til kloakkviðurskifti á staðnum.

**Skjøl:**
Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu, journal nr. 17/02247-2
*Tórsstien,* journal nr. 17/02247-3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at byrja at gera ítøkiliga verkætlan og at fara í samráðingar við avvarðandi myndugleikar og eigarar umframt at játta kr. 1 mió. av íløgunum fyri 2018 til verkætlanina og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Tikið verður undir við byggi- og býarskipananevndini.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, mentamálanevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti – kunning um verkætlanina:**
Fundur hevur verið við Ólav Frederiksen, formann hjá Føroyskum Radioamatørum,
um at fara í holt við at rudda fiskastykkið og at bjóða økið út til uttanhýsis ráðgeva at koma við uppskoti til, hvussu økið kann gerast til eitt uppihaldsstað, har ljós er varpað á søguna á økinum.
Sambært Ólav hevur felagið onga stórvegis útgerð á fiskastykkinum, og verkætlanin fer ikki at ávirka virksemið hjá felagnum. Ólavur viðmerkir tó, at tað hevði verið tryggast, um onkur forðing varð gjørd millum fiskastykkið og restina av matriklinum, soleiðis at vitjandi ikki fara inn á økið, har allir káplarnir liggja. Sí Fundarfrásøgn Fiskastykki, journal nr. 17-02247-25.

Umsitingin hevur móttikið skipanaruppskot til, hvussu fiskastykkið kann koma at síggja út og uppskot uppá hvussu verkætlanin kann býtast upp í átøk og byggistig frá ráðgeva EYA v/Eyðun Eliasen. EYA hevur tillagað uppskotið eftir kunning frá Ólavi sí Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, journal nr. 17-02247-26.

**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Uppskotið fevnir um økið frá norðanfyri vegnum móti campingøkinum og vegnum út á Bukkvald og suðurum lítlu "víkina" við matrikulmarkið (sí s. 12 í uppskotinum). Í skipanaruppskotinum verður mælt til at byggja uppá og fríðka um verandi øki við at:

- leggja tilfar afturat verandi rúgvu av mold, grasi o.l. fyri at gagnnýta økir við lívd, útsýnislinjum og sólargangi.
- reinsa og á summum støðum umvæla steinsetingina á Fiskastykkinum.

Í uppskotinum verður dentur lagdur á at geva vitjandi á fiskastykkinum best møguligu lívd. Uppskot er tí um at gera tvey innvik í skulpturellum skapi, sum vitandi kunnu uppihalda seg í. Innvikini verða skorin inn í steinlaðingina og helluna á Fiskastykkinum. Fyri at fólk skulu trívast á einum útiøki sum hesum, er týdningarmikið at økið ikki er ov vítt. Tí er dentur lagdur á at gera "verjugarðar" móti vestri, norðri og eystri á ovara partinum av fiskastykkinum. Eftir at økið er ruddað og nærri skrásett, verður støða tikin til, hvussu langt suðureftir tað broytta fiskastykkið skal fara. Skráarnir á økinum verða klæddir við timburbrettum, so hallið ikki verður ov stórt. Hetta ger tað eisini møguligt at skapa eina farleið, sum kann knýtast at ætlaðu 'Gøtuni kring Havnina'.
Uppskotið fevnir eisini um at gera parkeringsøkið har sum Reinhaldið heldur til í dag og at nýta asfaltrúgvuna móti sjónum til at geva lívd.

Harafturat verður eitt ítøkiligt átak skotið upp, ið snýr seg um at umskapa bygningin á ognini til endamál, sum hava tilknýti til fiskastykkið ella líknandi evni. Talan kann vera um eitt savn við framsýningum um fiskavinnu og –yrki og/ella eina matstovu, sum borðreiðir við saltfiskavørum. Hugskotið er sera áhugavert, men umsitingin metir, at tað verður torført og sera dýrt fyri Tórshavnar kommunu at flyta føroyskar radioamatørar, ið leiga matrikulin, á

annað øki. Leigusáttmálin millum Føroyskir Radioamatørar og Tórshavnar kommunu er galdandi til 2029. Sambært Radioamatørunum eru káplar blivnir lagdir á lendið gjøgnum eitt langt áramál, og eru sera nógvir arbeiðstímar lagdir í hetta arbeiði. Káplarnir liggja sum eitt eiturkoppanet á einum stórum parti av økinum, og tað er nærum ómøguligt at flyta ella taka káplarnar uppaftur.

Uppskotið fevnir um 8 byggistig (sí s. 17 í uppskotinum). Umsitingin mælir til, at farið verður ígongd við at bjóða byggistig 1, 3, 4 og 8 út til ávikavist ráðgeva og tilboðsgeva at menna. Sí byggistig niðanfyri.

1. Skráseta økið neyvari fyri møguligar leivdir, lutir o.a.

3. Rudda alt økið. Fyrst leyst tilfar og órudd og síðan mold og óegnað gróttilfar o.a.

4. Gera og góðkenna endaligu verkætlanina og fáa loyvi frá friðingarmyndugleikum.

8. Bukkvald-verkætlanin gerast so hon eisini gerst ein natúrligur partur av økinum.

Umsitingin fer í næstum at finna nýggja staðseting til Reinhaldið.

**Skjøl:**
Fundarfrásøgn Fiskastykki, Journal nr.17-02247-25
Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, Journal nr. 17-02247-26

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður uppskotið uppá verkætlanina og beinir málið í teknisku nevnd til kunningar, umframt at umsitingin fer undir at seta ymisku átøkini í verk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti – nýggj staðseting til Reinhaldið**

Saman við teknisku deild hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot um nýggja staðseting til umlastuplássið hjá reinhaldinum í Gundadali.

Smáu feiu-bilarnir eru ikki egnaðir at koyra langar teinar, og arbeiðsfólk við trillubøru skulu sleppa av við ruskið uttan at skula ganga ov langt, tí er týdningarmikið at nýggja staðsetingin er nærhendis miðbýnum. Hugskotið er at savna øll umlastuplássini hjá reinhaldinum í Gundadali. Hetta merkir, at umlastuplássini á Skálatrøð og á Bukkvald verða flutt, og at hesi øki tí eisini verða tøk til framtíðar verkætlanir.

Uppskot upp á staðseting í Gundadali eru gomlu vaskiplássini hjá bilstøðini Bil, sum Tórshavnar kommuna er eigari av. Neyðugt verður at tillaga plássini til bingjur og gera vaskipláss við oljuútskiljara. Ein gamal oljuútskiljari er á plássinum, men um hesin kann brúkast má eftirkannast. Um tangin ikki kann brúkast, kann oljutangin á Bukkvald blíva tikin upp og staðsettur í Gundadali. Fólk frá Tórshavnar kommunu er frammanundan í Gundadali og rudda aftaná landsdystir og sunnudagsdystir. Tí er upplagt, at sameina hetta virksemið við umlastuplássið hjá Reinhaldinum og skipa alt hetta í Gundadali.

Fyri at plássið skal verða til so lítlan ampa fyri grannar, virksemi og vitjandi á økinum sum gjørligt, er neyðugt at gera ein uml. 2 m høgan garð uttan um plássið. Plássið liggur beint uppat einum grønum kliva av runnavøkstri, og tí vildi tað verið upplagt at plantað runnar uppat garðinum, soleiðis at plássið verður betri sameina við verandi øki. Sum sæst á Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf journal nr. 17/02247-30, rennur Havnará vestan fyri plássið og mælt verður til at plássið verður flutt 2,5 m eystureftir burtur frá ánni og 0,5 m frá vegnum. Fyri at sleppa undan at hava inn- og útkoyring frá Gundadalsvegnum, verður mælt til at eitt automatiskt portur verður sett á eystaru síðu av plássinum, soleiðis at feiu-bilarnir kunnu koyra inn millum bingjurnar til tøming og vaskiplássið og at lastbilur kann koyra inn fyri at heinta bingjurnar. Samanlagt verður plássið uml. 250 fermetrar.

Kostnaðurin fyri at fyrireika verandi pláss á Bukkvald var uml. kr. 350.000. Av hesum plássi kann oljuútskiljari og skúrur brúkast aftur í Gundadali og harafturat kemur so garðurin.

**Skjøl:**
17/02247-30 Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekurin mæla til at samtykkja nýggja staðseting av umlastistøð til reinhaldið í Gundadali, at játta 350.000 kr. av L62032 Gøta kring Havnina og Fiskastykkið til flytan av verandi umlastistøð Yviri við Strond niðan í Gundadal, at beina málið í mentamálanevndina til kunningar og síðani í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyri at koma víðari við ringrásini/gøtuni kring Havnina og kunna byrja uppá strekkið Yviri við Strond, er neyðugt at fara í samráðingar við traðareigararnar (matrikuleigarar), umframt leigararnar av kommunalu stykkjunum.

Størsti partur av matriklunum Yviri við Strond er privatogn, tí verður viðmælt, at hvør einstaki eigari verður innkallaður til ein kunnandi fund við tí fyri eyga at finna eina loysn, ið báðir partar kunnu semjast um.

Væntast kann, at samráðingartíðin verður nakað drúgv. Væntast kann somuleiðis, at ikki allir matrikuleigarar eru eins jaligir fyri tankanum, um at fáa eina gøtu ígjøgnum teirra lendi, og kunnu tí spenna føtur fyri ætlanini ella krevja endurgjald fyri miss av lendi.

**Samandráttur av uppskotið frá SNA:**
Fyri jól lat umsitingin SNA uppgávuna at gera uppskot til staðseting av gøtuni frá Skansanum yvir til Boðanes, umframt staðsetingina skuldi uppskotið fevna um snið av gøtuni.

Uppskotið frá SNA fevnir um strekkið Yviri við Strond, og verður gøtan á hesum strekkinum kallað Strandargøtan. Gøtan strekkir seg góðar 2,5 km frá Skansanum og til Boðanes.

Uppskotið leggur dent á, at Strandargøtan leggur seg eftir landslagnum og er staðsett á markinum millum fjøruna og bøin. Hetta fyri at geva tí vitjandi møguleika at uppliva náttúruna, bøin, fjøruna og brúsandi havið.

Gøtan í sær sjálvum vísir á, at tað menniskjaliga er tilstaðar í økinum, millum land og hav. Hetta sæst aftur í støddarlutfallinum á gøtuni, har mát sum favnur, alin, føtur og tummar verða nýtt gjøgnum alla gøtuna. Hetta styrkir tankan um at gøtan er ein menniskjansskapur bulur, ið er skolaður uppá land, samstundis sum at gomlu máteindirnar verða varðveittar.

Tilfarsvalið verður rátt og einkult, sjálv gøtan kemur at liggja sum ein betong strukturur við eini stálrammu/veggi, men har verða økir, ið verða meir rúmlig og viðgjørd úr øðrum tilfari, so sum timbur, innstoyptir flísar í ymiskum litum og ljósi.

Ynski er, at gøtan minst møguligt er til ampa fyri lendið, tí kemur betongflísin at hava føtur, ið kunnu javnast eftir lendinum, haraftrat verða ljós innleggingar gjørdar, so gøtan verður upplýst.

Á strekkinum verður tann vitjandi kunnaður um áhugaverd støð á strekkinum, har tað er upp lagt at steðga á, og verða hesi steðgiplássini gjørd við bonkum til lívd, kagstøðum, brúgvum o.ø.
Dentur er lagdur á at uppliva skifti í landslagnum, sum at fara frá fjøru til hellu, vøkstur o.a. hetta sæst aftur í sjálvari gøtuni við at ymiskt tilfar verður nýtt sum bindiliður á gøtuni.

Sambandið oman til Strandargøtuna er raðfest við at leggja smáar gøtur úr løgasteinum ígjøgnum summar traðir.

**Fiskastykkið**
Ráðgevarafyritøkan EYA arbeiðir við fiskastykkinum, og í løtuni eru tey í samráðingum við Tjóðsavnið, har uppruna uppskotið verður tillagað. Meir kunning um verkætlanina Fiskastykkið kemur seinni.

**Átøk:**
Neyðugt er at fara í samráðingar við matrikuleigararnar fyri at finna eina loysn, ið hóvar øllum pørtum. Síðani skal Strandargøtan projekterast og setast í verk.

**Skjøl:**
- *Strandargøtan síður A3 print, journal nr. 17/02247-37*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at byrja samráðingar við traðareigararnar og einstøku leigararnar av kommunalu traðunum, fyri síðani at koma aftur í nevndina við einum ítøkiligum úrskurði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
<u>Skráseting av djóra og plantulívi:</u>
Umsitingin hevur havt fundir við Tjóðsavnið um verkætlanina, og eru komin ásamt um at gera eina skráseting av djóra- og plantulívi á økinum, har gøtan er ætlað. Skráseting av djóralívi verður í eitt ár, og plantuskrásetingin á vári og summari.
Við hesum kann metast um møgulig umhvørvisárin av gøtuni sum frálíður.
Báðar kanningarnar eru farnar í gongd og er avtalað við Tjóðsavnið, at hava ein støðufund í vetur um gongdina, og innkomin úrslit av skrásetingini.

<u>Gøtan kring Havnina:</u>
Umsitingin hevur á vári í 2019 verið í samráð við traðareigararnar og einstøku leigararnar av kommunalu traðunum, og greitt teimum frá ætlanunum, ið Tórshavnar kommuna hevur í økinum. Samráðingarnar hava gingið væl og samanumtikið hevur undirtøkan verið positiv. Viðmerkingar av ymiskum slagi hava verið, og eru tær tiknar við í víðari viðgerðina av málinum.
Uttanhýsis ráðgevi hevur gjørt uppskot til loysn av elementum, sum skulu byggjast framvið sjóvarmálanum sum gøta.

<u>Royndarverkætlan:</u>

Ætlanin er gera element at byggja gøtuna upp við. Loysnin við elementum ger tað, at lendisviðurskiftini í fjøruni verða órógvað sum minst. Tilfarið av elementunum verður ymiskt, alt eftir hvussu økið er.
Í fyrsta umfari er ætlanin at gera eitt strekki við 3 ymiskum royndarelementum á matr.nr. 651l og 651b, so elementini kunnu roynast í ein vetur, og loysnin kann eftirmetast, áðrenn farið verður víðari.
Matr.nr. 651l og 651b, er ogn hjá Tórshavnar kommunu og verða nýtt til parkering. Royndarelementini verða lætt atkomilig, og koma ikki at órógva verandi virksemi á økinum.

Arbeiðstakarar eru ikki áhugaðir at geva tilboð uppá royndarelementini, men mett verður, at royndarelementini kunnu framleiðast og monterast á staðnum fyri 0,6 mió. kr.

**Skjøl:**
*17/02247-37 Strandargøtan síður A3 print*
*17-02247-76 K100_Betongelement_strandagøta*
*17-02247-76 gøta skitsa*
*17-02247-76 gøta perspektiv*

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at seta fyribils ætlanina við gøtuelementum í verk,
- at játta 0,6 mió. kr. av konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og fiskastykkið,
- at heimila umsitingini at seta royndarverkætlanina í verk
  og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at arbeiðið ikki er boðið út.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt var um tilmæli hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 251/19 Nýggj serstøk byggisamtykt á Lambatrøðni, matr. nr. 157a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 148/19 | 19/02587-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 213/19 | 19/02587-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 251/19 | 19/02587-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsøkjari hevur søkt um at byggja íbúðir á Lambatrøðni, matr. nr. 157a, Argir, og 7. juni 2019 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin at taka undir við ætlanini, og at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

Matr. nr. 157a, Argir liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og sambært ásetingunum kunnu íbúðir loyvast, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talan er um 5 bygningar í 2 hæddum við tilsamans 30 íbúðum. 20 íbúðir verða 72 $m^2$, og 10 íbúðir verða 90 $m^2$ til víddar. Til íbúðirnar á veghædd hoyrir bilskýli til. Fríøkir á tilsamans uml. 490 $m^2$ umframt øki til reinsiverk verður inni á ognini. Eitt p-pláss verður til hvørja íbúð, umframt 14 felags p-pláss.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri A1 øki eru m.a.:
§5, stk. 1. *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

*Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

Stk. 9. *Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild.*

*Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.*

*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Fyrispurningur um fund í sambandi við møguliga bygging av íbúðum á Lambatrøðni, matr. nr. 157a, Argir.* Mál nr. 18/04324.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild: Flyta verandi spillvatnsleiðingar. Hetta verður viðgjørt nærri í tekniska projektinum.
Byggideild: Eingin viðmerking

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt á Lambatrøð*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at góðkenna uppskotið til nýggja serstaka byggisamtykt sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt á Lambatrøð,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá Anniku Olsen um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndin, ið varð einmælt samtykt.

Gunnvør Balle metti seg verða ógegniga og fór av fundinum, Jógvan Arge tók hennara sæti.

Bergun Kass metti seg verða ógegniga og fór av fundinum.

# 252/19 Tillaga umsókn um broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki við matr. nr. 1oe og 139a, Hoyvík. Frá 4. Grundumráði til B7.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 172/19 | 19/03960-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 252/19 | 19/03960-2 |

**Upprunin til málið:**
Eigarin av matr. nr. 1oe, Hoyvík, søkti 16. august 2018 um at broyta almennu byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 3a, Hoyvík frá 4. Grundumráði til B7 øki, í sambandi við at hann ynskti at keypa part av matr. nr. 3a, Hoyvík at leggja saman við ogn síni, sí mál *Umsókn um broyting fyri part av byggisamtyktini fyri matr. nr. 3a, Hoyvík frá 4. Grundumráði til B7 í 3. Grundumráði.*

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 13. februar 2019 ikki at ganga umsóknini á møti, grundað á at ynski er ikki at bygt verður longur út á tromina á økinum á Hjalla og harvið bróta meginregluna um skipanina av økinum, har bygningar og virksemið annars í størstan mun ikki er sjónligt frá Kaldbaksvegnum.

Eftir at avgerðin hjá byggi- og býarskipanarnevndini varð tikin, bað umsøkjarin um ástaðarfund við umsitingina fyri at greiða nærri frá ætlanunum, og hevur síðani sent eina tillagaða umsókn við nærri frágreiðing.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið, sum umsøkjarin ynskir at keypa, liggur ytst á tromini norðureftir, sí skjal *Støðumynd.*

Tá útstykkingin á Hjalla varð planløgd, varð stórur dentur lagdur á at skipa grundøkini soleiðis í lendinum, at bygningarnir og virksemið annars, fylgdi lendinum og í størstan mun ikki skuldu síggjast frá Kaldbaksvegnum. Við nøkrum fáum undantøkum er hetta eydnast sera væl, og vinnuøkið liggur væl fjalt, inntil koyrt verður inn í økið, sí skjal *Raðútsýni1.*

Á ástaðarfundinum, sum varð hildin 7. juni 2019, varð tó greitt, at ein slætti, uml. 20-25 m, er norðanfyri ognina, og av tí at ætlanin er at brúka økið til parkering, hevði virksemið ikki verið sjónligt frá landsvegnum.

Harumframt hevur umsøkjarin fingið ráðgeva, sum hevur gjørt visualiseringar av, hvussu grótlaðingin fram við parkeringsplássinum tekur seg út niðri frá Kaldbaksvegnum, sí skjal *2019.09.20_á Hjalla 10 - parkering* og vísir hendan, at virksemið gerst minni sjónligt, av tí at grótlaðingin fer upp um parkeringsplássið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri 4. Grundumráði eru m.a.:
*§26, stk. 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi*

*Stk. 2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.*

Ásetingar fyri B7 øki eru m.a.:
*§14, stk. 1. Loyvt er einans at byggja hús til stór vinnuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.*

*Stk. 3 Byggingin skal verða sett samsvarandi heildarætlan fyri alt økið ella fyri hóskiligar partar av økinum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tilmælið í hesum málinum er gjørt út frá viðurskiftunum á hesum nágreiniliga staðnum, men eigur almenna byggisamtyktin fyri alt økið at verða dagførd í mun til lendið og matriklar. Hetta verður gjørt í sambandi við endurskoðanina av almennu byggisamtyktini.

Um samtykt verður at broyta byggisamtyktina og at lendið seinni verður selt umsøkjaranum, eigur byggilinja at verða ásett í skeytinum, sum er 12 metur frá markinum móti norðan og 6 metur frá markinum móti eystan.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Umsókn um broyting fyri part av byggisamtyktini fyri matr. nr. 3a, Hoyvík frá 4. Grundumráði til B7 í 3. Grundumráði -* journal nr. 18/03051

*Articon: umsókn um loyvi at víðka parkeringsøkið á matr. nr. 1or á Hjalla,* journal nr. 17/00907.
Umsøkjarin vísir í umsókn síni til omanfyristandandi mál, har ein annar umsøkjari hevur fingið loyvi til at víðka matrikulin norðureftir. Av tí at økið, sum í tí førinum varð keypt, lá í rætta byggisamtyktarøki, varð málið ikki viðgjørt av býarskipanardeildini, og tí verður ikki mett, at málini kunnu samanberast.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggideildin:
- Onga viðmerking.

Tekniska deild:
- Onga viðmerking.

**Skjøl**
*Eftir broyting,* journal nr. 19/03960-4*.*
*Støðumynd,* journal nr. 19/03960-4.
*Áðrenn broyting,* journal nr. 19/03960-4.
*2019.09.20_á Hjalla 10 – parkering,* journal nr. 19/03960-1.
*Raðútsýni1,* journal nr. 19/03960-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu sambært kortskjalinum *Eftir broyting,* journal nr. 19/03960-4, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

# 253/19 Broyting av serstøku byggisamtyktini undir Gráasteini, matr. nr. 1116a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 212/18 | 18/03782-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 277/18 | 18/03782-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 114/19 | 18/03782-1 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 161/19 | 18/03782-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 151/19 | 18/03782-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 211/19 | 18/03782-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 170/19 | 18/03782-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 253/19 | 18/03782-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um at broyta serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 1116a undir Gráasteini, viðvíkjandi íbúðarbyggingini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2017 varð serstaka byggisamtyktin fyri matr. nr. 1116a undir Gráasteini gjørd. Serstaka byggisamtyktin skipaði økið við sethúsum, tvíhúsum og íbúðum. Ásetingar viðvíkjandi bygging var samsvarandi almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, t.v.s. at mest loyvda hædd til mønuna var 9 m. Fyri hús við einvegis takhalli, var mest loyvda hædd 6 m í tí lægru síðuni og 7,5 m í tí hægru síðuni. Sí skjal *serstøk byggisamtykt – áðrenn broyting.*

Eftir at serstaka byggisamtyktin varð gjørd, eru ætlanirnar fyri byggingina av íbúðum broyttar at sindur. Upprunaliga var ætlanin at byggja 5 íbúðareindir í tveimum hæddum, t.v.s. 10 íbúðir íalt. Umsøkjarin søkir nú um at broyta byggisamtyktina, soleiðis at íbúðarbyggingin kann byggjast í trimum hæddum og at mest loyvda hæddin á hesi bygging er 8,5 metur, sí skjal *2018.10.26.Síðumynd.pdf*. Somuleiðis er skipanin av økinum eitt lítið sindur øðrvísi enn upprunaliga ætlað, m.a. við tað at felagsøkið er staðsett aftanfyri nýggja íbúðarbygningin, sí skjal *2018.10.26.Støðumynd.pdf*.

Býarskipanardeildin metir, at tað er ráðiligt at broyta hæddarásetingarnar fyri íbúðarbyggingina í serstøku byggisamtyktini. Tað er stórur lendismunur í økinum, og nýggja útstykkingin liggur væl lægri enn verandi íbúðarbygging við Heimasta Horn. Umsøkjarin hevur sent lendisskurð, sum vísur, at ein íbúðarbygningur, sum er uml. 8,5 metur høgur, ikki kemur hægri upp enn niðasta íbúðin á Heimasta Horni, sí skjal *2018.10.26.Lendisskurður.pdf* og *2018.10.16.Síðumynd.pdf*, og ávirkar tískil hvørki útsýnið ella ljósviðurskiftini hjá aftanfyri liggjandi bústøðum.
Harumframt hevur broytingin við sær eitt líðandi skifti millum lága og høga bygging í økinum – frá sethúsum, til íbúðarbygging í trimum hæddum, til íbúðarbygging í 5 hæddum.

Skipanin av økinum er broytt eitt sindur, og er fríøkið nú staðsett aftanfyri íbúðarbygningin. 27 p-pláss eru á økinum, tvs. 1,8 pr. Íbúð.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og ásetingarnar í økinum eru m.a.:

- *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*
  *Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handalar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

- *Byggistigið má ikki fara upp um 0,3.*

- *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús.*

- *Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

- *Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.*

- *Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.*

- *Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk.5, tá ið økið verður roknað sum heild.*
  *Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.*
  *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetigum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Broytingin í byggisamtyktini er í tráð við bústaðarpolitikkin hjá Tórshavnar kommunu, ið leggur upp til fleiri íbúðir í býnum.

Í sambandi við endaligu matrikulering verður makaskifti framt millum matr. nr. 1116a og 1116b, sí skjal *2018.10.26.Støðumynd.pdf*.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Umsókn um góðkenning av útstykkingarætlan á matr. nr. 1116a, Tórshavn, journal nr. 16/04386.
Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a undir Gráasteini, Tórshavn, journal nr. 17/00503.
Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a undir Gráasteini, Tórshavna, journal nr. 17/00753.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt – áðrenn broyting,* journal nr. 18/03782-2.

*2018.10.26.Lendisskurður.pdf,* journal nr. 18/03782-4.
*2018.10.26.Síðumynd.pdf*, journal nr. 18/03782-5.
*2018.10.26.Støðumynd.pdf*, journal nr. 18/03782-6.
*Serstøk byggisamtykt – broytingar,* journal nr. 18/03782-7.
*Skipan,* journal nr. 18/03782-8.
*Yvirlit,* journal nr. 18/03782-8.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja broytingina av hæddarásetingunum fyri íbúðarbygging í serstøku byggisamtyktini, nýggju skipanina av økinum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at broytingin av serstøku byggisamtyktini hevur ligið til almenna hoyring, frá 14. desember 2018 til 25. januar 2019, hevur Tórshavnar kommuna móttikið 4 mótmæli, øll frá grannum.

Grundgevingarnar, ið verða førdar fram í mótmælunum, eru í høvuðsheitum hesar:

1. Spurnartekin verður sett við, um ein 5 metrar breiður atkomuvegur lýkur vanlig krøv til so nógvar búeindir.
2. Heitt verður á kommununa um ikki at geva undantaksloyvi frá at gera veg til útstykkingina.
3. Tað verður mett at vera neyðugt við gongubreyt fram við vegnum.
4. Spurnartekin verður sett til, um nokk parkeringspláss eru, og mett verður at skipanin av teimum sær tilvildarlig og óseriøs út.
5. Spurnartekin verður sett við, um ein íbúðarblokkur í 3 hæddum hóskar seg í einum sethúsa umhvørvi.
6. Mett verður, at nýggja byggingin fer at taka útsýnið frá íbúðunum á Heimasta Horni.
7. Mett verður ikki, at tekningarnar viðvíkjandi hædd av bygningunum geva eina rætta mynd av umstøðunum.
8. Hátturin at fremja almennar hoyringar verður kritiseraður. Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna boðar fólki í nærumhvørvinum frá.

M.a. grundað á mótmælini, er uppskotið til broyting av serstøku byggisamtyktini broytt nakað. Nýggja uppskotið skipar økið í tríggjar eindir, sí skjal *Økir*:

1. Stakhús
- Grundøki við verandi stakhúsum. Grundøkið er uml. 400 $m^2$.

2. Íbúðarøki
- Íbúðarøkið hevur í alt 18 íbúðir.
- Íbúðarbygningur A hevur 14 íbúðir, er í trimum hæddum og mest loyvda hædd er 9,5. Kortskjal 3 í serstøku byggisamtyktini er við til at tryggja íbúðunum á Heimasta Horni útsýnið, sí skjal *Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini 31-05-19,* kortskjal 3.
- Tveir íbúðarbygningar B eru á íbúðarøkinum. Hesir hava báðir tvær íbúðir í hvørjum bygningi, eru í tveimum hæddum og hæddarásetingarnar eru sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
- Vegurin inni á íbúðarøkinum er 7 m breiður og parkeringin er sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Skipanin av vegi og parkering er góðkend av teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu.

3. Vegur
- Vegurin, sum er til íbúðarøkið verður lagdur sum ein matrikul fyri seg, við møguleika fyri, at Tórshavnar kommuna kann yvirtaka hann, tá hann er liðugt gjørdur.
- Ein partur av vegnum er 5 m breiður og ein partur av vegnum er 6,25 m breiður.
- Við endan av vegnum er eitt vendipláss.
- Vegabreiddin er góðkend av teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu og mett verður ikki, at neyðugt er við gongubreyt.

Nýggja uppskotið til skipanina av økinum fevnir harumframt um eina gonguleið millum matr. nr. 1116a og hagan omanfyri. Hendan gonguleiðin gevur møguleika fyri, at samband kann fáast við m.a. rossagøtuna og fótbóltsvøllin undir Gráasteini, og kann hettar verða til gagns fyri íbúgvarnar í økinum og almenningin annars.

Umframt nýggja broytingaruppskotið, so hevur umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hesar viðmerkingarnar til mótmælini:

Ad. 5. Býarskipanardeildin metir, at tað er ráðiligt at broyta hæddarásetingarnar fyri íbúðarbyggingina í serstøku byggisamtyktini. Tað er stórur lendismunur í økinum, og nýggja útstykkingin liggur væl lægri enn verandi íbúðarbygging við Heimasta Horn. Harumframt hevur broytingin við sær eitt líðandi skifti millum lága og høga bygging í økinum – frá sethúsum, til íbúðarbygging í trimum hæddum, til íbúðarbygging í 5 hæddum.

Ad. 8. Øllum er tryggjað smbr. §6 í byggi- og býarskipanarlógini, at koma til orðanna og gera mótmæli til ætlaðar broytingar. Sostatt kunnu grannar og onnur blíva hoyrd, nevniliga við at gera síni møguligu mótmæli galdandi.

Broyting í byggisamtyktum og uppskot til nýggjar serstakar byggisamtyktir eru at meta sum eitt reguleringsamboð og ikki ein vanlig fyrisitingarlig avgerð. Harvið verður tryggjað við lóg, at allir viðkomandi aktørar verða “hoyrdir” í tíðini, har broytingin liggur frammi alment. Tí verða broytingar av byggisamtyktum ikki sendar ávísum borgarum til hoyringar, men til allan almenningin til viðmerkingar.

*"Á vanligan hátt kunngera"* verður lisið sum kunngera á heimasíðu, skal lýsast í avísum og framløgd í fysiskum formi á t.d. Snarskivuni. Tað eru eingi formlig krøv til t.d. at sendast skal skriv til ávísar borgarar. Tað at broyta eina byggisamtykt er at meta sum eitt reguleringsamboð og kann samanberast við "lóggávubroyting" og rakar yvirskipað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at góðkenna nýggja broytingaruppskotið, sambært skjali *Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini 31-05-19* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi 20. juni 2019 varð samtykt at gera ymiskar tillagingar í serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1116a undir Gráasteini. Tískil hevur broytingin í byggisamtyktini aftur ligið til almenna hoyring frá 25. juni til 6. august 2019. Í sambandi við almennu hoyringina hevur kommunan móttikið skriv við viðmerkingum/mótmælum frá grannum – eitt frá eigarafelagnum Heimasta Horn, sí skjal *Xerox Scan_05082019162042* og eitt frá grannum Undir Gráasteini 70b, sí skjal *Mótmæli móti broyting av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1116a undir Gráasteini – vegna grannar matr. nr. 1116c*
.
Hesi eru viðurskiftini, ið verða nevnd í viðmerkingunum/mótmælunum:

1. íbúðarbygging í 3 hæddum vil misprýða økið og kemur at tykjast massivt at fyrihalda seg til hjá grannunum í nærmastu grannabygningum á Heimasta Horni. Tí verður mælt til at byggja í 2 hæddum ístaðin.
2. Mett verður, at trygdin verður ofra, av tí at eingin gongubreyt er í ætlaða byggjarínum og er tað ørkymlandi samstundis at loyva einum spæliplássi í sama øki.
3. Mett verður ikki, at tað er neyðugt at skaktin til lyftina, sum er í íbúðarbygninginum við 3 hæddum, er hægri enn bygningurin annars. Hetta fer at misprýða grannalagið og taka útsýnið.
4. Mest loyvda hædd eigur at verða broytt frá 9,5 m til 9 m.
5. Viðmerkt verður, at um eigarin av matr. nr. 1116a fær loyvi at byggja í 3 hæddum kann hugsast, at eigarin av grannastykkinum, matr. nr. 1118a, eisini fer at ynskja at byggja í 3 hæddum, og at hetta málið fer at verða nýtt sum fordømi. Lendið á matr. nr. 1118a liggur væl hægri, og hevði bygging í 3 hæddum á hesum stykkinum viðført, at grannarnir undir Heimasta Horni høvdu mist útsýnið og harvið mist søluvirði.
6. Tað verður sera trupult at sleppa út á vegamótinum undir Gráasteini/Høvuðsvegnum, tá alt økið verður bygt og Sandoyartunnilin er liðugur. Serliga tá hetta er eitt vinstra sving. Um broytingin verður góðkend, má Tórshavnar kommuna taka atlit fyri at gera neyðugar ferðslutekniskar broytingar á nevnda vegamóti.
7. Eigarin av ognini undir Gráasteini 70b vísir á, at skipanin av parkeringsplássunum á matr. nr. 1116a ger, at eitt av teirra tveimum parkeringsplássum verður blokerað. Tí ynskja tey, at tey fimm p-plássini sunnast í økinum, verða minkað til at verða tvey p-pláss. Ein annar møguleiki er at venda teimum, so tey standa fram við tí sunnasta íbúðarbygningi B.

Umsitingin hevur havt innanhýsis fund um mótmælini, og hevur hesar viðmerkingarnar:

Ad. 1. Tað er stórur lendismunur í økinum, og nýggja útstykkingin liggur væl lægri enn verandi íbúðarbygging við Heimasta Horn. Harumframt hevur broytingin við sær eitt líðandi skifti millum lága og høga bygging í økinum – frá sethúsum, til íbúðarbygging í trimum hæddum, til íbúðarbygging í 5 hæddum.

Nevnast kann somuleiðis, at mest loyvda byggi- og nýtslustig er 0,3 og 0,6, sum er tað sama, sum er ásett fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Tískil verður samlaði massin tann sami, sum er loyvdur í A1 økjum annars.

Umsitingin hevur gjørt eina visualisering, sí skjal *Visualisering og skurður* av nýggju bygginginí í økinum, við støði í uppmátingum, sum tekniska deild hevur gjørt, og út frá henni verður ikki mett, at bygningurin ger seg inn á grannalagið.

Ad. 2. Tekniska deild metir ikki, at trygdin í økinum verður ofra. Líknandi skipan av økjum er eisini at síggja aðrastaðni í býnum.

Mett verður, at tað hevði verið betur, um ein gongubreyt var framvið tí fyrsta strekkinum av vegnum, men er hetta ikki gjørligt, av tí at vegurin bert er 5 m. breiður. Hetta verður tó ikki mett at verða neyðugt, fyri at fremja verkætlanina, av tí at talan er um eitt stutt strekki – uml. 40 m.

Ad. 3. Skaktin til lyftina er ein so lítil partur av bygninginum, at mett verður ikki, at hon fer at missprýða grannalagið.

Ad. 4. Teknisk viðurskifti og orkukrøv gera, at tað ikki er gjørligt, at ein bygningur í 3 hæddum, bert er 9 metur høgur.

Ad. 5. Ein góðkend serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1118a fyriliggur. Hendan serstaka byggisamtyktin skipar økið til vanliga sethúsabygging, og tí má gangast út frá, at tað er hetta, ið verður bygt.

Viðurskifti sum at varðveita útsýnið er ikki nakað, ið kann steðga eini verkætlan, tá lendið frammanundan hevur ligið sum byggiøki. Hóast hetta, so var lendisskurðurin ígjøgnum matr. nr. 1116a, sí s. 6 í skjali *Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini 31-05-19*, sum vísir, at grannarnir við Heimasta Horn ikki mistu útsýnið, ein týðandi partur av málsviðgerðini, og var við til, at broytingin varð viðmæld. Um eigarin av matr. nr. 1118a ynskti hægri bygging, hevði tílíkur skurður somuleiðis verði ein partur av viðgerðini av málinum, men hevur umsitingin ongar ábendingar fingið um, at hetta er ynskið.

Ad. 6. Tekniska deild metir ikki, at vinstrasvingið út á høvuðsvegin er ein trupulleiki.

Ad. 7. Trupulleikin við p-plássum hjá grannunum kann loysast við smærri tillagingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla frá at ganga mótmælunum á møti og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Trónda Sigurðsson um at beina málið aftur í nevnd, ið varð einmælt samtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at halda fast við samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini 11. september 2019.

Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

## 254/19 Broyting av almennu byggisamtyktini, Dalurin Langi, matr. nr. 138a, Hoyvík frá A3 til D1

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 5/19 | 18/04229-1 |
| 2 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 20/19 | 18/04229-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 88/19 | 18/04229-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 111/19 | 18/04229-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 155/19 | 18/04229-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 173/19 | 18/04229-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 254/19 | 18/04229-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar býráð samtykti á fundi tann 20. juni 2017 nýggja bústaðar útstykking, Stórubrekku, í tí sambandi er ynski at fáa Dalin Langa lagdan um til fríøki. Fyri at tryggja eitt grønt umhvørvi millum býlingarnar Stórubrekku og Myllutjørn, ið er til gagns fyri almenningin. Dalurin Langi skal vera eitt hugtakandi og spennandi samanhangandi grønt øki, ið er lætt at greina og fata, ið tryggjar almenninginum fjølbroytt fríøkir ímillum býlingarnar.

Fyri at fremja hetta átak, er neyðugt við tillagingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar Kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Skipa økið um, Dalin langa frá A3, bústaða- og miðstaðarbygging til D1, fríøki.

Økið, sum broytingin fevnir um, liggur í A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sí skjal *1 - Dalurin Langi áðrenn broyting* og *2 - Dalurin Langi eftir broyting.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

*1 Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari bygisamtykt fyri økið.*

*2 Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

*1 Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

*2 Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

*3 Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús, 300 m2 fyri tvíhús og 250 m2 fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 m2 fyri hvørt grundstykki.*

*4 Byggistig 0,3*

*5 Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m2, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m2 og 500 m2 verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt náttúrliga avmarkað øki.*

*6 Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd. .*

*7 Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.*

*8 Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.*

*9 Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- 17/01822 Klik her for at angive tekst.
- Sí *Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019, journal nr. 18/03848*

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *1 - Dalurin Langi áðrenn broyting, journal nr. 18/04229-2.*
- *2 - Dalurin Langi eftir broyting, journal nr. 18/04229-2.*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja broytingina av almennu byggisamtyktini sambært kortskjølunum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina um uppskotið at skipa økið um. Dalin langa frá A3, bústaða- og miðstaðarbygging til D1, fríøki, hevur Tórshavnar kommuna fingið tvey mótmælisskriv, við viðmerkingum og broytingaruppskotum. Sí skjal *Mótmæli og broytingaruppskot til byggisamtyktina, Dalurin Langi* og *Mótmæli frá eigarafelagið við Myllnutjørn, Hoyvíkshædd, Inni á Gøtu og Maritugøtu.*

Umboð fyri grannaognir og eigarafeløg seta í høvuðsheitum fram hesar viðmerkingar og sjónarmið í mótmælisskrivinum:

**Mótmæl 1, grannaognir: Ólivantsgøta 18 og Dýrindalsgøta 16**

1. Frágreiðingin í kunngerðini, vísandi til endamálið er misvísandi í mun til hvørjir býlingar fara fáa ágóða og ávirkan av fríøkinum.
2. Ivamál vera sett til hví ovara parti av fríøkinum, ikki fylgir matr.nr 135kg og 135kr á vestaru síðu av dalinum. Mælt verður til at vaksa um fríøkið, so tað liggur heilt uppat matr.nr 135kg og 135kr.
3. Ivamál vera sett um kommunan heldur ovara part av dalinum tøkan til komandi býggiverkætlanir eystan fyri matr.nr 135kg og 135kr, ístaðin fyri at taka hetta uppí sum fríøki. Tí bygging í hasum økinum kemur at vera neilig og órógva skipan av verandi útstykking og ognunum á matr.nr 135kg og 135kr.

Umsitingin hevur viðgjørt mótmælið:
Add.1. Tá Hoyvíkshagi Suður ella Hoyvíkshædd, ið býlingur eitur í dag, bleiv planlagdur var lova, at Dalurin Langi skuldi leggjast út sum fríøki (D1). Tó er eingin broyting av byggisamtyktini farin fram fyri at tryggja økið sum fríøki, sum í dag liggur sum byggiøki. Nú vil man tryggja Dalin Langa sum fríøki, bæði í mun til verandi býlingar og komandi býlingin á Stórubrekku. Tað er av misgáum at Hoyvíkshædd ikki er nevnd í kunngerðini av málinum, tí sjálvsagt er býlingur tonktur, sum ein av brúkarum av fríøkinum.

Add.2. Umsitingin hevur kannað viðurskiftini og avgjørt at fylgja tilmælinum. At veksa um fríøkið, so tað kemur heilt uppat matr.nr 135kg, 135kr. og 135nt. Sí skjal: *Nýtt kort_Dalurin Langi.*

Add.3. Tað liggur ein ætlan um at leggja ovara part av dalinum út sum byggiøki til ein framtíðar stovn. Økið liggur frammanundan sum A3 øki, ið loyvir stovnsvirksemi.
Vísandi til add.2 so verður ein grønur geiri frá Ólivantsgøtu niðan við matr. nr. 135kg, 135kr. og 135nt og niðan á ringvegin, Klingran. Hesin geiri skal tryggja eina rímiliga frástøðu millum matriklarnar og komandi stovn. Sí skjal: *Nýtt kort_Dalurin Langi.*

**Mótmæl 2, eigarafelagið við Myllnutjørn, Hoyvíkshædd, Inni á Gøtu og Maritugøtu.**

1. Fýlst verður á at økið, ið er lagt út til fríøki, er ov lítið. Økið rúmar bert sjálva gøtuna og brattar skáar báðu megin. Tað rúmar ikki spæl og upphald, tískil ber tað ongan dám av frílendi.
2. Útstykkingin á Stórubrekku kemur at oyðileggja trø, ið eru plantað í økinum fyri stuttum.
3. Sambandið millum býlingarnar vestan fyri Dalin Langa og komandi frílendi og ítróttarøki (Stóru Tjørn) vestan fyri búsetingina Inni á Gøtu, verður kvett.
4. Eitt broytingaruppskot er útvegað, har víst verður til at fríøkið skal vaksa munandi, markið kemur at leggja seg tætt uppat matriklunum í nærumráðnum, vinnuøkinum eystan, ringvegnum Kringlan og sjálvum heygginum.

Umsitingin hevur viðgjørt mótmælið:
Add.1. Umsitingin hevur kannað viðurskiftini og avgjørt at fylgja tilmælinum. Við at veksa um fríøkið. Tó eru ongar ætlanir um, at skipa/programmera økið stórvegis. At brattir skráar eru, verður sæð sum ein dygd í økinum. Hesir skráar geva lívd til gøtuna og bjóða til spæl og forvitni hjá børnum.

Add.2. Við at vaksa um fríøkið, verður ikki neyðugt at taka øll trø burt, tó kann væntast at nøkur mugu takast burt kortini.

Add.3. Ætlanin sum Stóru Tjørn liggur á tekniborðinum, men har er enn langur vegur fyri framman. Tí er trupult at vísa til nakað ítøkiligt, tá talan verður um frílendi og ítróttarøki í hasum umráðnum.
Tó við at skipa fríøkið, sum nú er ætlað Sí skjal: *Nýtt kort_Dalurin Langi*, verður ein grønur geiri tryggjaður ígjøgnum dalin, við streingjum til býlingarnar Inni á Gøtu og Stóru Tjørn.

Add. 4. Sum kunnað so fer kommunan at fylgja tilmælinum við at veksa um fríøkið.
Tað liggur ein ætlan um at leggja ovara part av dalinum út sum byggiøki til ein framtíðar stovn. Økið liggur frammanundan sum A3 øki, ið loyvir stovnsvirksemi.
Ein grønur geiri kemur at leggja seg fram við eystaru síðu á Hoyvíkshædd. Hesin geiri skal tryggja eina rímiliga frástøðu millum matriklarnar og komandi stovn, eins og samband við norðaru býlingarnar Inni á Gøtu og Stóru Tjørn.
Sami geiri kemur at leggja seg fram við økinum, ið komandi umlættingar- og rehabiliteringsdepil v. Rólandsgøtu skal staðsetast. Síðani fylgja matriklunum við Mylnutjøn og oman til Hoyvíkar Skúla og ringvegin, Vegurin Langi. Markið verður flutt longur niðan á heyggin, ið uppskotið vísir til. Sí skjal: *Nýtt kort_Dalurin Langi.*

**Skjøl:**
*Journal nr.:18/04229-7* Mótmæli og broytingaruppskot til byggisamtyktina, Dalurin Langi.
*Journal nr.:18/04229-12* Mótmæli frá eigarafelagnum við Myllnutjørn, Hoyvíkshædd, Inni á Gøtu og Maritugøtu.
*Journal nr.: 18/04229-13* Nýtt kort_Dalurin Langi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingaruppskotið, og harvið samtykkja broytingina av almennu byggisamtyktini sambært kortskjølunum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bjørg Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið hjá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, einari ímóti og fimm blonkum atkøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Halla Samulsen.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina, sum var í døgunum 28. mai til 9. juli 2019. Um uppskotið at skipa økið um, Dalin langa frá A3, bústaða- og miðstaðarbygging til D1, fríøki, hevur Tórshavnar kommuna fingið eitt mótmælisskriv frá borgara við viðmerkingum og broytingaruppskotum. Sí skjøl *Hoyringssvar í sambandi við ætlaðu broytan av alm. byggisamtyktini í Dalinum langa í Hoyvík og Kort.*

Borgarin setur í høvuðsheitum fram hesar viðmerkingar og sjónarmið í mótmælisskrivinum:

1. Viðmælt verður at niðari partur av Dalinum Langa verður lagt út til D2 øki. Grundgevingin fyri hesum kemur av at Hoyvíkshøllin er ein stórur miðdepil við nógvum frítíðar virksemi. Um alt økið verður lagt út sum D1, steðgar hetta framtíðar útbyggingum og víðkan av virkseminum, ið hoyrir til Hoyvíkshøllina.

   Umsitingin hevur viðgjørt mótmælið:
   Add. 1 Umsitingin hevur kannað uppskotið og avgjørt at fylgja tilmælinum. um at broyta niðara part av Dalinum Langa um til D2. Hetta ger, at Hoyvíkshøllin, hevur møguleika at vaksa um sítt virksemi, sí skjal *Dalurin Langi eftir innkomið broytingsuppskot*.

Parkering:
Í samband við planleggingina av parkerings viðurskiftunum til komandi umlættingar- og rehabiliteringsdepil URD, er markið millum D1 og A3 skipað annarleiðis enn uppruna uppskotið. Sí skjøl *Nýtt kort_Dalurin Langi og Dalurin Langi eftir innkomið broytingsuppskot*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri D2:
*Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

**Skjøl:**
*Journal nr.: 18/04229-13* Nýtt kort_Dalurin Langi.
*Journal nr.:18/04229-20* Kort.
*Journal nr.:18/04229-22* Hoyringssvar í sambandi við ætlaðu broyting av alm. byggisamtyktini í Dalinum langa í Hoyvík.
*Journal nr.: 18/04229-24 Dalurin Langi eftir innkomið broytingsuppskot*

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at góðkenna broytingaruppskotið, og harvið samtykkja broytingina av almennu byggisamtyktini sambært kortinum skjal nr. 18/04229-24 og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at umsitingin lýsir ovara partin betri til komandi fund, við atliti til at D1 økið gongur niðan til Klingruna.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, mælir til, at ovasti partur av Dalinum Langa, sum er ætlað til ein stovn, verður lagt sum D1.

**Ískoyti:**
Vísandi til mál um umsókn um grundøkir til vardar íbúðir journal nr. 17/00903, heitti Almannaráðið 08.03.2017 á Tórshavnar kommunu um at útvega grundøki til bygging av vardum bústøðum í Tórshavn. Á ástaðarfundi 16. februar 2018 vísti býarskipanardeildin á ymiskar staðsetingarmøguleikar, og av hesum raðfesti Almannaráðið matr. nr. 135fe/138a í Hoyvík (Klingran) til vardar bústaðir til fólk við menningartarni. Viðvíkjandi teimum raðfestu staðsetingunum viðmerkti býarskipanardeildin at staðsetingin hevur gott infrakervi og almenna ferðsluatgongd umvegis Klingruna og nýggja Eysturoyartunnilin, umframt at bústaður til fólk við menningartarni hóskar seg væl í einum øki, sum frammanundan er merkt av at vera bústaðarøki. Staðsetingin var samtykt á býráðsfundi 22.03.18.

Atkoman til stovnin hjá Almannaráðum er ætlað frá Klingruni - sama atkoma, sum er til verkætlanina við Stórubrekku. Tí verður mælt til at lata ein A3 geira ganga fram við Klingruni, frá atkomuvegnum til økið við Stórubrekku og til økið til stovnin hjá Almannaráðnum, sí skjal *Dalurin Langi eftir innkomið broytingaruppskot 01.10.2019, 18/04229-26*. Tað er eisini møguligt at lata D1 økið ganga allan vegin niðan til Klingruna, og lata vegin ganga ígjøgnum D1 økið.

Verandi gongugøta gongur, sum er, út í Klingruna. Framyvir kemur hon út í vegaatkomuna til stovn hjá Almannaráðnum.

Í skjalinum *Dalurin Langi eftir innkomið broytingsuppskot 01.10.2019* 18/04229-26, sæst ein smalur geiri í D1 økinum ganga norður til Klingruna og harvið sundurskilja grundøkið til vardar bústaðir og Dýrindalsgøtu. Hetta er bæði fyri at tryggja eina hóskandi fjarstøðu millum bygginingina og verandi bústaðir á Hoyvíkshædd, umframt at nýggj gongugøta kann knýtast at verandi gongugøtuskipan í Dalinum Langa, soleiðis at ein beinleiðis gonguteinur er í millum Hoyvíkar kirkju og nýggja kirkjugarðin í Hoyvík.

**Skjal**:
*Dalurin Langi eftir innkomið broytingsuppskot 01.10.2019*, j.nr. 18/04229-26.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at góðkenna broytingaruppskotið, og harvið samtykkja broytingina av almennu byggisamtyktini sambært kortskjali *Dalurin Langi eftir innkomið broytingsuppskot 01.10.2019, j.nr. 18/04229-26,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 255/19 Lýsingarskelti á Neistahúsinum, matr. nr. 457c, R.C.Effersøesgøtu 16, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 144/19 | 19/02860-8 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 169/19 | 19/02860-8 |
| 3 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 255/19 | 19/02860-8 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við arbeiðið at umvæla húsini á omanfyri nevndu ogn vóru lýsingarskeltini, sum tíðaravmarkað loyvi varð givið til sum eitt frávik í 2008, niðurtikin.

Talan var um mekanisk skelti við deyðum myndum og loyvi var givið við niðanfyri standandi treytum:

1. Loyvið er galdandi í 3 ár frá tí degi tað verður tikið í brúk. Tá tíðin er liðin, skal felagið í góðari tíð søkja um framhald av loyvinum.
2. At skeltið verður uppsett sambært innsendu teknisku tekningum, frágreiðingum, og staðsett sum hjálagda mynd, merkt "Hús samlað skiltið 3", dagfest 12-12-07
3. At skeltið er forsvarliga fest og trygt
4. At loyvishavarin ábyrgdast skeltið til eina og hvørja tíð
5. At skeltið altíð er í fullgóðum standi og ikki misprýðir ella veitir rangar upplýsingar
6. At loyvishavarin tekur skeltið niður, tá tað ikki longur er í brúk
7. Um klagað verður um ampar av skeltinum, skal loyvishavarin beinanvegin gera neyðug tiltøk, ið ásett verða av byggivaldinum ella politinum.

Av tí at farið er út um loyvistíðina, vendi kommunan sær til Neistan við boðum um, at einki nýtt skelti mátti setast upp, uttan at eitt nýtt loyvi varð fingið til vega.

Neistin sendi síðan kommununi eina umsókn um loyvi at seta ein nýggjan talgildan lýsingarskerm upp.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunan hevur móttikið umsókn um uppsetan av tveimum talgildum lýsingarskeltum á omanfyri nevndu ogn.

Talan er um talgild skelti, ið koma í staðin fyri mekanisku skeltini og staðsetingin er júst tann sama sum áður.

<u>Umsøkjarin upplýsir:</u>
At skeltini hava ein innbygdan ljósmátara, ið tillagar ljósstyrkina á skerminum eftir umstøðunum, soleiðis at ljósstyrkin minkar um kvøldarnar. Ljóskvæmið kann eisini tillagast, um tørvur er á tí. Við hesum verður tryggjað, at grannalagið og ferðslan ikki órógvast. Í so máta verður einki øðrvísi enn at tað, sum áður var prent, verður nú talgilt.

Støddin á gomlu skeltunum var 500 cm x 120 cm móti R.C. Effersøes gøtu og 425 cm x 130 cm móti Bøkjarabrekku. Støddin á nýggju skeltunum er í báðum førum 450 cm x 120 cm.

Umsøkjarin upplýsir m.a. í viðlagda skrivi, at inntøkurnar av lýsingarskeltunum hava avgerandi týdning fyri virksemið hjá Neistanum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ognin matr. nr. 457c, Tórshavn, liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini, har tað er ásett í kap. IV, § 5.:

> *Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

Harumframt liggur ognin í eindini A1 í serstøku byggisamtyktini nr. 7, har tað er ásett í grein 2:

*Eindirnar A1 og A2, Sethúsabygging.*

a. *Við teimum undantøkum, ið eru nevnd niðanfyri undir felagsásetingum, skulu eindirnar ikki verða nýttar uttan til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg. Á hvørjari ogn kunnu ikki verða bygd uttan eini sethús, við í mesta lagi tveimum íbúðum.*
b. *Eftir nærri góðkenning býráðsins kann í eindini A1 verða loyvt at gera handlar, ið neyðugur eru til dagligu útgerð býlingsins.*

*Felagsásetingar fyri eindirnar A og B.*

a. *Á eindunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi, ristingum ella við útsjónd síni ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann verða einum, sum uttan búgva til ampa.*
b. *Á ognunum er loyvt at hava tílíkt virki, sum vanliga verða útint á sethúsum, tá ið virki verður rikið av tí, sum á ognini býr, og tá ið býráðið heldur, at tað kann verða rikið uttan at broyta eyðkenni húsanna sum sethús ella spilla dámin á býlingunum sum sethúsabýlingur (herímillum við skeltum og tílíkum), ella at virkið ikki er grannunum til ampa ella krevur rúmd at seta bilar á, sum ognin ikki hevur. Annars er ikki loyvt at nýta ognirnar til nakað slag av vinnuvirki. uttan so er, at virkið lýkur treytirnar í 1. petti, skal har soleiðis ikki verða bygt til ella útint handils-, bilkoyringar-, verksmiðju-, verkstaða – ella goymsluvirki.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kommunan hevur fleiri mál um talgild skelti til viðgerðar í løtuni. Talan er bæði um vanligar umsóknir um loyvi at seta upp og um mál, har skeltir eru uppsett uttan byggiloyvi.
Í tí sambandi hevur kommunan vent sær til løgfrøðing, sum hevur latið kommununi niðanfyri standandi upprit:

<u>*Bakstøði*</u>
Stuðlafelagið Neistin (”Neistin”) fekk í 2000 eitt 2 ára fyribilsloyvi í eina royndartíð, at seta skeltið á ognina R. C. Effersøesgøta 16. Í fyribilsloyvinum stendur m.a., at um klaga verður ella ampar eru av skeltinum, skal loyvishavarin beinanvegin gera neyðug tiltøk, ið ásett verða av byggivaldinum. Júst sama treyt varð endurtikin í treytaðum loyvi í 2008 til ”flættiskelti”. Síðani tá hevur lýsingarskeltið hingið á bygninginum, har ljósprojektørar hava lýst inn á dúk ella lamellir. TK metir ikki, at gomlu lýsingarskeltini eru samanlíknilig við LED skýggjarnar, tí ljósintensiteturin frá LED skýggjunum kann verða sera ógvusligur í mun til ljósið frá gomlu lýsingarskeltunum.

Í sambandi við umvæling av sethúsaognini R. C. Effersøesgøtu 16 sendi TK hin 25. juni 2019 eitt (fyribyrgjandi) skriv til Neistan um, at um Neistin ætlaði at seta nýggj lýsingarskelti upp aftur, so mátti Neistin fyrst søkja TK um loyvi. Hóast hesi boð hevur Neistin sett upp stóran LED skýggja á tann eina húsaveggin uttan loyvi. LED skýggin hevur tó ikki verið tendraður

enn. Tað er so vítt sæst gjørt klárt á tekjuni, at seta ein LED skýggja upp afturat oman móti Bøkjarabrekku.

Nú ynskir Neistin at tendra LED skýggjan vísandi til, at Neistin missir pening við ikki at tendra.

Sum skilst arbeiðir TK við eini skeltireglugerð e.l., ið eisini skal taka hond um LED skýggjar.

*Aðrir LED skýggjar í íbúðarøkjum*
Annars er tað hent síðstu mánaðirnar, at fleiri LED skýggjar eru settir upp kring býin við sterkum blinkandi handilslýsingum, bæði í bústaðarøkjum og í vinnuøkjum. Undirritaði hjálpi í løtuni TK við samskiftinum við eigararnar av LED skýggjunum í bústaðarøkjum, tvs. í Mannbrekku 1 (A1, 3. grundumráði), Óluvugøtu 14 (A1, 3. grundumráði) og Tinghúsvegnum 20 (1. grundumráði). Eingin av hesum hevur fingið loyvi frá TK til hetta virksemi. Allir hesar eigarar hava fingið skrivlig boð frá TK, um at sløkkja LED skýggjarnar og taka teir niður. Grundgevingin er, at slíkir LED skýggjar krevja byggiloyvið, sum ikki verður givið m.a. tí LED skýggjarnir eru til ampa ella spilla dámin á økinum sum sethúsabýlingur. Ferðsluatlit og –trygd hava eisini verið nevnd. Allir tríggir eigarar hava treiskast og hava til henda dag nokta at sløkt og tikið LED skýggjarnar niður. Allir tríggir eigarar vita tí eisini av, at teirra mál kunnu vera ella eru á veg í rættin.

*Viðgerð*
Vísandi til omanfyrinevnda bakstøði í málinum er niðanfyri eitt yvirlit yvir orsøkir til, at undirritaði meti, at tað absolutt ikki er skilagott, at geva Neistanum fyribilsloyvi e.l. at tendra ein ella tveir LED skýggjar á sethúsaognini R. C Effersøesgøta 16 í løtuni:

- Omanfyrinevndu 3 eigarar av samanlíkniligum LED skýggjum í bústaðarøki (allir uppsettir uttan loyvi frá TK) vísa til hinar LED skýggjarnar, ið eru tendraðir og krevja at teir verða viðfarnir á sama hátt sum hinir eigararnir. Teir vísa allir til líkaregluna. Tvs. at teirra LED skermur skal kunna vera tendraður, um aðrir sleppa. Roknast má við, at um Neistin fær loyvi fyribils ella permanent at hava sínar LED skýggjar tendraðar, so fara hinir at krevja júst tað sama og tað verður helst trupult, at steðga nevndu trimum og møguligum øðrum LED skýggjum kring býin seinni í A1, 3. grundumráði ella í 1. grundumráði fyrisitingarliga ella umvegis Føroya rætt – í øllum førum til ein møgulig skeltireglugerð e.l. er samtykt.
- Tað eru komnar kærur í mun til LED skýggjarnar á Mannbrekku 1, Óluvugøtu 14 og Tinghúsvegnum 20. Tað er týðiligt, at kærurnar eru byrjaðar at koma eftir, at nýggju LED skýggjarnir blivu settir upp. Aðrir passivir skermar, har projektørur lýsti inn á eina lýsing á einum dúki ella lamellum, hava ikki givið fólki sama ampa. Her eru nøkur brot úr kærum til TK síðstu vikurnar í sambandi við nýggju LED skýggjarnar:
  - Ráðið fyri ferðslutrygd um Óluvugøtu 14: ”… *Ein borgari skrivar til okkara á facebook, fyri at gera vart við órógvandi lýsingarskelti við Óluvugøtu í Havn. Hon metir, at lýsingarskelti í eygnahædd hjá bilførarum er sera órógvandi og kann elva til ferðsluóhapp. Á RFF eru vit samd í, at lýsingarskelti hoyra ikki heima, har tey órógva bilførarar og taka uppmerksemið frá koyristøðuni* …”
  - Borgari, ið býr við Mannbrekku 1: ”… *Hetta førir við sær sera nógva ljósdálking, sum kemur afturat tí sera stóru ljóðdálkingini … hetta er í einum*

*bústaðarøki … Talan er um ein ovurstóran LED skýggja, sum lýsir nógv og blinkar og skiftir fimta hvørt sekund í einum bústaðarøki. Ljósið er so sterkt, at tað órógvar náttarsvøvnin … hann lýsir inn í øll rúm í húsinum allan dag og alla nátt eins og ein projektørur. Talan er um sera ágangandi og sterkt ljós, so vit fáa ilt í eyguni. …*"

- Felagið Heimafriður viðvíkjandi Mannbrekku 1: "*Borgarar í Hoyvík hava vent sær til felagið og gera vart við at nýggja ljósskelti við Mannbrekku, órógva m.a. náttarsvøvnin. Felagið heitir á Tórshavnar kommunu um at taka klagurnar og áheitanirnar í álvara og harafturat minka um amparnar hjá borgarum, sum búgva á staðnum, vinarliga virða heimafriðin hjá borgarum í kommununi.*"
- Borgari, ið býr við Tinghúsvegin 20: " … *vit verða útsett fyri massivari ljósdálking. … vit hava 10 vindeygu sum venda í móti lýsingarskerminum, so tit kunnu ætla, at vit hava eitt ljóssjov inni hjá okkum, sum er við at gera okkum ør í høvdinum …*"

- Tað er tí sannlíkt, at klagur fara at koma úr grannalagnum til R. C. Effersøesgøtu 16, ið er sethúsaøki, har familjur fara at geva ilt av sær um ógvusliga ljósdálking. Harumframt er tað sannlíkt, at slíkar ljóssterkar, blinkandi og skiftandi litlýsingar kunnu hava ávirkan á ferðslutrygdina.
- Um Neistin (og harvið sannlíkt eisini aðrir LED skýggja eigarar í kommununi) fær loyvið at nýta LED skýggjar, men seinni missir møguleikan, tá møgulig politikkur/reglugerð er komin uppá pláss, so kann TK møguliga rokna við endurgjaldskrøvum frá hesum eigarum fyri fíggjarligan miss av lýsingarinntøkum.
- Familjurnar í nærmastu grannahúsunum siga frá somikið ógvisligari ljósdálking inni hjá teimum, at tað gongur sterkt út yvir trivna, svøvn v.m. Roknast kann tí við, at slíkir grannar við tíðini kunnu reisa endurgjaldskrøv móti kommununi vísandi til, at teirra sethúsaogn hevur mist virði í søluhøpi.
- TK hevur onga staðni í býnum betri heimildir at nokta uppsetan av slíkum LED skýggjum enn júst í økinum kring R. C. Effersøesgøtu 16, tí Serstaka byggisamtyktin nr. 7 hevur felagsásetingar um júst skelting.
- Byggi- og býarskipanarnevndin hevur prinsipielt viðgjørt byggiumsókn frá eigaranum av Óluvugøtu 14 í 2015 um uppsetan av LED skýggja á ognini og gav ikki loyvi
- Málið viðvíkjandi øðrum LED skýggjum í býnum, sum er komið longst, er viðvíkjandi Mannbrekku 1. Har hevur eigarin fingið freist til leygardagin 7. september 2019, at sløkkja LED skýggjan og taka hann niður. Hann hevur fingið at vita, at um hann ikki aktar boðini, verður málið latið fútarættinum í hendi uttan aðra ávaring, tvs. tíðliga í komandi viku. Roknast má við, at um Neistin fær loyvi at tendra LED skýggja til lýsingar, kann tað fáa sterka neiliga ávirkan á hetta rættarmál, sum helst hareftir ikki gevur meining.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

| | |
|---|---|
| 19/02708 | Lýsingarskelti á húsaskjøldrinum á Tinghúsvegnum 20/Bøkjarabrekka 35, Tórshavn |
| 19/02055 | Ólóglig uppsetan av reklamuskelti á matr. nr. 1470z, Óluvugøta 14, Tórshavn |
| 19/01573 | Reklamuskíggja á húsunum í Mannbrekku 1, matr. nr. 1u, Tórshavn |

18/04374 Skelting uttan loyvi á bygninginum hjá Berg Motors, matr. nr. 1381l, Tórshavn
19/03059 Umsókn um loyvi at seta lýsingarskerm á húsini N. Winthers gøta 9, matr. nr. 319, Tórshavn
2007-3758 Stuðlafelagið Neistin: Umsókn um loyvi at heingja ljósskelti á suðursíðuna á R.C. Effersøes gøtu 16

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Umsóknin gongur í móti ásetingunum í almennu byggisamtyktini kap. IV, § 5, stk. 1 og serstøku byggisamtyktini nr. 7, grein 2.

**Umhvørvisárin**
Viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
19/02860-4 Umsókn um loyvi til lýsingarskelti
19/02860-4 Kunning frá Stuðlafelagi Neistans um lýsingarskelti
19/02860-4 Fyribilsloyvi juli 2000
19/02860-4 Fyribilsloyvi mai 2008
19/02860-4 Tekningar skermar
19/02860-9 Upprit frá Faroe Law

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla frá at ganga umsóknini á møti, vísandi til almennu byggisamtyktina, serstøku byggisamtykt nr. 7 og til uppritið frá Faroe Law.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Turið Horn, mælir til at viðgera málið á næsta fundi, tá skeltireglugerðin er liðug.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður ímóti tilmælinum og mælir, til at skeltireglugerðin kemur á skrá til komandi fund.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, mælir til at ganga umsóknini á møti, treytað av at skeltið verður sløkt um náttina og at ljósstyrkin verður lækkað um kvøldið.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund til umrøðu og støðutakan.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Málið umrøtt.

# 256/19 Lýsing eftir tekniskum stjóra til tekniska økið, freist

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 286/19 | 19/04200-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 256/19 | 19/04200-1 |

**Upprunin til málið:**
Núverandi stjóri á Tekniska økinum ynskir at fara úr starvinum sum stjóri tann 31. desember 2019.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Starvið sum stjóri fyri teknisku fyrisiting skal lýsast leyst pr. 1. Januar. 2020.

Kommunustjórin hevur arbeitt við nýggjum uppskotið til starvslýsing og setanartilgongd. Uppskotið er við sum skjal.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í starvsfólkareglugerðini hjá Tórshavnar Kommunu, sambært §5. Stk. 4 er heimildin til at seta stjóra ásett soleiðis:

*"1.1 Stjórar og deildarleiðarar*
*Lýsingin skal leggjast fyri fíggjarnevndina til góðkenningar. Lýsingin eftir stjórum skal eisini góðkennast av býráðnum"*

*"2.1 Stjóri ella býráðsskrivari setast í starv*
*Býráðið setur stjóra og býráðsskrivarin aftaná innstilling frá býráðsskrivaranum og setanarbólki við tilmæli frá fíggjarnevndini"*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. oktober 2019 | | Blað nr.: 1093 |
| | | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at taka undir við uppskotinum til starvslýsing jvf. hjálagda skjal.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við uppskotinum til starvslýsing. Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

# 257/19 Fíggjarætlan 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 203/19 | 19/02369-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.09.2019 | 32/19 | 19/02369-1 |
| 3 Vinnunevndin | 09.09.2019 | 50/19 | 19/02369-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 46/19 | 19/02369-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 12.09.2019 | 23/19 | 19/02369-1 |
| 6 Eldranevndin | 12.09.2019 | 15/19 | 19/02369-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 239/19 | 19/02369-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 134/19 | 19/02369-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 25.09.2019 | 255/19 | 19/02369-1 |
| 10 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 217/19 | 19/02369-1 |
| 11 Vinnunevndin | 07.10.2019 | 64/19 | 19/02369-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 10.10.2019 | 30/19 | 19/02369-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2019 | 43/19 | 19/02369-1 |
| 14 Tekniska nevnd | 08.10.2019 | 57/19 | 19/02369-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 266/19 | 19/02369-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 158/19 | 19/02369-1 |
| 17 Eldranevndin | 10.10.2019 | 19/19 | 19/02369-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 282/19 | 19/02369-1 |
| 19 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 257/19 | 19/02369-1 |
| 20 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 296/19 | 19/02369-1 |

**Upprunin til málið:**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober. Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Fíggjarætlanin verður eftir ætlan løgd fyri fíggjarnevndina 18. september 2019 og fyri býráðið 26. september. Býráðið hevur 1. viðgerð 31. oktober og 2. viðgerð 21. november.

**Lýsing av málinum - samandráttur**
Við hesum leggur stjórnin fram tekniska framskriving av kørmunum fyri fíggjarætlan fyri 2020 á greinastøði fyri fíggjarnevndina at viðgera. Sí skjal teknisk framskriving og skjal Tekiskframskriving við virksemisbroytingum.

**Fortreytir fyri framskriving av fíggjarætlan 2020**
Stórur búskaparvøkstur er í landinum, og ein fesk meting av búskaparvøkstrinum sigur hann vera 3,6%. Kommunan er ein munandi partur av hesum búskaparvøkstri.

Í teknisku framskrivingini verður inntøkan frá kommunuskatti, t.e persónsskatturin og eftirlønarinngjøldum mettur at vaksa 3,5%, sum er sami vøkstur, ið landið metir. Kommunuskatturin verður mettur til 829 mió.kr við sama kommunuskattaprosentið á 19,00. Skatturin av eftirlønarinngjøldum verður mettur til 138 mió.kr.

Hóast hjólini í føroyska búskapinum mala við sera høgari ferð, og 'tíðirnar eru góðar', eigur kommunan at føra ein skynsaman fíggjarpolitikk.

Í framskrivingini er løgd inn ein miðal hækking í rakstrarkostnaðum á 1,2%, ið er hækkingin í prístalinum síðsta ári og ein miðal lønarhækking á 2,5% í mun til fíggjarætlanina fyri 2019. Inntøkur frá brúkaragjøldum og líknandi eru øktar við 2%. Samanlagt førir hettar við sær at raksturin hækkar við 15,4 mió.kr ella 2%.

Umframt hettar eru íroknaðar virksemisbroytingar, tvs hækkingar/lækkingar í sambandi við lógarkrøv, býráðssamtykir, sáttmálar og økt og minkað virksemi stavandi frá til dømis nýggjum íløgum. Sí skjal virksemisbroytingar til fíggjarætlanina.

Virksemisbroytingarnar svara í løtuni til eina hækking í rakstrarkostnaðunum á 31,8 mió.kr. ella 4,1% av vøkstri í rakstrarkostnaðunum. Við virksemisbroytingum økjast samlaðu framskrivaðu rakstrarútreiðslurnar 6,1%. Fíggjarmálaráðið mælir kommununum til at rakstrarútreiðslurnar ikki vaksa við meir enn 3,5%

Út frá omanfyri nevndu fortreytum verður úrslit av rakstri 215,7 mió.kr. og skattafíggjaði løgukarmurin 180,5 mió.kr. Við virksemisbroytingum verður úrslit av rakstri 183,9 mió.kr. og skattafíggjaði løgukarmurin umleið 149. mió.kr.

Býráðið hevur samtykt at fara undir fleiri stórar løgur samstundis. Afturat hesum koma aðrar neyðugar kostnaðarmiklar løgur. Er ætlanin at gera fleiri íløgur enn rakstraravlopið/skattafíggjaða løgukarmin, fer hetta at hava við sær ein gjaldføristørv. Hesin kann útvegast við lánsfígging, sølu av ognum og/ella tøkum peningi, um avlopið í árinum vísir seg at verða størri enn ætlað og væntað.

Býráðið ásetur skattaprosent og barnafrádrátt og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

**Tilmæli:**
Stjørnin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at viðgera fíggjarætlanarkarmarnar á greinastøði fyri 2020 og at beina málið í faknevndirnar. Eftir hetta fara stjórarnir við støði í viðgerðunum í faknevndunum og saman við umsitingini at gera endaligt fíggjarætlanaruppskot.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019**: Fíggjarnevndin hevur viðgjørt fíggjarætlanarkarmarnar.
Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, mælir til at vøksturin í rakstrarútreiðslunum í mesta lagi verður 3,5%.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur støðu á seinni fundi.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Vinnunevndin 09. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Trivnaðarnevndin 12. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Eldranevndin 12. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Eftir at tøkniliga framskrivingin/karmarnir fyri fíggjarætlanina 2020 bleiv samtykt í Fíggjarnevndini 20. juni 2019, og kunnað varð í faknevndunum 9.-12. september um málið, hevur verið arbeitt víðari við uppskotinum til fíggjarætlanina 2020 at leggja fyri Fíggjarnevndina.

Í niðanfyri standandi uppskoti til fíggjarætlan 2020 er roknað við, at kommunuskattaprosentið er 19,00%, og at barnafrádrátturin er 8.000 kr, ið er tað, sum í løtuni er galdandi. Harumframt er nú í uppskotinum tikið hædd fyri kendum framskrivingum og virksemisbroytingum.

Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| 1.000 kr. | | Rokncskapur 2018 | Ætlan 2019 | Ætlan 2020 | Broyting 2019/2020 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 795.720 | 800.740 | 846.694 | 5,7% | *45.954* |
| 20601 | Felagsskattur | 41.888 | 30.000 | 35.000 | 16,7% | *5.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 2.295 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 132.134 | 133.600 | 145.397 | 8,8% | *11.797* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 38.167 | 37.616 | 35.353 | -6,0% | *-2.263* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.010.205** | **1.003.956** | **1.064.444** | **6,0%** | ***60.488*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 80.329 | 91.902 | 92.992 | 1,2% | *1.090* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 237.517 | 242.637 | 259.230 | 6,8% | *16.593* |
| §3 | Børn og ung | 173.420 | 179.729 | 190.133 | 5,8% | *10.404* |
| §4 | Undirvísing | 42.526 | 42.150 | 43.946 | 4,3% | *1.796* |
| §5 | Mentan og frítíð | 53.663 | 55.969 | 58.679 | 4,8% | *2.710* |
| §6 | Teknisk mál | 136.707 | 136.367 | 142.894 | 4,8% | *6.527* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 56.738 | 68.114 | 72.885 | 7,0% | *4.771* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -41.409 | -38.210 | -36.318 | -5,0% | *1.892* |
| | **Rakstur íalt** | **739.492** | **778.658** | **824.441** | **5,9%** | ***45.783*** |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.281 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.098 | 2.500 | 2.500 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **19.379** | **20.500** | **20.500** | **0,0%** | ***0*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **251.334** | **204.798** | **219.503** | **7,2%** | ***14.705*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 4.103 | 700 | 1.200 | 71,4% | *500* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.160 | 5.500 | 6,6% | *340* |
| 20401 | Rentuinntøkur | 0 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| | **Rentur íalt** | **4.103** | **5.860** | **6.700** | **14,3%** | ***840*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **247.231** | **198.938** | **212.803** | **7,0%** | **13.865** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir** | **46.456** | **13.134** | **19.607** | 49,3% | *6.473* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **200.775** | **185.804** | **193.196** | **4,0%** | **7.392** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **159.366** | **164.654** | **180.751** | **9,8%** | **16.097** |

* Avlop uttan Tórshavnar Havn

Kommunuskatturin er framroknaður við støði í inntøkunum fyrstu átta mánaðirnar í 2019. Harumframt er roknað við einum vøkstri í skattagrundarlagnum á 3,00%. Kommunuskattainntøkurnar vaksa tá 5,7% ella 46 mió.kr upp í 847 mió.kr í mun til 801 mió.kr í fíggjarætlanini 2019.

Skattainntøkurnar av eftirlønargjøldum og DIS, FAS og frádráttum eru mettar til 145 mió.kr sbrt upplýsingum frá Fíggjarmálaráðnum. Felagsskatturin er mettur til 35 mió.kr.

Samlaðu inntøkurnar hjá kommununi vaksa sostatt 61 mió.kr ella 6,0% upp í 1.064 mió.kr í mun til 1.004 mió.kr í fíggjarætlanini 2019.

Kommunan er í stórum vøkstri, og hevur hetta við sær nógv økt virksemi og tænastur og harav eisini øktar rakstrarútreiðslur. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar vaksa 46 mió.kr úr 779 mió.kr upp í 824 mió.kr, sum er ein vøkstur á 5,9% í mun til fíggjarætlanina 2019.

Hædd er tikið fyri broyttum lógarkrøvum, býráðssamtyktum íroknað virksemisbroytingum sum fylgja av nýggjum íløgum, sáttmálabroytingum og líknandi.

Fólkavøksturin hevur týðandi ávirkan á rakstrararútreiðslurnar, og gongdin í fólkatalinum ávirkar bæði inntøkur og útreiðslur.

**§ 1 Kommunual fyrisiting**: Nettoútreiðslurnar økjast við 1,2% ella 1,1 mió.kr. Serliga er talan um sáttmálabundnar lønarhækkingar. Játtanin til Teknisku fyrisiting lækkar orsakað av, at nýggj rakstrardeild er sett á stovn á §6 Teknisk mál, sum hækkkar tilsvarandi.

**§ 2 Almanna- og heilsumál**: Nettoútreiðslurnar økjast við 6,8% ella 16,6 mió.kr.

Røktartænasturnar økjast 6,2 mió.kr, og øking er í Tilboð til eldri á 1,5 mió.kr, har ið talan er um lønarútreiðslur á nýggja Umlættingar- og rehabiliteringsstovninum, sum er i gerð í Hoyvík og eisini Tjarnargarð. Ein øking er í útreiðslunum til nýggja kt-skipan til Heilsuhúsið á 1,3 mió.kr.

Útreiðslur til barnavernd økjast 1,1 mió. kr, og útreiðslur til børn sett heiman í fosturfamilju 2 mió. kr. Við verandi børnum í skipanini økjast brúkaragjøld til serstovnar við einari knappari mió.

Kommunulæknasetan og leiga av læknahúsum økir hesa útreiðslu 1 mió.kr.

**§ 3 Børn og ung:** Nettoútreiðslurnar fylgja í høvuðsheitum barnatalinum, og økjast útreiðslurnar 5,8% ella 10,4 mió.kr. Framroknaða talið av børnum á ansingarstovni økist við 75. Útreiðslur til systkinaavsláttur vaksa 1,5 mió.kr.

**§ 4 Undirvísing:** Nettútreiðslurnar hækka 4,3%, ið er 1,8 mió. Játtanin fylgir metta næmingatalinum. Størsti vøksturin er í samband við nýggja Skúlan á Fløtum.

**§ 5 Mentan og frítíð:** Nettoútreiðslurnar hækka 4,8% svarandi til 2,7 mió.kr. Av hesum er øking í lønum vegna økt virksemi 1,7 mió.kr. Hædd er tikið fyri, at nýggi Musikkskúlin er nú latin upp. og øktum virksemi á Býarsavninum.

**§ 6 Teknisk mál:** Nettoútreiðslurnar økjast við 4,8% ella 6,5 mió.kr. Av hesum eru lønir 4,6 mió.kr í samband við økt virksemi. Fleiri fermetrar av bygningum eru at viðlíkahalda, eisini er øktur rakstur í sambandi við kirkjugarðarnar. Sett er á stovn nýggj rakstrareind, ið burturav skal taka sær av viðlíkahaldi av undirstøðukervinum í kommununi.

**§ 7 Kommunal virkir**: Nettoútreiðslurnar økjast við 7,0%, sum er 4,8 mió.kr. Meirkoyring hjá Bussleiðini kostar 4,5 mió.kr.

Sambært fyriliggjandi uppskoti við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 219,5 mió.kr. Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir verður 212,8 mió.kr. Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 180,8 mió.kr.

Munurin ímillum avlopið til skattafíggjaðar íløgur og samlaðar íløgur hægri enn hetta, má fíggjast við meiri inntøku, tøkum peningi og/ella lántøku.

Framskrivaðar inntøkur fyri 2019 vísa, at inntøkurnar verða hægri enn mett. Ætlanin er eisini at fíggja íløgur í 2020 við hesum inntøkum.

**Tilmæli:**

Sambært Kommunustýrislógini skal Fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri Býráðið innan 1. oktober.

Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir Fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 25. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Framlagt.

**Ískoyti og tilmæli til náttúru- og umhvørvisnevndina:**
Átrokandi viðurskifti á náttúru- og umhvørvisøkinum, sum ikki eru tikin við í fyriliggjandi uppskoti og sum tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til at taka við í fíggjarætlanina fyri 2020:

<u>Teknisk fyrisiting</u>, konto 1313
Neyðug fígging: 600 tkr. í 2020
Fyrisitingarligu uppgávurnar hjá deildini eru seinastu árini blivnar fleiri, í takt við at fleiri lógir og kunngerðir eru komnar á umhvørvisøkinum.
Somuleiðis hevur Tórshavnar kommuna samtykt ein umhvørvispolitikk (Grøna Leiðin) – í 2016, sum umhvørvisdeildin varðar av at føra út í verki.
Í løtuni eru ov fá starvsfólk á deildini til at fevna um tær fyrisitingarligu arbeiðsuppgávurnar, fremja tiltøk og íverkseta verkætlanir/átøk, sum taka støði í umhvørvispolitikkinum. Tískil er týdningarmikið at fáa eina normering afturat til umhvørvisdeildina.

<u>Umhvørvistiltøk o.a.</u>, konto 6610
Neyðug fígging: 13,5 mió. í 2020
Tórshavnar kommuna hevur samtykt yvirlýsing um veðurlagsbroytingar ísv. COP21, har kommunan vil ganga á odda ímóti veðurlagsbroytingunum og skerja útlátið av vakstrarhúsgassum.
Tórshavnar kommuna hevur somuleiðis í umhvørvispolitikkinum (Grøna Leiðin) sett sær sum mál at skerja útlátið av vakstrarhúsgassi hjá Tórshavnar kommunu við 50% í 2025 í mun til 2016.
Við støði í hesum bleiv avgjørt at orða ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu (Mál 17/03154). Ein arbeiðsbólkur hevur síðan fyrru helvt av 2018 gjørt drúgt greiningararbeiði, t.v.s. útgreinað orkunýtsluna 2016-2018 og gjørt uppskot til hvørjar verkætlanir og/ella átøk skulu setast í verk fyri at náa hesum máli. Ein tilhoyrandi kostnaðarmeting er somuleiðis

gjørd, sum vísur, at við eini játtan á 13,5 mió. kr. árliga til hetta, so ber til at røkka málinum í umhvørvispolitikkinum.
Tískil er neyðugt at játta pening til fleiri orkuverkætlanir komandi árini, um Tórshavnar kommuna skal gerast ein grøn kommuna.

Renovatión, konto 7110
Neyðug fígging: 2,0 mió. í 2020
Virksemið í samfelagnum økist og hetta ger, at kapasiteturin á brennistøðini er um at verða náddur. Neyðugt verður tískil at arbeiða við einari loysn á hesum, og mælt verður til, at í fyrstu syftu verður peningur játtaður til at gera eina framtíðarætlan og eina tilbúgvingarætlan fyri KB.

**Ískoyti og tilmæli til teknisku nevnd:**
Átrokandi viðurskifti á tekniska økinum, sum ikki eru tikin við í fyriliggjandi uppskoti og sum tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka við í fíggjarætlanina fyri 2020:

Marknagil, konto 8175, L81018
Neyðug fígging: 20 mió. í 2020 og 8,2 mió. í 2021
Arbeiðið at gera vegirnar úti í Marknagili er í gongd og skal meginparturin av arbeiðinum verða liðugt, áðrenn Skúlin á Fløtum letur upp, eftir summarfrítíðina í 2020.

Karlamagnusarbreyt, konto 6475, L64015
Neyðug fígging: 10 mió. í 2020 og 10 mió. í 2021
Tørvur er at fáa gjørt arbeiðið við KMB liðugt, herundir asfalt, uppmerking, broyta útkoyringar við Bónus og Skúlan, kantsteinar, gøtur, ljós og aðrar tillagingar.

Kloakk Dalavegur konto 6875
Neyðug fígging: 3 mió. til byggistig 1 og 4,0 mió. til byggistig 2
Bústaðir skulu á vári 2020 byrja uppá íbúðir ovarlaga á Dalavegnum. Neyðugt verður at fyrireika og leggja leiðingar í hesum sambandi, umleið 550 metrar tilsamans. Ætlanin er at gera hetta í 2 byggistigum. Fyrra byggistig er niðari parturin, frá J. Paturssonar gøtu til Dungagøtu, umleið 250 metrar. Arbeiðið kann byrja eftir ólavsøku 2020, og tekur umleið 4 mánaðir.
Byggistig 2 er ovari parturin, frá Dungagøtu og niðan til útstykkingina, umleið 300 metrar.

Vatnbyrging Villingardal, konto 6775
Neyðug fígging: 1 mió. í 2020 og 10 mió. í 2021
Neyðugt verður at hækka vatnbyrgingina í Villingadali. Mett verður, at samlaði kostnaðurin er umleið 20-25 mió. Ætlanin er at seta pening av í 2020 til projektering.

Arbeiðir isv Fjarhita, konto 8110 og 6810
Neyðug fígging: 17 mió. í 2020
Í sambandi við at Fjarhitafelagið er í gongd við at leggja eina høvuðsleiðing út á Argjar, verða vegir uppgrivnir fyri at leggja fjarhitarør niður. Ein avleiðing av hesum er, at tað er neyðugt hjá kommununi at seta pening av til at umleggja og umskipa vegir, kloakkir og aðrar leiðingar. Arbeiðið verður væntandi gjørt yvir nøkur ár. Tað er trupult at siga, hvat hetta kostar kommununi, men út frá tí arbeiði, sum Fjarhitafelagið hevur gjørt, m.a. á Landavegnum, verður mett, at 17 mió. árliga er á góðari leið.

Parkering, konto 8175
Neyðug fígging: 10 mió. í 2020 og 40 mió. í 2021

Arbeitt verður við at gera parkeringstunnil við eystara havnarlag, við pláss til uml. 200 bilar. Eisini verður arbeitt við einum parkeringskjallara í sambandi við íbúðarætlan á Frúutrøð. Hesi bæði prosjektini koma at kosta tilsamans góðar 100 mió.

Bussleiðin, konto 7510
Neyðug fígging: 4,5 mió. í 2020
Ætlanin er at leingja verandi sáttmála um busskoyring í eitt ár afturat, fram til 1. apríl 2021. Í hesum tíðarskeiðinum kundi kommunan sett inn ein El-buss sum royndarkoyring, fyri at vita um el-bussar skulu takast við í komandi útbjóðing av bussleiðini.

**Ískoyti og tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Átrokandi viðurskifti á byggi- og býarskipanarøkinum, sum ikki eru tikin við í fyriliggjandi uppskoti og sum tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini og leiðarin fyri húsaumsitingina mæla til at taka við í fíggjarætlanina fyri 2020:

Røkt og umvæling av bygningum, konto 6110
Neyðug fígging: 630 tkr. í 2020
Við fyriliggjandi játtan í 2020, er kostnaðurin 175,82 kr./kvm. uttan MVG. (2019: 173,11). Í mun til 2019, er játtanin í fyriliggjandi játtan hækkað við 575 tkr. Neyðugt er við øktari játtan, um viðlíkahaldið á bygningunum skal vera á einum nøktandi støði. Við hesari hækkan verður kostnaðurin 180 kr./kvm.
Sí hjálagt notat í málinum j.nr. 19/02369-26 Notat viðv. útrokningum hjá húsaumsitingini.

Fríðkan og viðlíkahald, konto 6210
Neyðug fígging: 4.690 tkr. í 2020
Virksemið á byggi- og býarskipandeildini økist støðugt. Fleiri gøtur eru gjørdar, fleiri øki verða plantað, til frama fyri trivnaðin í býnum. Ynski er støðugt um meira viðlíkahald og gøtur, ið nú eisini verða brúktar til súkkling, sum ger at tær javnan hava tørv á ábótum. Fleiri av spæliplássunum hava tørv á ábótum og viðlíkahaldi at tryggja at trygdin er í lagi. Mett meirjáttan til eigarafeløg 380 tkr.

Tørvur á meirjáttan til nýggjar og umvæling av verandi bóltvøllum 1.230 tkr.

Tørvur á meirjáttan til umvæling og hald av gøtuskipan 425 tkr.

Tørvur er á meirjáttan til býarskipanarligar uppgávur, laðingar av grótgarðum og aðrar uppgávur 855 tkr.

Miðalkostnaður í 2019 fyri røkt av økjum, tá ið boðið verður út er 51,6 kr./fermetur/ár. Tørvur er á meirjáttan til útbjóðing av grønum økjum uppá 1.000 tkr.

Kommunan hevur skógarfriðað m.a. Havnardal. Talan er um sáttmálabundna upphædd. Í hesum sambandi er tørvur á meirjáttan á 200 tkr.

Neyðugt verður at seta landskapsarkitekt í fyribilsstarv á býarskipanardeildini, inntil býargartnarin fer frá vegna aldur, og hareftir seta viðkomandi í fast starv sum býargartnara. Tørvur er á einari meirjáttan á 600 tkr.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2019:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum til náttúru- og umhvørvisnevndina og samstundis vísir á at neyðugt verður við eykajáttan seinni í árinum í sambandi við tyrving í Kvívík.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Vinnunevndin 07. oktober 2019:** Málið varð framlagt.

**Tekniska nevnd 08. oktober 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum til teknisku nevnd.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Trivnaðarnevndin 10. oktober 2019:** Ein minniluti, Bergun Kass og Bogi Andreasen, mæla til at hækka kontu 2460 við 400.000 til framhald av ABC-verkætlanini og at hækka kontu 2614 við kr. 400.000 til fyribyrging innan dagstovnaøkið.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt.

**Eldranevndin 10. oktober 2019:** Ein meiriluti, Bergun Kass og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum til eldranevndina og mælir samstundis til at hækka normeringarnar til røktartænastur konta 2721 við kr. 3 mió, at økja játtan til rakstur konta 2720 við kr. 3 mió ætlað til at endurnýggja røktarsengur, innbúgv, størri køksútbúnað, kalliskipan v.m., at játta kr. 1,15 mió á kontu 2720 til reingerðartænastuna til fólkapensjónistar, so at skipanin kann halda fram, og at játta kr. 350.000 á kontu 2720 til verkætlan við føstum kommunulækna inn á røktarheim og til at keypa flytføra tannlækaútgerð til røktarheimini.

Ein minniluti, Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, taka undir við tilmælinum til mentamálanevndini og mælir samstundis til at konta 5310 Mentanartiltøk o.a. verðru endurskoðað viðvíkjandi endamáli og nevndarábyrgd. Harumfrat at konturnar 5312 Mentanarhølir í býnum og 5315 Finsen verða lagdar saman. Mælt verður eisini til at seta játtan av til ungdómstilboð á Velbastað á grein 3.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina við tí broyting, at hækka játtanina til røkt og umvæling av bygningum til 190 kr/m$^2$ svarandi til íalt kr. 31.276.323, ið er ein hækkan á kr. 2.445.323 í mun til uppskotið.

Meirilutin tekur eisini undir við náttúru- og umhvørvisnevndini um at seta kr. 13,5 mió. árliga av í sambandi við orkuloysnir .

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við fyriliggjandi fíggjarætlanaruppskoti og beinir málið í býráðið. Viðvíkjandi teimum broytingum, ið nevndirnar hava mælt til, verða hesar beindar aftur í nevndirnar við atliti til at finna fígging innanfyri samlaða karmin í fíggjarætlanaruppskotinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki  undir við fyriliggjandi fíggjarætlanaruppskoti.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019: Atkvøtt varð um** tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari í móti og 6 blonkum atkvøðum, og uppskotið til fíggjarætlan sostatt samtykt við 1. viðgerð.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Heðin Mortensen, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. oktober 2019 | Blað nr.: 1104 |
| | Formansins merki: |

# 258/19 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 52/19 | 19/00096-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 48/19 | 19/00096-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 86/19 | 19/00096-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 73/19 | 19/00096-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 122/19 | 19/00096-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 100/19 | 19/00096-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 145/19 | 19/00096-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 129/19 | 19/00096-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 204/19 | 19/00096-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 167/19 | 19/00096-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 251/19 | 19/00096-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 229/19 | 19/00096-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 283/19 | 19/00096-1 |
| 14 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 258/19 | 19/00096-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri** | **Fyri ávís** | **Fyri ávísar** | **Fyri** |
|---|---|---|---|---|

| | Tórshavnar kommunu | økir í kommununi | samfelagsbólkar ella felagsskapir | vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

## 259/19 Skipan av Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 206/18 | 18/03468-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 285/18 | 18/03468-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 250/18 | 18/03468-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 276/18 | 18/03468-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 150/19 | 18/03468-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 244/19 | 18/03468-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 280/19 | 18/03468-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 182/19 | 18/03468-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 292/19 | 18/03468-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 259/19 | 18/03468-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna er í menning, og stóri fólkavøksturin merkist serliga í høvuðsstaðarøkinum. Tørvur er á at víðka um býin, og í hesum sambandi verður farið undir arbeiðið at skipa Stórutjørn, matr. nr. 135ed og 1æf, Hoyvík – økið norðanfyri Klingruna og vestanfyri býlingin Inni á Gøtu, sum er uml. 525 ha til støddar, sí skjal *Stóratjørn*.

Geografiskt liggur økið væl fyri, millum bústaðarøkið í Hoyvík, vinnuøkið á Hjalla og nýggja innkomuvegin, sum verður gjørdur í sambandi við Eysturoyartunnilin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu er Stóratjørn eitt av teimum økjunum, ið mett veður at hóska seg væl til býarvøkstur. Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í A3 øki, sum er ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum, sum kann virka saman við ítróttinum og D1 øki, sum er økið nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík liggur í.

Sum ein liður í at útvega nýtt byggilendi í kommununi, tað verði seg til bústaðir, vinnu, ítrótt, mentan o.a., er ætlanin í fyrsta umfari at bjóða arbeiðið at skipa økið við Stórutjørn út til uttanhýsis ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:
- *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
- *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
- *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

Ásetingar fyri D1 øki:
- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri D2 øki eru m.a.:

- *Umráðisparturin verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*
- *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2007 varð ætlan um at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Økið varð lagt av til vinnuøki, bústaðarbygging, ítróttar- og frítíðarvirksemi og almenn fríøki, sí kortskjal *Serstøk byggisamtykt – kort.*

Bygging og skipan eftir serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn varð tó aldrin til veruleika og ongar ætlanir eru at skipa økið eftir serstøku byggisamtyktini, sum eftir hondini er vorðin ótíðarhóskandi. Tí verður arbeitt við uppskoti um at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn, so arbeitt kann verða við víðari menning og býarvøkstri í økinum.

Í 2015 varð samtykt at geva SEV rættin til optión at keypa eitt uml. 20.000-30.000 $m^2$ stórt byggilendi við Stórutjørn, partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík. Hendan optiónin var galdandi í 1 ár, og av tí at Tórshavnar kommuna ikki hevur hoyrt meira frá umsøkjaranum, er avtalan ikki galdandi meir.

Magn stendur á bíðilista hjá kommununi um so er, at kommunan ger eina útstykking til vinnustykkir. Men Magn hevur einans ynski um eitt grundstykki, sum skal liggja við innkomuvegin, og hevur man í síni tíð tikið atlit til hetta ynski í Stórutjørn verkætlanini, har man vildi avseta eitt øki til eina bensinstøð í Hoyvíkshaganum. Har fyriliggur tó ikki ein føst avtala, so um kommunan ikki avsetur eitt øki til bensinstøð í Hoyvíkshaganum, so er einki grundstykki tøkt at tilluta Magn. Somuleiðis er tað ein avbjóðing, at ein einstakur keypari verður valdur at keypa eitt grundstykki við bestu plasering út til møguligan innkomuveg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Serstøk byggisamtkyt Stóratjørn – broyting av byggisamtykt,* journal nr. 2006-1204.
*Selmar Nielsen: Umsókn vegna SEV um rættin til optión at keypa byggilendi við Stórutjørn partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík,* journal nr. 15/02686.
*Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn,* journal nr. 17/03802.

**Møgulig frávik/læ̈ttar frá ásetingum**
Ongin

**Umhvørvisárin**
Í sambandi við at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri Stórutjørn í 2008, gjørdi Føroya Náttúrugripasavn, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, árinskanning av bygging í økinum, sí skjal *árinskanning 1-34.pdf*.

Árinskanningin vísti m.a. at:

- 47 plantusløg vóru skrásett í økinum, ongar av hesum plantum vóru sjáldsamar.
- 13 fuglasløg eiga í økinum. Fýra teirra eru á føroyska reyðlistanum og fevnd av Bonn-sáttmálanum (grágás, spógvi, lógv og vípa).
- Talið av sordýrum er skiftandi úr einum stað í annað. Funnu klukkurnar eru millum vanligu klukkurnar í Føroyum.

Í niðurstøðuni av árinskanningini verður mælt til, at lyngurin í økinum verður vardur bæði í sambandi við grøn øki á byggiøkinum og á økinum uttanum. Somuleiðis verður mælt til at geva fuglinum frið til at byggja á økjunum nærindis (t.d. við at virksemi sum spreinging, ið órógvar fuglin, ikki verður framt, tá ið fuglurin reiðrast).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Stóratjørn,* journal nr. 18/03468-2.
*Stóratjørn – byggisamtykt,* journal nr. 18/03468-2.
*Innkomuvegur,* journal nr. 18/03468-2.
*SEV optión,* journal nr. 18/03468-2.
*Árinskanning 1-34.pdf.* journal nr. 18/03468-4.
*Serstøk byggisamtykt – kort,* journal 18/03468-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 200.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykki, til at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um at skipa økið við Stórutjørn og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 200.000 av konto L62032 á konto 7315 kommunuætlanin, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð samtykt á býráðsfundi 29. november 2018, hevur umsitingin arbeitt við at framleiða tilfar, ið skal nýtast í sambandi við at skipan av økinum skal bjóðast út sum almenn hugskotskapping.

Í kappingartilfarinum verður ført fram, at ynski er at skipa økið til blandaða búðstaða- og miðstaðabygging, stórhøll og lætta vinnu. Atlit skulu takast til verandi lendið, flora og fauna og søguna í økinum, sum gamlir torvheiðar.

Lagt verður upp til at bústaðarbyggingin, sum verður í økinum, er blandað, og at dentur verður lagdur á trivnaðin í økinum, bæði tá hugsað verður um støddarlutfallið, og í skipanini av útiøkjunum.

Í sambandi við kommunuætlanina, eru nøkur økir vald út, sum hóska seg til býarvøkstur, harímillum er Stóratjørn eitt av teimum best egnaðu, sí øki 1, skjal *Vakstrarøkir í Hoyvík*. Øki 1, 2 og 3 liggja uppat hvørjum øðrum, og tí eru tey viðgjørd sum eitt øki, tá tað viðvíkur kloakk og vegum.
Økini 1, 2 og 3 kunnu viðgerast undir einum, tá tey liggja upp at hvørjum øðrum. Økini liggja í Hoyvíkshaganum og liggja norðan fyri verandi býlingar og ringveg.

**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Tekniska deild hevði hesar viðmerkingarnar til hesi økini:

Talan er um øki, ið skulu gerast heilt av nýggjum, hvat viðvíkur kloakk og vegagerð.

Ongin kloakk er í økinum sum kann brúkast, og tí er neyðugt at gera eina nýggja kloakkleiðing, sum skal leggjast oman til Hvítanes.

Viðvíkjandi vegíbinding, er økið væl egnað og lætt at fara undir, tá vegurin Klingran gongur tætt framvið og kemur Ytri Ringvegurin eisini at liggja í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til
- at økið verður boðið út sum ein arkitektakapping til skipan av økinum.
- At játtaðar verða 600.000 kr. av konto L62032 til kappingarvinnarar og til uttanhýsis ráðgeving í sambandi við kappingina.
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at boðið verður út millum føroyskar fyritøkur.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í viðgerðini av fyribils kappingarskránni til hugskotskappingina, er umsitingin gjørd varug við, at neyðugt verður við størri játtan enn upprunaliga mett fyri at seta kappingina í verk.

Dómsnevndin dømir um innkomnu uppskotini, og um talan verður um tvær ella tríggjar virðislønir, umframt møguligt keyp av góðum hugskotum. Harafturat skal dómsnevndin lønast og hava ferðaútreiðslur goldnar.

Mett er, at neyðugt verður at játta 1,0 mió. til endamálið.

Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
1. at játta kr. 1.000.000,00 av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan “Stóratjørn” undir konto 6275
2. at heimila umsitingini at bjóða ætlanina út í kapping
   at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Málið kom ikki á skrá.

# 260/19 Umsókn um byggiloyvi til bilskýli á matr. nr. 4dg, Rygsgøta 29, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 168/19 | 17/03215-19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 277/19 | 17/03215-19 |
| 3 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 260/19 | 17/03215-19 |

**Upprunin til málið:**
Byggingin byrjar uttan byggiloyvi og verður steðgað. Eftir hetta sendir eigarin kommununi eina umsókn um byggiloyvi.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsóknin umfatar eitt bilskýli á 39,5 m$^2$, sum er staðsett nærri vegnum enn 5 m. Upprunaliga umsóknin lýsir eitt bilskýli, sum er staðsett uml. 1,5 m frá markinum til vegin. Henda umsókn bleiv send grannanum norðanfyri til hoyringar. Byggimyndugleikin avgjørdi at nokta byggiloyvi vísandi til ásetingar í skeytinum um m.a. frástøðu og mist útsýni.

Nýggj umsókn bleiv send kommununi. Staðsetingin er fyri so vítt tann sama, men teir fyrstu 1,5 m frá vegnum eru lækkaðir niður á 1,5 m og full hædd á bilskýlinum byrjar tískil uml. 3 m frá vegnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ognin liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum í høvuðsheitum er lagdur til sethúsabygging.

Mest loyvda byggistig er 0,3 og mest loyvda nýtslustig er 0,6. Loyvt er at økja um byggi- og nýtslustigið við 0,1, tó í mesta lagi 50 m$^2$, sum bert kann nýtast til bilhús, bilskýli, úthús, yvirdekkað øki o.l.

Á ognina eru eisini tinglýstar byrðar, sum eru byggiregulerandi. Hesar byrðar eru viðkomandi í málinum:
Punkt 8, a:
*"Í samband við góðkenning og avseting av húsum, skal dentur verða lagdur á, at húsini fella væl í landslagið og samtykkja við grannahús og byggingina á økinum sum heild, at eingi hús taka útsýnið frá grannahúsum í størri mun enn avgerandi neyðugt, og at byggingin á økinum sum heild hevur dám av lágari bygging."*

Punkt 8, f:
*"Eingi hús mugu vera nærri enn 2,5 m frá marki og 5 m frá vegi, tó kann bilskúrur setast nærri marki, um skrivligt loyvi fæst frá grannanum."*

Viðv. Átalurætti verður víst til punkt 9, har tað er ásett:
*"Ásetingarnar í frammanfyristandandi punkt, 1, 3, 4, 5, 6, 7, og 8 verða at tinglesa sum servituttbindandi á eigindómin. Átalurætt hevur bygdaráðið. Harumframt hevur eigarafelagið átalurætt viðvíkjandi ásetingunum í punkt 7, 8 e. og hvat viðvíkur punkt 7, 8 f og 8 i kann granni mótvegis granna átala brot ímóti reglunum."*

**Upplýsingar frá umsitingini**

Ognin matr. nr. 4dg er 500 $m^2$ til víddar. Á ognini standa í dag eini sethús. Verandi byggistig er 0,29 og verandi nýtslustig er 0,58. Afturat hesum er ein altan á 15 $m^2$. Ognin er fevnd av nøkrum byrðum, sum áseta ymisk byggiregulerandi viðurskifti viðv. bygging.

Ætlaða bilskýlið hevur eina vídd á 39,5 $m^2$ og rúmast tað innanfyri mest loyvdu bygging á ognini í mun til byggisamtyktarligu ásetingarnar. Frástøðan til grannamark er 2,5 m og kommunan kann í mun til byggisamtyktina loyva, at bilhús verða sett nærri veg enn 5 m. Tískil er einki frávik í mun til byggisamtyktarligu ásetingarnar.

Av tí at byggiregulerandi ásetingar eru tinglýstar á ognina, varð umsóknin send viðkomandi granna til hoyringar.
Grannin grundar í stóran mun sínar viðmerkingar á tað, sum er bygt frammanundan á ognini og við at loyva at bygt verður meira móti hansara ogn, verður útsýnið tikið í mest møguligan mun.

Grannin vísir á skeytisásetinga: ".......at dentur verða lagdur á, at húsini skulu fella væl í landslagið og samtykkja við grannahús og byggingina á økinum sum heild, at eingi hús taka útsýnið frá grannahúsum í størri mun enn avgerandi neyðugt....."

Grannin vísir á, at talan er um eina umsókn um frávik og at tað ber væl til at halda ásetingarnar í skeytinum, tí rúm er fyri bilskýlinum aðrastaðni á ognini.

Umsøkjarin metir hinvegin, at ætlaða byggingin ikki tekur nevnivert av útsýni og vísir eisini á, at hópur av bilskúrum eru bygdir bæði í mark og tætt at vegi.

Umsøkjarin lýsir byggingina sum verandi staðsett 5 m frá vegi, men umsitingin er harafturímóti av tí fatan, at frástøðan til vegin má roknast í mun til matrikulmark og ikki í mun til hvar skili millum veg og gongubreyt er. Breiddir á gongubreyt og vegum eru ikki statiskar, men tað er matrikulmarkið harafturímóti. Tískil stendur ætlaða bilskýli einans 3 m frá vegnum og talan er um eitt frávik frá skeytisásetingi í punkt 8f. Frástøðan verður roknað frá vegamarkinum til bilskýlið, har hæddin fer upp um 1,5 m.

Hóast umsøkjarin hevur lækkað ætlaðu bygging niður á 1,5 m í ytra partinum av bilskýlinum, metir umsitingin framhaldandi, at talan er um bygging sum tekur óneyðuga nógv sýni frá grannanum havandi í huga, at byggingin á ognini strekkir seg uttan íhald í mun til nærum alla breiddina av grundøkinum, eystur/vestur.

Í samráð við løgdeildina verður mett, at um bygging heldur seg 4 m frá markinum móti vegnum er talan um eitt frávik frá skeytisásetingunum, sum verður mett rímiligt. Grannin varðveitir útsýnið í ein ávísan mun og tað er ikki trupult hjá umsøkjara at innrætta seg á ogn sínari við hesum fráviki.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Byggingin er nærri vegnum enn 5 m, víst verður til punkt 8f í skeytinum.

**Umhvørvisárin**
Viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Løgdeildin mælir til at geva byggiloyvi sum frávik frá skeytisásetingini í punkt 8f, við 4 m frástøðu frá vegi.

**Skjøl**
J. nr. 17/03215-16 Dagført tekningstilfar
J. nr. 17/03215-14 Viðmerkingar frá granna
J. nr. 17/03215-17 Løgfrøðiligt skriv frá umsøkjara
J. nr. 17/3215-18 Ískoyti til løgfrøðiligt skriv frá umsøkljara - móttikið 11.03.2019
J. nr. 17/03215-8 Meting av frávikið
J. nr. 17/03215-20 Byrðar
J. nr. 17/03215-21 Viðmerkingar frá Stjórnarskrivstovuni (løgdeildini)

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til at geva byggiloyvi sum eitt frávik frá skeytisásetingini og loyva einari frástøðu til vegamark á 4 m og at beina málið í fíggjarnevndina til endaliga støðutakan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 22:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |